# Barna- og ungdómskanning

mentan, frítíð og trivnaður

Í sambandi við at Mentamálaráðið skal lýsa ein nýggjan barna- og ungdómspolitikk fyri landið, varð ein kvantitativ kanning av mentanarligum og sosialum viðurskiftum hjá føroyskum børnum gjørd várið 2008. Frágreiðingin, ið her fyriliggur, byggir á spurnakanningina, ið fór fram á 8 fólkaskúlum kring landið. Børn úr 3. og 8. flokkum luttóku.

**PhD Firouz Gaini**
**Aug 2008**




KFUM










PSR-GX76











## Barna- og ungdómskanning

## Innihald

**[1] Inngangur** **s. 10**

**[2] Úrslit – 3. flokkur** **s. 16**

**[3] Úrslit – 8. flokkur** **s. 37**

**[4] Niðurstøður** **s. 67**

**Fylgiskjøl**

## Ungdómslív

Um várið sólin vermir blómur vakrar
og elur spírandi og grønar akrar,
tá áin klár man renna,
og aldan dandar blíð;
man hjartað ikki kenna
hjá sær so vorðna tíð?
Ungdómslív, vársól fyri sinnið!
Ungdómslív, kelda fyri minnið!
Ungdómslív!

So lætt og frítt er sinnið hjá tí unga,
tað blíðkar sorg og álvarstankan tunga,
til barmin lív tað gevur,
til vakurt og til nýtt
tað unga sinnið dregur,
ger hjartaslagið títt.

Tann ungi, hann er djarvur til at teinkja,
lætt er tað hann til avreksverk at leinkja,
hann hugsar altíð fróður
at gera hug til verk,
og um hann skjótt varð móður,
var trúgvin líka sterk.

Og fyri øllum góðum heitt slær hjartað,
so fegin man hann dragast at tí bjarta;
hann hjartað burtur gevur,
ja meir enn eina ferð,
tó líka nógv hann hevur
av tí, sum vinin ger.

Lat ungdómslívið væl og vakurt trívast,
av minninum tú seinni skalt upp livast;
lat ungdómsminnið lýsa,
tað er so gott eitt mið,
tað lat tær vegin vísa
til troyst og góðan frið.
Ungdómslív, vársól fyri sinnið!
Ungdómslív, kelda fyri minnið!
Ungdómslív.

(Jørgen Hammershaimb)

# Formæli

Barna- og ungdómskanningin er ein roynd at lýsa børn og ung í Føroyum í dag við høvuðsdenti á evnunum: mentan, frítíð og sosialur trivnaður. Tað er Mentamálaráðið, ið hevur tikið stig til kanningina. Eg takki ráðnum fyri álitið, tað sýndi mær, tá eg fekk áheitan um at vera verkætlanarleiðari og standa fyri kanningini, ið tekur útgangsstøði í sjónarhorninum hjá børnum og ungdómum. Eg skal eisini takka Kristian Joensen, stjórnmálafrøði-lesandi á Søgu- og Samfelagsdeildini, Fróðskaparsetur Føroya, fyri at taka sær av tí (teldu)tøkniliga partinum av kanningini. Kristian, ein sera góður samstarvsfelagi, hevur savnað úrslitini saman á teldu. Hann kann sigast at hava gjørt tað tyngsta arbeiðið, ið liggur aftan fyri frágreiðingina. Tó standi eg eyðvitað persónliga við ábyrgdini fyri tilfarinum, ið nú verður almannakunngjørt.

Ungdómsgransking er eitt lutfalsliga nýtt fyribrigdi í Føroyum. Tó havi eg sjálvur seinastu árini, millum annað við at skriva eina antropologiska Ph.D-ritgerð um ung í Føroyum, roynt at fáa eina samfelagsvísindaliga gransking av yngru ættarliðunum í landinum upp at standa. Vónandi kann fráðgreiðingin, ið her fyriliggur, virka sum eitt grundleggjandi íkast til samfelagskjakið og granskingina, ið hevur ungdómin í brennideplinum. Frágreiðingin hevur eyðvitað sínar avmarkingar – hon fortelur ikki allar ”søgurnar” um øll børn og ung í Føroyum *anno* 2008. Frágreiðingin tekur støði í úrvali av børnum í 3. og 8. flokkum skúlaárið 2007-08. Hon lýsir og viðger nøkur rák og mynstur, ið eyðkenna samfelagið, vit liva í. Spurnar-kanningin er ikki nóg umfatandi til at greina mentan, frítíð og trivnað hjá ungdóminum hagfrøðiliga. Men hon kann brúkast sum eitt sterkt fundament og amboð at arbeiða víðari við.

Skúlunum, ið luttóku í kanningini, takki eg hjartaliga fyri at seta tíð og orku av til verkætlanina. Hesir skúlarnir luttóku: Eysturskúlin, Argja skúli, Skúlin á Ziskatrø, Vágs skúli, Tofta skúli, Miðvágs-Sandavágs skúli, Eiðis skúli og Sandoyar meginskúli. Allir skúlarnir tóku kanningina í størsta álvara og hava tískil æruna av at arbeiðið eydnaðist so mikið væl, sum tað gjørdi. Vónandi kann spurnarkanningin endurtakast í nærmastu framtíð, so at barna- og ungdómsgranskingin í landinum kann mennast, og samfelagið tískil fáa eina størri og neyvari vitan um yngru ættarliðini. Endamálið við kanningini hjá mær var at savna álítandi tilfar um ungdómin saman, so at eg kann orða niðurstøður, ið skulu brúkast í einum tíðarhóskandi føroyskum mentanarpolitikki. Ofta hoyra vit vaksin fólk tosa um trupulleikar hjá ungdómi; sjáldan hoyra vit tey ungu sjálvi sleppa til orða. Málið hjá mær var at lata børnini og ungdómin fáa orðið.

# [1] Inngangur

## [1.1] Endamál

Endamálið við kanningini var at kanna, hvørjar áskoðanir og raðfestingar ungdómurin hevur viðvíkjandi mentanarlívi, frítíðarlívi, o.s.fr. Hvat saknar hann? Hvat er hann nøgdur við? Hvat undrast hann yvir? Og hava ung yvirhøvur áhuga fyri mentan? Tað er ein stór avbjóðing at fyrireika eitt spurnarblað til vísindaliga mentanarkanningar, ið vendir sær til børn og ung. Hvussu tryggjar ein sær t.d. at persónurin kann svarað *tað*, sum hann veruliga ynskir at svara? Kanningin hjá mær skal slóða veg fyri meira umfatandi tvørfakligum verkætlanum, ið seinni skulu fremjast. Sostatt er talan um longri tilgongd, ið skal sjósetast.  Granskingarúrslitini skulu eftir ætlan geva samfelags- og mentanarkjakinum eina vísindaliga vídd, so at neyv vitan fær eina hægri tign enn leysar gitingar uttan grundgevingar.

Endamálið við kanningini var haraftrat, at fáa fatur í tí ungdómi, vit vanliga hvørki síggja ella hoyra nakað til. Ungdómurin, ið er ”gloymdur” – hvørja áskoðan hevur hann til mentan, frítíð og skúla? Kanningin ynskir við øðrum orðum eisini at varpa ljós á børn og ungdóm, ið ikki ganga til fótbólt ella hondbólt, sang ella klaver, og sum møguliga mistrívast og sakna alternativ mentanartilboð. Hetta var ein hypotesa í verkætlanar-fyrireikingunum. Ætlanin var at kanna, um nakrir høvuðsungdómsbólkar seta dagsskránna, meðan aðrir bólkar eru meira ósjónligir í samfelagnum. Ein mentanar-politikkur fyri ung eigur eyðsæð at venda sær til øll ung úr øllum samfelagsbólkum á øllum oyggjum. Kanningin hjá mær skal eisini gera tað lættari at samanbera føroyskan ungdóm við ungdóm í grannalondum okkara. Hvat er eins, og hvat er øðrvísi? Spurnablaðið er skipað soleiðis, at úrslitini kunnu, við ávísum fyrivarnm, samanberast við úrslit av donskum, norskum og øðrum kanningum, ið taka somu evni upp til viðgerðar.

Tað er stórur tørvur á kanningum um børn og ung í Føroyum. Bókin *Miðlar, mentan og seinmodernitetur* (2008), ið er ein stytt útgáva av PhD-ritgerð mínari, er høvuðsverkið innan føroyska ungdómsgransking í løtuni. Saman við kanningini, ið her fyriliggur, hava lærarar, ráðgevar, politikarar og onnur fólk, ið arbeiða við ungdómi og ungdómsmentan í Føroyum, fingið virðismiklar rannsóknir og frágreiðingar, úrslit og niðurstøður, at brúka í sínum dagliga arbeiði. Ungdómurin í dag livir undir øðrum fortreytum enn foreldraættarliðið gjørdi, og tað er av týdningi, at vit fáa eina dagførda lýsing av hesum samfelagsbólkinum. Fyri at skilja tey ungu (og trupulleikar, tey hava at dragast við) noyðast vit at kanna, hvussu mentan, livikor og familjuviðurskifti teirra eru.

### *[1.2] Háttalag*

Tilfarið er úr spurnarkanning, ið eg gjørdi í samstarvi við 8 fólkaskúlar kring landið. Spurnarkanningin fór fram innan fyri eina viku í mars 2008, tá næmingar úr 14 skúlaflokkum fingu spurnarblaðið útflýggjað. Talan er um hesar flokkar og skúlar:

| | |
|---|---|
| Eysturskúlin (Tórshavn) | 3. & 8. flokkur |
| Argja Skúli | 3. & 8. flokkur |
| Skúlin á Ziskatrøð (Klaksvík) | 3. & 8. flokkur |
| Vágs Skúli | 3. & 8 flokkur |
| Tofta Skúli | 3. & 8. flokkur |
| Miðvágs-Sandavágs skúli | 3. & 8. flokkur |
| Eiðis skúli | 3. flokkur |
| Sandoyar meginskúli | 8. flokkur |

Seks størri skúlar við framhaldsdeild, harav tveir eru í Tórshavnar kommunu, luttóku við 2 skúlaflokkum, meðan 2 smærri bygdaskúlar luttóku við einum skúlaflokki í part. Aðrir fólkaskúlar í landinum kundu í grundini eisini verið útvaldir, men ein roynd at fáa øll høvuðsøki (landafrøðiliga) landsins umboðað, tó nøkunlunda svarandi til lutfalsliga fólkatalið í økinum, hevði við sær at valið fall á hesar 8 skúlarnar. Stovnarnir, ið eg (saman við Mentamálráðnum) setti meg í samband við nakrar mánaðir, áðrenn spurnarkanningin skuldi fara fram, vóru stak jaligir og samstarvshugaðir. Teir játtaðu straks, uttan undantak, at luttaka í verkætlanini um børn og ung í Føroyum. Eg fyrireikaði spurningarnar longu í 2007 fyri at hava stundir at royna og eftirmeta spurnarblaðið, áðrenn tað skuldi sendast út til luttakandi skúlarnar. Spurnarkanningin fór fram í einum skúlatíma ein heilt vanligan skúladag. Kanningin var sjálvandi anonym. Úr 3. flokki vóru íalt 111 luttakarar, meðan 127 næmingar úr 8. flokki luttóku í kanningini.

Hví velja júst 3. og 8. flokk í fólkaskúlanum? Tað eru fleiri orsøkir til at hesir aldursbólkarnir eru valdir út. Trupult er at brúka børn yngri enn 3. floks næmingar til vísindaligar kanningar, so her havi eg valt tann yngsta bólkin, ið eg metti tað vera ráðiligt at taka við. Haraftrat er 3. Flokkur áhugaverdur, tí at hetta er fyrsti árgangur, sum ikki hevur tilboð um frítíðarskúla frá kommununum kring landið. Hesi børnini skulu finna aðrar stovnar ella onnur feløg til síni frítíðarítriv. Í Havn eru tilboðini hjá Margarinfabrikkini (Virkishús fyri børn og ung) ein loysn, ið nøkur av børnunum velja at brúka. Í hesum aldrinum eru børnini eisini nóg stór til sjálvi at ferðast millum heim, skúla og frítíðarítriv. Tey klára at pakka taskur, fylgja við klokkuni, o.s.fr. Hví so velja 8. flokkar aftrat? Her er málið at fáa næmingar úr framhaldsdeildini at luttaka. Nú kenna tey seg ”vaksin” og eru ofta partur av ungdómsbólkum við serligum virðum og stílum. Tey taka nógvar avgerðir sjálvi og hava tankar um framtíðina. Í PhD verkætlanini hjá mær gjørdi eg eitt feltarbeiði í einum 8. flokki, ið eydnaðist stak væl, so eg eri eftirhondini vanur at brúka hendan aldursbólkin í kanningum. Tey ungu í 8. flokki eru haraftrat í eini skiftistíð – tey skulu skjótt til at velja, hvat tey ynskja at gera eftir 9. flokk.

Tá spurningarnir skuldu orðast, brúkti eg ymsar nýggjar danskar kanningar sum fyrimynd. T.d. hevur viðgitna Socialforskningsinstituttet í Keypmannahavn sera gott og viðkomandi tilfar, ið gevur leiðbeining til granskarar, ið fyrireika kvantitativar kanningar við børnum sum heimildarfólk. Eitt spurnarblað til eitt 9-ára gamalt barn kann ongantíð vera eins og eitt spurnarblað til vaksin fólk. Eisini er stórur munur á førleikunum at svara hjá teimum, ið ganga í 3. og 8. flokki. Aldurin er við øðrum orðum ein sera týðandi faktorur, tá spurnarbløð skulu setast saman. Børn, ið ganga í 3. flokki eru, sambært fleiri viðurkendum granskarum, hin yngsti bólkurin, ið kann brúkast til vísindaligar kvantitativar kanningar, um úrslitini skulu vera eftirfarandi. Børn, ið eru yngri enn 9-10 ár, megna illa at skilja, hvat spurnarkanningar skulu brúkast til og hví tey skulu luttaka í kanningum. Haraftrat er rættiliga avmarkað, hvat hesi smáu heimildarfólkini kunnu geva nakað greitt svar uppá.

Spurnarbløðini til 3. og 8. flokk høvdu ávikavist 30 og 36 spurningar (fylgiskjøl). Nógvir spurningar vóru heilt eins hjá báðum bólkunum, men aldursmunurin kravdi tó, at fleiri spurningar vóru ”einfaldari” til næmingarnar í 3. flokki. Hetta innibar ávísa óvissu, tá úrslitini hjá aldursbólkunum báðum vórðu samanborin. Eg royndi sum heild at gera spurningarnar greiðar og eintýddar, men nakrir spurningar kunnu tó misskiljast. Tað slepst ongantíð heilt undan hesum. Tann serliga avbjóðingin í júst hesari kanningini er, at evnini, sum vórðu tikin upp til kjaks, kunnu sigast at hóska betri til kvalitativar (t.d. samrøður og eygleiðingar) enn kvantitativar kanningar. Tá spurt verður um virði, meiningar, ynski o.s.fr. er mest vanligt at brúka kvalitativ háttaløg, tó ikki altíð. Og tað krevst eitt serligt hugflog at fáa fatur í somu upplýsingar við at brúka kvantitativ háttaløg, har heimildarfólkið einans settur krossar á blað. Her er tað sera týðandi at geva persónunum svarmøgulleikar, ið fevna um flestøll møgulig sjónarmið og virði.

Aðrir vanligir trupulleikar, ið granskarar mugu taka hædd fyri, tá teir gera spurnarkanningar, eru knýttir at hesum spurningum: skilir svar-persónurin spurningarnar? Hvussu lætt er at misskilja spurningarnar? Tulkar persónurin orð/hugtøk á sama hátt sum eg? Hvussu ”reinlynt” er svar hansara? Svarar persónurin eftir bestu sannføring? Hví svarar persónurin ikki øllum spurningunum? Í kanningini hjá mær sæst, at sera nógv heimildarfólk brúka svarmøguleikan ”eg veit ikki” til ávísar spurningar, og tað kann skapa eitt sindur av ørkymlan. Eisini eru nógvir persónar, ið ikki rættiliga skilja skipanina, tá teir skulu raðfesta og velja 1., 2. og 3. val. Í spurnarblaðnum (serliga í útgávuni til næmingarnar úr framhaldsdeildini) er nógvastaðni pláss til viðmerkingar til svarini, ið persónarnir hava krossað av. Hendan møguleikan hava nógv tikið í nýtslu fyri at grundgeva fyri sínum svari.

Tað eru nógv onnur meira sosial og sálarfrøðilig viðurskifti, ið kunnu ávirka úrslitini í eini spurnarkanning millum børn. Her hugsi eg serliga um umhvørvið og tíðina, ið ávirkar persónarnar, meðan teir luttaka í kanningini. Hava tey nóg nógva tíð at svara øllum spurningunum? Kenna tey seg trygg og anonym í kanningini? Vita tey yvirhøvur, hvat endamál kanningin hevur? Svara tey hvør sær ella í bólkum? Hesir spurningarnir eru ein sera týðandi partur av fyrireikingararbeiðinum, ið fer fram, áðrenn kanningin skal gjøgnumførast. Tá talan er um børn undir 18 ár, er eyðsæð eisini umráðandi at kunna øll foreldur um verkætlanina fyri at fáa góðkenning at geva børnunum spurnarblað í skúlatíðini. Bæði foreldur og skúlamyndugleikar skulu kenna til verkætlanina í góðari tíð. Ongin er tvungin at taka lut í verkætlanini. Í mínari kanning fingu skúlarnir greið boð um, at børnini skuldu svara hvør sær, uttan at ávirka hvønn annan. Viðvíkjandi tíðarkarminum, ið krevst fyri at svara spurningunum nágreiniliga, so

var hetta testað frammanundan. Ein friðarligur skúladagur tá næmingar ikki fyrireika seg til próvtøkur ella líknandi varð valdur til kanningina. Lutfalsliga fáir næmingar vóru ikki í skúla, tá kanningin fór fram.

Føroyar eru eitt lítið og tætt samfelag, har sosiala og mentanarliga fjølbroytnið í fólkinum tykist vera meira avmarkað enn í nógvum stórum samansettum londum. Eisini er trupult at vera heilt anonymur í føroyskum granskingarverkætlanum, tí vit eru so fáment. Harvið er ofta lutfalsliga skjótt at gita sær til hvør, ið krógvar seg aftanfyri úrslitini. Í mínari kanning havi eg, m.a. av hesum nevndu orsøkunum, valt ikki at leggja nógva orku í at samanbera landslutir, bygdir og skúlar. Endamálið er sum so ikki at avdúka landafrøðiligar munir, hóast hetta viðhvørt kann geva áhugaverdar upplýsingar, t.d. um munin á bygd og bý, miðdepil og útjaðara. Munirnir á kynunum er heldur ikki í brennideplinum í kanningini hjá mær, hóast gentur og dreingir ofta hava ymsar meiningar um mentanrlig og sosial viðurskifti. Kanningin, ið her fyriliggur, roynir at lýsa nøkur høvuðsrák í samfelagnum og fer ikki niður í smálutir. Sum áðurnevnt, so er kanningin meira at kalla ein pilotkanning, ið skal tekna eitt kort yvir eitt landslag, sum vit ikki reiðiliga kenna í løtuni…

Tann síðsti, men ikki minni týðandi parturin av arbeiðsgongdini er, tá spurnarkanningin er av og úrslitini skulu savnast saman, tulkast og greinast, mynstur og rák lýsast, og niðurstøður orðast. Her skulu hypotesur og høvuðsspurningar fáa svar, váttast ella avsannast, og ástøði knýtast til ”veruleikan” hjá børnunum og ungdóminum. Og hetta granskingararbeiðið kann einans eydnast væl, um spurningarnir, ið næmingarnir skuldu taka støðu til, vóru viðkomandi, greiðir og neyvir.

### *[1.3] Børn*

Børn og barnamentan er eitt stórt granskingarevni, ið umfatar nógvar ymiskar vísindagreinir – sálarfrøði, námsfrøði, sosiologi, antropologi, søgu, lívfrøði o.s.fr. Hugtakið barn hevur eisini broytt innihald ígjøgnum øldirnar. Í Evropa vóru børn t.d. samanborin við einglar í 17. øld. Í miðøldini vóru børnini harafurímóti sæð sum "ónd" og vandamikil menniskju, ið ikki vóru verulig menniskju. Eisini hava søgufrøðingar sagt, at børn ofta vóru roknað sum "miniatur-vaksin" í miðøldini. Tey høvdu sostatt ongan sjálvstøðugan status sum samfelagsbólkur. Tey høvdu ongi serrættindi og skuldu arbeiða saman við vaksnum. Tað var ofta eitt hart lív at vera barn. Kensluliga sambandið børn-foreldur, ið hevur verið hálovað í allari 20. øld, var als ikki at hóma í miðøldini. Barnaspæl var heldur ikki nakað, ið hevði nakað serligt virði í samfelagnum. Barnaspæl kundi vera okkurt slag av arbeiði, ið børn gjørdu. Jean-Jacques Rousseau, franski heimspekingurin, lýsti í 18. øld barnið sum eina villa plantu, sum foreldrini skuldu tryggja ein góðan vøkstur. Barnið var eitt óskrivað blað, ið tey vaksnu kundu skapa nakað gott burturúr. Annars var barnið onki. Uppgávan hjá teimum vaksnu verður í 19. øld at royna at legggja vakrar "sannar" lærusetningar í barnið. Barnauppaling og skúlagongd verða í alt størri mun nakað, fólk fara at hugsa og tosa um í seinnu helvt av 19. øld.

Um aldarskiftið fyri hundrað árum síðani varð nógv áhugavert skrivað og sagt um børn og uppaling, um skúla og heim, og fleiri týðandi granskarar royndu at fáa stovnar, ið tóku sær av børnum, at virða børn sum sjálvstøðug skapandi menniskju við rættindum og frælsi. "What the best and wisest parent wants for his own child", segði John Dewey t.d., "that must the community want for all its children". Hugtakið heim varð sera týðandi í kjakinum og skuldi fáa skúlar at skapa eitt umhvørvi, ið kundi sigast at vera "heimligt" og trygt hjá børnunum. Tað ljóðar møguliga sum ein sjálvfylgja í dag, men tað er tað ikki, og var tað enn minni ár 1900. Italski høvundurin og nýskapandi námsfrøðiligi ástøðingurin, Maria Montessori, er kend fyri sína metodu, ið barnagarðar og vøggustovur, skúlar og barnaheim, kring allan heimin hava brúkt sum grundarlag undir síni skipan. Montessori sigur, at skúlin skal vera sum eitt heim, eitt "skúlaheim", ið børnini trívast í og gleða seg at koma til. Einstaklingurin skal skapa sosialar eginleikar og bólkar, ikki øvugt:

> *The child who concentrates is immensily happy; he ignores his neighbors or the visitors circulating about him. For the time being his spirit is like that of a hermit in the desert: a new consciousness has been born in him, that of his own individuality. When he comes out of his concentration, he seems to perceive the world anew as a boundless field for fresh discoveries [...] He becomes friendly to everyone, ready to admire all that is beautiful. The spiritual process is plain: he detaches himself from the world in order to attain the power to unite himself with it (Montessori)*

Í seinnu helvt av 20. øld fáa vit modernaða vælferðarsamfelagið, ið hevur kjarnarfamiljuna sum grundarstein. Sambandið millum foreldur og børn verður í alt størri mun eyðkent av javnstøðu og javnrættindum. Børnini hava fingið rættindi og skulu takast upp á ráð. Í 1989 verður ST-sáttmálin um barnarættindi samtyktur. Sáttmálin hevur stóran týdning í altjóða høpi og skal tryggja børnum og ungdómum rætt til mat, heilsu, heim, skúla,

spæl, upplýsing, verju ímóti kríggi, harðskapi og misnýtslu o.s.fr. Barnið fær virðing og sjálvstøðugan status í samfelagnum. ST-sáttmálin tryggjar barninum, plantuni (Jean-Jacques Rousseau), bestu vakstrarlíkindini. Børn er sum heild lutfalsliga fræls í dag. Tey hava avirkan.

Spæl er, sum kunnugt, sera týðandi táttur í barnalívinum. Og barnaspølini eru nógv broytt síðstu hundrað árini. Marius Johannesen (føddur í 1905) sigur t.d. í bókini hjá sær Føroysk barnaspøl: "...tað var ongin, sum hevði gjørt okkum spæliplássini uttan Várharra. Tey funnu vit í túninum, á bønum, í áunum, í fjøruni, uttan fyri garðarnar og alla staðni, har sum barnafótur fekk stigið og slapp at stíga". Í fyrru helvt av 20. øld gingu børnini í Føroyum ikki á dagsstovnum og flestu mammur teirra vóru heimagangandi. Barnaspølini eru ymisk, tað veldst um tíð og stað. Spælið er tengt at umhvørvinum ið barnið býr í. Á bygd hava børn altíð spælt nógv úti í náttúruni. Ofta hevur spælið eisini tilknýti til arbeiðið í tí gamla bygda-samfelagnum. Børnini kenna til fjallgongu, fletting, hoygging, útróður, og tey spæla spøl úti í sama náttúruumhvørvi. Tey fiska í ánni, tey fletta seyðabein, tey spæla við kjálkamuur o.s.fr. Fyrr var vanligt at allir aldursbólkar av børnum og ungdómum spældu saman. Tað mesta gekk fyri seg uttandura. Tað mesta var uttan vegleiðing ella stýring frá foreldrum. Hetta er broytt nógv, hóast nøkur gomul føroysk barnaspøl liva enn.

Umfatandi institutionaliseringina av barnatilveruni fingu vit lutfalsliga seint til Føroya, og tað eru framvegis fólk og bólkar í samfelagnum við sterkari mistrúgv til uppgávurnar og leiklutirnar hjá (útbúnum) barnanámsfrøðingum í modernaða føroyska samfelagnum, tí institutionaliseringin, hevda atfinnandi røddir, ger familjueindina veika og hóttir sterku samfelagstign hennara – ikki minst í mun til barnauppaling. Heim og familja umboða framvegis nøkur av sterkastu súmbolunum fyri samleika og mentan føroyinga.

## *[1.4] Ungdómur*

Fyrstu ferð ung av álvara nágreiniliga verða lýst sum samfelagsbólkur er í bókini *Émile* hjá franska spekinginum Rousseau, ið kom út í 1762. Bókin lýsir uppalingina av børnum úr borgarastættini og nemur við evni sum átrúnað og moral. Bókin er ikki vísindaligt verk, men heldur eitt slag av vegleiðing til familjur um, hvussu børn eiga at uppalast til góðar borgarar. Rousseau sigur, at lykilin til veruligt frælsi liggur í at varnast, hvussu stóran týdning samfelagið hevur fyri menningina av menniskjum. Barndómurin er, sigur Rousseau, hægsta blómingartíð lívsins. Barnið skal uppalast í frælsi og læra av egnum royndum.

Ungdómsmentan er eitt stórt granskingarøki í samfelagsvísindum kring heimin. Og tað sær ikki út til at áhugin fyri gransking av ungdómi og ungdómsmentan fer at minka komandi tíðina. Hóast nógv hevur verið skrivað og sagt um ungdómsmentan, so er talan um eitt rættiliga nýtt tema í antropologiini. Í bókini *Youth Cultures* sigur Amit-Talai:

> *"If anthropology is the study of humankind, why has it dealt mostly with men, to an increasingly extent with women, to some degree with children, and old people, but very little with youth as a subject matter? Perhaps, like many other adults, anthropologists view youth as not to be taken very seriously: occasionally amusing, yet potentially dangerous and disturbing, in a liminal phase"*

Ungdómurin er ikki til at "stýra", tí foreldrini og skúlin eru bara tveir av fleiri lærarum hansara. Útlendskar sjónvarpsstøðir, alnetið, teldubrøv, fartelefonir og annað innan nýggju samskiftistøknina, hava givið ungdóminum høvi sjálvur at avgera hvørja vitan hann nemur sær. Ungdómurin, velur í stóran mun sjálvur sín samleika og sína mentan Tað er ongin, ið krevur at ein drongur skal fylgja í fótasporunum hjá pápa sínum viðvíkjandi yrkisleið og lívsstíli.

Tá tosað verður um ungdóm, stinga trupulleikarnir seg eisini upp, tí ongin greið semja er um, hvussu bólkurin skal allýsast – hvat er ungdómur fyri nakað? Haraftrat er torført at býta ungdómin sundur í lutmentanir ella aðrar avmarkaðar bólkar – hvørjir munir eru á føroyskum ungdómi? Ungdómur er ein rættiliga flótandi kategori, ið kann lýsast upp á nógvar mátar. Nógvar allýsingar eru av ungdómi, eftirsum kategoriin kann lýsast úr antropologiskum, sálarfrøðiligum, lívfrøðiligum og fleiri øðrum sjónarmiðum, tí ungdómsgranskingin er tvørfaklig í víðastu merking. Ungdómurin er kategori, ið veksur og minkar, flytist og rørist, alt eftir hvussu vit allýsa børn og vaksin, tí ungdómurin er eitt slag av buffara ímillum børn og vaksin.

Ungdómstíðin kann síggjast sum tíðin, tá tær stóru avgerðirnar skulu takast. Hendan allýsingin er knýtt at teimum stóru samfelagsbroytingunum, sum hava verið í Evropa seinastu 20 árini. Talan er um fyribrigdið, ið týski Thomas Ziehe kallar "mentanarliga fríseting" og bretski Anthony Giddens kallar skiftið til "seinmodernitetin".

*"Moderne mennesker er tendentielt og ideologisk frigjort fra bindinger til sted, stand, slægt, religion og til dels fra køn – fra alle de instanser der i traditionelle samfund medvirker til at adfærd, normer og holdninger bliver ens og fasttømrede fra generation til generation indenfor den enkelte klasse eller gruppe og indenfor hvert af kønnene. Tidligere var den enkelte langt mere fastlåst, de fleste kunne regne med at følge i deres forældres spor, kulturelt, socialt og arbejdsmæssigt"* (Illeris et al 2002)

Granskingin hjá sosiologinum Giddens umboðar áhugaverd ástøði til gransking av modernaðum viðurskiftum í einum seinmodernaðum samfelag. Giddens hevur granskað hugtøk sum modernitet, samleika, og mentan. Giddens sigur, at fólk velja sínar gerðir strategiskt og royna alt tey kunnu at fáa tað so gott sum gjørligt. Men samstundis sigur hann, so eru vit øll undir sterkum trýsti, tá vit velja sum vit gera; trýstið (ymist millum fólk, samfeløg og kontekstir) avmarkar okkara møguleikar at velja. Tann sosiali strukturin er, sigur Giddens, bæði fortreytin fyri at gerðir eru møguligar og, samstundis, tað sama sum allar gerðir tilsamans. Hetta kallar hann fyri "duality of structure". Mótsetningurin millum tað individuella og tað samfelagsliga sjónarmiðið verður upploystur í struktureringsástøðinum hjá Giddens.

Ástøðið hjá Giddens kann brúkast til at kanna hvønn leiklut fjarsamskifti, foreldur og skúli hava fyri ungdómsmentanirnar; hvussu nógv hesi ávirka ungdómin. Ungdómurin er ein kollektivur aktørur, ið eisini ávirkar umhvørvið sítt. Ávirkanin gongur báðar vegir. Modernaða menniskjað er, sambært Giddens, eitt refleksivt menniskja, sum alla tíðina ognar sær nýggja vitan, og sum nýtir hesa vitan (og hesar royndir) sum grundarlag og útgangsstøði fyri framhaldandi gerðum sínum (*actions*). Vit liva í einum heimi, har vandin fyri, at úrslitini av okkara gerðum ikki verða sum vit høvdu roknað við, alla tíðina spøkir. Hvussu ávirkar hetta okkara samleika og lívsstíl? Í bókini *Modernity and Self-identity* roynir Giddens at forklára, hvussu samleikin hjá tí modernaða individinum formast. Giddens (1991) sigur at

*"[s]elvets refleksive projekt, som består i at opretholde sammenhængende, men konstant reviderede biografiske fortællinger, finder sted i en kontekst af mangfoldige valgmuligheder, der filtreres gennem abstrakte systemer [...] Jo mere traditionen mister sit tag, og jo mere dagliglivet rekonstitueres på baggrund af det dialektiske samspil mellem det lokale og det globale, desto mere tvinges individerne at træffe valg om livsstil blandt mange forskellige muligheder"*

Hugsjónir, skikkir og siðvenja missa so hvørt sítt virði, sigur Ziehe, tá fólk verða frígjørd frá bindingum, ið plagdu at stýra tilveruni. Modernað menniskju eru, ideologiskt sæð, ikki bundin at staði, stætt, ætt, átrúnaði ella nøkrum øðrum, slær Ziehe fast. Fyrr vórðu menniskju stýrd av siðvenju og roknaðu við at fylgja í fótasporunum hjá foreldrunum – mentanarliga, sosialt og átrúnaðarliga. Vit vita tó, at fólk í veruleikanum ikki eru so fræls frá sosiala og mentanarliga umhvørvi teirra, sum Ziehe vil vera við.

Ungdómurin í Føroyum livir í einum framkomnum og miðlaríkum samfelagi, ið, hóast eg havi kallað tað seinmodernað við Giddens´ í huganum, má sigast at vera í skiftistíð (broytingartíð), har nógv áhugamál, virði og sjónarmið stoyta saman. Vitanin um ungdómsmentan í Føroyum er avmarkað, og haraftrat verður hon sera skjótt afturúrsigld, tí mentanin og stílarnir hjá børnum og ungdómum broytast ár undan ári.

## [2] Úrslit – 3. flokkur

Tey flestu børnini úr 3. flokki vóru 9-ára gomul tá spurnarkanningin fór fram. Ein lítil minniluti var tó longu fyltur 10 ár. Í hesum aldri hava børnini lært at lesa og eru í fer við at læra at skriva føroyskt. Talan er um áhugavert skeið í lívinum, har tey flestu børnini í frítíðini eru virkin í ymsum bólkum við fjølbroyttum virksemi.

**Talva 1. Aldur**

| | N | % |
|---|---|---|
| 9 ár | 90 | 81.1 |
| 10 ár | 18 | 16.2 |
| ógreitt | 3 | 2.7 |
| | | |
| Íalt | 111 | 100 |

Landafrøðiliga myndin vísir, at børnini í kanningini búgva kring alt landið. Tey búgva í bygdunum, har skúlarnir, ið er partur av verkæltanini, liggja. Ein útav 5 luttakarum úr 3. flokki býr í Havn, men um argjabørn verða tald við, so býr ein triðingur av luttakarunum í høvuðsstaðnum. Í Klaksvík og Vági búgva ávikavist 15 og 18 prosent. Í Sandavági/Miðvági búgva umleið 12 prosent. Hinar bygdirnar á listanum hava í mesta lagi 7 luttakandi børn. Tey flestu børnini búgva sera tætt við skúlarnar, tó eru undantøk – t.d. býr ein skúlanæmingur á Vatnsoyrum og gongur í Sandavágs/Miðvágs skúla. Tað hevur upp ígjøgnum 20. øld og heilt fram til ídag verið eitt sterkt politiskt mál, at miðspjaða fólkaskúlarnar í Føroyum, so at børn fáa skúlagongd í heimbygdini tey fyrstu skúlaárini. Endamálið hevur verið at lata bygdabørn vaksa upp í heimligum umhvørvi og harvið eisini at skapa framtíðarvónir fyri smáu samfeløgini í útjaðaranum. Kjakið um føroyska skúlan í dag nertir við hesa ”siðvenju” innan skúlapolitikk og krevur eina endurskoðan av prinsippinum um at hava sjálvstøðugan fólkaskúla í minstu bygdunum, har børnini einans eru eini 2-6 í tali.

**Talva 2. Bústaður**

| | N | % |
|---|---|---|
| Argir | 14 | 12.6 |
| Eiði | 5 | 4.5 |
| Klaksvík | 17 | 15.3 |
| Miðvágur | 6 | 5.4 |
| Nes, Eysturoy | 4 | 3.6 |
| Saltnes | 1 | 0.9 |
| Sandavágur | 7 | 6.3 |
| Toftir | 7 | 6.3 |
| Tórshavn | 22 | 19.8 |
| Vatnsoyrar | 1 | 0.9 |
| Vágur | 20 | 18.0 |
| Giljanes | 1 | 0.9 |
| Ògreitt/onki svar | 6 | 5.4 |
| | | |
| Íalt | 111 | 100 |

Tey flestu børnini úr 3. flokki í kanningini hava búð í Føroyum alt lívið. Einans *ein* persónur svaraði, at hann hevur búð í landinum í minni enn 3 ár. Óvist er tó, hvussu nógv, ið hava roynt at búð uttanlands í styttri tíðarskeið, tí tað kemur ikki fram í spurningunum. 9 børn svaraðu ”eg veit ikki” ella geva onki svar.

**Talva 3. Hvussu leingi hevur tú búð í Føroyum?**

| | N | % |
|---|---|---|
| 1-3 ár | 1 | 0.9 |
| Meira enn 3 ár | 101 | 91.0 |
| Eg veit ikki | 4 | 3.6 |
| Ógreitt/onki svar | 5 | 4.5 |
| | | |
| Íalt | 111 | 100 |

Tey flestu børnini hava eisini, ikki óvæntað, búð á sama stað seinastu 3 árini. Einans 3 persónar eru fluttir seinasta árið. Haraftrat hava 6 børn skift bústað, síðan tey byrjaðu at ganga í skúla. Heili 12 børn hava ikki givið nakað greitt svar í hesum spurningi.

**Talva 4.Hvussu leingi hevur tú búð her í bygdini/býnum?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Undir 1 ár | 3 | 2.7 |
| 1-3 ár | 6 | 5.4 |
| Meira enn 3 ár | 89 | 80.2 |
| Eg veit ikki | 8 | 7.2 |
| Ógreitt/onki svar | 5 | 4.5 |
| | | |
| íalt | 111 | 100 |

Ein stórur meirluti av børnunum trívast sera væl á plássinum, har tey búgva. Einans 3 børn trívast beinleiðis illa á heimstaðnum. Næstan 90 prosent dáma væl ella sera væl at búgva har, tey búgva. Børnini hava ofta sterk sosial- og familjubond til lokalsamfelagið og kenna seg trygg og væl stuðlað í tí heimliga umhvørvinum. Tey hava ofta stór familjunetverk, ið geva teimum ein sterkan samleika og ein greiðan status í lokalsamfelagnum. Við øðrum orðum kunnu vit siga, at meirlutin av børnunum hevur eina lutfalsliga góða tilveru á heimstaðnum, ið gevur teimum alt, ið teimum tørvar í gerandisdegnum.

Tó eu eyðsæð altíð undantøk. Og tey, ið møguliga mistrívast í lokalsamfelagnum, mangla ofta alt tað, ið onnur børn gleðast yvir at eiga – t.d. eina familjueind, ið stuðlar og verjir tey yngstu. At vera ”øðrvísi” enn hini børnini, t.d. vegna mentanarliga ella sosiala bakgrund, kann elva til at børn kenna seg avbyrgd uttan viðurkenning frá umhvørvinum, tey búgva í.

**Talva 5. Dámar tær at búgva her?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Sera væl | 75 | 67.6 |
| Væl | 23 | 20.7 |
| Ikki so væl | 3 | 2.7 |
| Illa | 3 | 2.7 |
| Eg veit ikki | 4 | 3.6 |
| ógreitt/onki svar | 3 | 2.7 |
| | | |
| íalt | 111 | 100 |




Spurd um framtíðina hjá tær, eru børnini eitt sindur meira ivasom viðvíkjandi bústaði. Ilt er sjálvandi at spáa um, hvar vaksnamannalívið fer at verða livað, tá ein er 9-ára gamal. Meira enn helvtin av børnunum svara, at tey ikki vita, um tey vilja vera verandi á sama staði sum vaksin. Tey flestu kenna væl til onnur pláss, gjøgnum familju og vinir, og hava als ikki avgjørt, hvørja leið tey seinni í lívinum skulu velja.

**Talva 6. Vilt tú gjarna búgva her tá tú verður vaksin?**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Ja** | **34** | **30.6** |
| **Nei** | **13** | **11.7** |
| **Eg veit ikki** | **61** | **55.0** |
| **Ògreitt/onki svar** | **3** | **2.7** |
| | | |
| **Íalt** | **111** | **100** |

Teimum flestu børnunum dámar væl at ganga í skúla. Umleið 70 prosent av børnunum dáma væl ella sera væl at ganga í skúla. Einans 5 persónar í kanningini dáma illa at ganga í skúla. Tá børnini eru í skúla á 3. ári trívast tey flestu og gleða seg at sleppa í skúla gerandismorgnar. Tey flestu børnini eru hugagóð og taka stór fet fram í læringstilgongdini og sosialu menningini. Tey flestu virða skúlan og lærararnar hjá sær og uppliva nógv spennandi innan skúlagátt. Í 3. flokki er skúlin haraftrat minni spæl og meira læring enn tey fyrstu skúlaárini. Børnini eru ikki longur yngst í skúlanum og megna at skriva og lesa – og at luttaka í spurnarkanningum!

**Talva 7. Dámar tær væl at ganga í skúla?**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Sera væl** | **31** | **27.9** |
| **Væl** | **46** | **41.4** |
| **Ikki so væl** | **21** | **18.9** |
| **Illa** | **5** | **4.5** |
| **Eg veit ikki** | **4** | **3.6** |
| **Ógreitt/onki svar** | **4** | **3.6** |
| | | |
| **íalt** | **111** | **100** |

Ítrótturin er sera týðandi hjá føroyskum børnum og ungdómum tá tosað verður um frítíðarlív. Tey flestu, 70 prosent, ganga til ítrótt. Nógv annað er tó eisini á skránni í frítíðini hjá børnunum. Útboðið av skipaðum frítíðarvirksemi er sera ójavnt í landinum. Í smáum bygdum í útjaðaranum er lítið í at velja hjá teimum ungu. Tað merkir tó ikki, at børnini á hesum plássum ikki hava áhugamál ella ítriv í frítíðini. Børnini noyðast tó ofta at brúka sítt hugflog til sjálvi at "fylla" frítíðina hjá sær við spæli og øðrum virksemi. Tað merkir, at frítíðin verður meira óformell – uttan feløg og venjingartíðir – og ófyrireikað. Í høvuðsstaðnum búgva sera nógv børn, og her er útboðið av skipaðum frítíðarvirksemi eyðsæð rættiliga stórt og fjølbroytt. Men tað eru ikki øll børn, sum ynskja ella sleppa at ganga til skipað frítíðarvirksemi við føstum karmum. Hugtakið *frítíð* verður her allýst sum tað, ið gongur fyri seg, tá fólk hava frí frá skúla, arbeiði, og øðrum skyldum; frítíð merkir her frælsi frá øðrum skyldum og uppgávum. Nógv frítíðarvirksemi er handilsligt, inniber peninganýtslu og er sostatt knýtt at brúkaramentanini.

**Talva 8. Gongur tú til ítrótt?**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Ja** | **78** | **70.3** |
| **Nei** | **30** | **27.0** |
| **Ógreitt** | **3** | **2.7** |
| | | |
| **íalt** | **111** | **100** |

Átrúnaður og átrúnaðarligir felagsskapir fylla nógv í frítíðini hjá lutfalsliga nógvum børnum í landinum. Nógv børn eru úr familjum við tøttum tilknýti til kristnar samkomur, og hesi hava frá barnsbeini av gingið á møti saman við sínum nærmastu. Átrúnaður er soleiðis ein týðandi partur av samleikanum hjá nógvum, og samkomurnar gera nógv burtur úr barna- og ungdómsarbeiðinum. 37 útav 111 børnum ganga regluliga á møti. Smáar bygdir hava viðhvørt einans samkomurnar og ítróttarfeløgini at bjóða børnum; harvið er valmøguleikin ræettiliga avmarkaður viðvíkjandi frítíðarlívinum. Við øðrum orðum er eitt ”tómrúm”, ið rakar børnini, sum ikki fylgja høvuðsstreyminum innan frítíðarvirksemi í Føroyum.

Tónleikur og sangur er eisini partur av gerandisdegnum hjá nógvum børnum. Hetta er ein týðandi partur av mentanarlívinum hjá føroyingum í øllum aldrum. Í mun til fólkatalið í landinum, so hava Føroyar ómetaliga nógvar virknar tónleikarar og tónleikabólkar. Tónleikalívið er ríkt og líka blómandi á bygd sum í bý. 13 børn ganga til dans. Her er talan bæði um føroyskan og modernaðan dans. 10 børn í kanningini ganga ikki til nakað. Tað merkir ikki, at tey øll keða seg illa, men at tey møguliga brúka tíðina á annan hátt – eina ella saman við familju og vinfólki. Tað kann t.d. vera børn, sum spæla á telduni og á alnetinum.

**Talva 9. Frítíð – gongur tú til...?**

| | Ja | Nei | Ógreitt | N |
|---|---|---|---|---|
| **Sang** | 26 | 83 | 3 | 111 |
| **Møti** | 37 | 71 | 3 | 111 |
| **Sjónleik** | 4 | 103 | 4 | 111 |
| **Dans** | 13 | 95 | 3 | 111 |
| **Skóta** | 12 | 96 | 3 | 111 |
| **Annað** | 27 | 81 | 3 | 111 |
| **Onki** | 10 | 98 | 3 | 111 |

Vit hava lyndi til at gloyma at spyrja børn og ung hvat, ið tey sakna og halda kundi verið broytt viðvíkjandi mentan og frítíð. Sostatt geva vit teimum ikki møguleikan at koma við ráðum og uppskotum, ið kunnu skapa ein betri trivnað í barnaættarliðnum, óansæð bakgrund og áhugamál. Spurd hvat tey sakna í heimbygdini ella heimbýnum hjá sær, hava børnini nógv at bera fram. T.d. eru 35 børn, ið nevna sjónleik; 22 børn nevna sang ella dans. Eisini innan ítrótt eru viðurskiftini ikki nøktandi allastaðni. Nógvar ítróttargreinar, ið lufalsliga fáir føroyingar íðka og hava áhuga fyri, eru forsømdar samanborið við bóltspøl sum fótbóltur og hondbóltur. Tað eru nakrar fáar ítróttargreinar, ið hava hægstu raðfesting og harvið fáa bestu sømdir. Nakað tað sama er galdandi innan listarligt virksemi – her hava tónleikur og sangur verið sera ráðandi í barna- og ungdómsættarliðnum. Sjónleikur, ið ein triðingur av børnunum sakna, hevur ikki somu tign og raðfesting í Føroyum í løtuni.

Í kjakinum um ítrótt og børn í Føroyum verður ofta nevnt, at ítrótturin gevur góða sálarliga og likamliga heilsu, skapar vinarbond, gevur ógloymandi upplivingar og mangt annað jaligt. Men tað eru ikki øll, sum hava góðar royndir úr ítróttarumhvørvinum. Børn eru ymisk og tað eru ikki øll, ið trívast í einum umhvørvi, ið vanliga grundar á kapping, viðhvørt beinhart stríð, og krevur nógv av einstaklinginum. Sum heild kann sigast, at vanligt ítróttarvirksemi er mennandi fyri børnini, sosialt og likmaligt, men vit mugu ikki gloyma, at nógv annað frítíðarvirksemi er eins forvitnisligt og stuttligt hjá børnum.

**Talva 10. Frítíð – hvat manglar í bygdini/býnum hjá tær..?**

| | Ja | Nei | Ógreitt | N |
|---|---|---|---|---|
| Ítrótt | 14 | 94 | 3 | 111 |
| Sang | 10 | 98 | 3 | 111 |
| Møti | 5 | 103 | 3 | 111 |
| Sjónleik | 35 | 73 | 3 | 111 |
| Dans | 12 | 96 | 3 | 111 |
| Skóti | 4 | 104 | 3 | 111 |
| Annað | 25 | 83 | 3 | 111 |
| Onki | 7 | 101 | 3 | 111 |

Føroysk børn hava fjøltáttað áhugamál. Eitt, ið næstan øll, bæði ung og gomul, brúka í sínum gerandisdegi er nýggja samskiftis- og kunningartøknin. Nýggju miðlarnir verða brúktir til bæði gaman og álvara, hjá børnum tó mest til spæl og frítíð. Á talvu 11 sæst, at telduspøl og sjónvarp standa ovast á listanum yvir tí, sum børnini dáma at brúka frítíðina til. Áhugavert er eisini at síggja, at "gomul" áhugamál, ið ikki krevja nýggja tøkni, standa seg væl í okkara seinmodernaðu tíðum. Tað er hugaligt at síggja, at sera nógv dáma at súkkla og ganga túrar í frítíðini. Næstan helvtin dámar væl at fiska, og tað er nógv meira enn aðrar líknandi spurnarkanningar hava víst. At lesa og vitja bókasøvn hevur ikki serliga stóran áhuga ímillum børn. Her veldst tó nógv um hvar børnini búgva, tí øll hava ikki atgongd til alment bókasavn á heimstaðnum hjá sær. Ein drongur skrivaði eisini, at hann samlar upp á "fótbóltskort".

**Talva 11. Hvat annað dámar tær at gera í frítíðini?**

| | Ja | nei | ógreitt | N |
|---|---|---|---|---|
| Ganga túrar | 47 | 61 | 3 | 111 |
| Súkkla | 66 | 42 | 3 | 111 |
| Fiska | 47 | 61 | 3 | 111 |
| Spæla telduspøl | 69 | 37 | 5 | 111 |
| Hyggja í sjónvarp | 65 | 42 | 4 | 111 |
| Lurta eftir tónleiki | 54 | 54 | 3 | 111 |
| Fara á bókasavn | 28 | 80 | 3 | 111 |
| Lesa | 35 | 73 | 3 | 111 |
| Tekna | 61 | 46 | 4 | 111 |
| Skateboarda | 22 | 86 | 3 | 111 |
| Annað | 46 | 62 | 3 | 111 |
| Onki | 2 | 106 | 3 | 111 |

Keðsemi er ein natúligur partur av lívinum hjá flestøllum menniskjum. At keða seg er ikki nakað vandamikið og neiligt í sær sjálvum. Viðhvørt kann tað vera gott at fáa eina hart tiltrongda fríløtu, eitt ”tómrúm”, uttan serligar uppgávur og skyldur, har ein onki ger, ið er vert at nevna. Ofta er gerandisdagurin tættpakkaður við avtalum, ið binda persónar í tíði og rúmi. Ov nógvar uppgávur skapar bundinskap, ið í ringasta føri kann elva til strongd. Nógv børn líða av strongd í dag, eisini í Føroyum, og orsøkin er m.a. at finna í øllum krøvunum, vit seta teimum yngstu. Tað er týðandi at fáa frið viðhvørt. Umleið 40 prosent av børnunum keða seg viðhvørt eftir skúlatíð. 34 prosent siga seg ikki keða seg í gerandisdegnum.

**Talva 12. Keðir tú teg viðhvørt tá tú kemur heim úr skúla?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Ja | 44 | 39.6 |
| Nei | 38 | 34.2 |
| Eg veit ikki | 20 | 18.0 |
| Ógreitt/onki svar | 9 | 8.1 |
| | | |
| Íalt | 111 | 100 |

Í talvu 13 sæst at helvtin av børnunum í 3. flokki halda at børn sum heild trívast væl í lokalsamfelagnum. Í talvu 5 kom, sum áður nevnt, fram, at ein stórur meirluti av børnunum dámar væl í heimbygdini ella heimbýnum hjá sær. Harvið má sigast, at myndin er minni bjørt, tá børnini úttala seg um barnaættarliðið sum heild. Børnini eru í iva. Tey hava ilt við at døma um støðuna hjá øðrum børnum, og tað er lætt at skilja. Einans 4 børn siga beinleiðis, at børn ikki trívast í heimbygdini ella heimbýnum hjá sær. 47 børn, tað svarar til 42 prosent, vita ikki um øll hava tað gott.

Hvat fyri nágreinilig viðurskifti, ið børnini høvdu í tonkunum tá tey svaraðu spurninginum, vita vit ikki. Hugtakið trivnaður kann tulkast á ymsar hættir. Í hvussu stóran mun ávirkar sosiala umhvørvið trivnaðin? Ella familjan? Ella forbrúkið? Børn í 9 -10 ára aldri eru sjáldan tilvitað um sosialar og mentanarligar umstøður, ið ofta ávirka trivnaðin hjá einstaklinginum.

**Talva 13. Heldur tú at børn hava tað gott og trívast í bygdini/býnum hjá tær?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Ja | 56 | 50.5 |
| Nei | 4 | 3.6 |
| Veit ikki | 47 | 42.3 |
| Ógreitt/onki svar | 4 | 3.6 |
| | | |
| Íalt | 111 | 100 |




Í talvu 14 sæst at børnini dáma væl at spæla við vinir og at vera úti. Einans 8 børn vilja heldur spæla einsamøll. Tey flestu børnini velja heldur at spæla við vinum sínum úti enn heima. 56 børn vilja helst vera saman við vinum úti. Spurningurin er so, hvussu nógv børnini velja av egnum "fríum" vilja og hvussu nógv er ávirkað av tí sosiala umhvørvinum, ið tey liva í. Tað er eitt sindur ógreitt. Nøkur børn hava nógv vinfólk, onnur hava ongi vinfólk. Í 9-10 ára aldri er bólkarnir ikki serliga neyvt avmarkaðir. Sterku bólkaeindirnar, ið eyðkenna ungdómslívið, hava ikki fingið skap enn. Nøkur børn spæla altíð saman, skapa ein kjarna, men nógv børn hava lutfalsliga leys vinarbond, ið ikki skapa nakran stabilan vinarbólk, tá tey ganga í 3. flokki.

Um vit hava børn, ið veruliga ynskja at spæla eina, í huga, so er ongin einføld forklároing, ið liggur til grund fyri hesi avgerð. Nøkur børn kenna fá fólk uttan fyri heimið, tí at tey eru tilflytarar, hoyra til ein átrúnaðarligum ella mentanarligum minniluta, eru úr familju við sera tungum sosialum trupulleikum, eru menningartarnað, o.s.fr. Orsøkirnar kunnu vera mangar. Onnur børn hava ein sterkan sosialan kapital, men dáma best at vera einsamøll í frítíðini, tí tey hava ítriv sum t.d. at tekna, mála, lesa. Talan kann eisini vera um børn, ið eru stórnýtarar av elektroniskum miðlum og samskifta við "vinir" umvegis teldur í heiminum. Hjá teimum í 9-10 ára aldri eru nýggju miðlarnir tó mest til spæl. Hesi børnini koma ofta úr vælbjargaðum familjum, hóast børnini sosialt kunnu tykjast rættiliga avbyrgd.

**Talva 14. Hvat passar best til tín av hesum?**

| | N | % |
|---|---|---|
| At vera heima og spæla einsamallur | 3 | 2.7 |
| At vera úti og spæla einsamallur | 5 | 4.5 |
| At vera saman við vinum heima | 27 | 24.3 |
| At vera saman vera saman við vinum úti | 56 | 50.5 |
| Eg veit ikki | 14 | 12.6 |
| Ògreitt | 6 | 5.4 |
| | | |
| Íalt | 111 | 100 |

Í talvu 15 sæst, hvørjar raðfestingar børnini gera, tá einans 3 høvuðsevni eru at velja ímillum. Er tað ítrótturin ella listin ella teldurnar, ið er mest lokkandi hjá børnunum? Ítótturin umboðar her likamliga virksemið, ið vanliga inniber bólkar (feløg) og kapping. Listin er her eitt meira individuelt, óformelt og skapandi ítriv. Og teldurnar umboða hátøknilig spøl, ið kunnu vera bæði mennandi og spillandi. Teldurnar kunnu eisini sigast at umboða eitt partvís skapandi virksemi, eisini í mun til læringsprosessir, men innan fyri nakrar smalar talgildar karmar.

Hesi 3 evnini eru eisini ymisk í mun til fíggjarligu útreiðslurnar, ið eru knýttar at virkseminum. Hvat kostar tað at vera limur í einum felag? Hvat kostar útgerðin, sum børnini skulu ogna sær? Hvat kosta ferðir o.l. í sambandi við frítíðarítrivið hjá børnunum? Hóast tey flestu børnini í Føroyum hava foreldur, ið hava ráð til at senda børnini út í frítíðarvirksemi av alskyns slag, so eru tað eisini børn, ið av fíggjarligum orsøkum ikki sleppa at luttaka í skipaðum frítíðarvirksemi. Sostatt er frítíðarlívið hjá børnum í Føroyum í ávísan mun stýrt av sosio-búskaparligu umstøðunum í heiminum.

Børnunum dámar best at íðka ítrótt og luttaka í kappingum, men ikki so fá njóta at spæla spøl o.l. á teldu. Alnetið er sera forvitnisligt hjá børnum, ið longu í 7-8 ára aldri ofta hava lært at ”surfa” á alnetinum og skriva teldubrøv. Umleið 40 prosent av børnunum í 3. flokki dámar best at íðka ítrótt, tá tey skulu velja ímillum áðurnevndu høvuðsøki innan frítíðarlív. 18 børn velja at tekna og mála. 4 børn ”gera onki” í frítíðini hjá sær.

**Talva 15. Hvat passar best til tín av hesum?**

| | N | % |
|---|---|---|
| At íðka ítrótt og luttaka í kappingum | 44 | 39.6 |
| At tekna og mála | 18 | 16.2 |
| At brúka teldu til spøl og annað | 25 | 22.5 |
| At onki gera | 4 | 3.6 |
| Eg veit ikki | 16 | 14.4 |
| Ógreitt | 4 | 3.6 |
| | | |
| Íalt | 111 | 100 |

Kann tað sigast, at fólk eru vanabundin longu í barnaárum? Ella søkja fólk altíð eftir nýggjum upplivingum? Í talvu 16 sæst, at børnum flest dámar at læra nakað nýtt. Hetta er ikki nakað óvæntað úrslit, men vert er at kanna nærri hvat, ið hetta sigur um børnini og samfelagið, tey liva í. Hvussu nógv hava børnini í grundini hugsa um orðini og virðini, áðrenn tey hava givið sítt svar? Tað er ongin loyna, at í seinmodernitetinum eru ”vanar”, ”siðvenjur” og ”tað gamla” ikki høgt í metum. Børn og ung fáa sera tíðliga at vita, at tey skulu hugsa um at ”mennast”, at ”skapa”, at ”søkja avbjóðingar”, at ”finna nýggjar loysnir” o.s.fr. Longu í 7-8 ára aldri hava børn í dag hoyrt og lært nógv um hesi virði, ið seta spor í umhvørvinum, ið tey kenna. 60 børn í kanningini vilja helst læra nakað nýtt, meðan 26 dáma best at gera tað, tey eru von at gera. Restin, 25 persónar, vita ikki ella hava ikki svarað spurninginum. Óansæð, úr einum lærings-sjónarhorni eru úrslitini sera gleðilig og boða frá góðum fyri framtíð Føroya.

**Talva 16. Hvat passar best tin tín av hesum?**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Mær dámar best at læra nakað nýtt** | **60** | **54.1** |
| **Mær dámar best at gera tað, sum eg eri vanur at gera** | **26** | **23.4** |
| **Eg veit ikki** | **20** | **18.0** |
| **Ógreitt** | **5** | **4.5** |
| | | |
| **Íalt** | **111** | **100** |

Eitt viðkomandi hugtak, ið er ómetaliga torført at allýsa, er ”mentan”. Politikarar, listafólk, lærarar og samfelagsgranskarar hava hvør sína áskoðan um og lýsing av mentan. Ongin semja er um hvar, ið markið millum mentan og ikki-mentan gongur. Hvat halda børn um mentan? Hvat seta tey í samband við lítla orðið mentan, ið skapar so lívligt kjak í samfelagnum annars? Fyri at noyða børnini at geva mær eitt svar, orðaði eg 4 argandi ”mentan er…” svar til spurningin um, hvat mentan er fyri nakað. Tó tók næstan helvtin av børnunum ikki støðu til svarini eg bjóðaði teimum – tey svaraðu ”annað”, ”eg veit ikki” ella als onki. Helst hava nógv teirra verið ónøgd við svarmøguleikarnar og tað er lætt at skilja. Hin helvtin, ið tók eitt val, gav skúlanum hægstu raðfesting. 23 børn søgdu, at mentan er at hava ein góðan skúla, meðan 16 børn knýttu mentan at nýggjum vegum, tunlum og skrivstovum. Skilmarkið millum ”hørð” og ”bleyt” virði í samfelagnum er sostatt kanska ein misskilt heimsmynd hjá vaksnum menniskjum?

**Talva 17. Hvat er "mentan"?**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Mentan er bøkur og málningar** | **7** | **6.3** |
| **Mentan er at hava barna / ungdómsklubbar at fara til** | **12** | **10.8** |
| **Mentan er at hava ein góðan og spennandi skúla** | **23** | **20.7** |
| **Mentan er at byggja nýggjar vegir, tunlar og skrivstovur** | **16** | **14.4** |
| **Annað** | **7** | **6.3** |
| **Eg veit ikki** | **40** | **36.0** |
| **ógreitt** | **6** | **5.4** |
| | | |
| **íalt** | **111** | **100** |

Politikkur snýr seg um raðfestingar. Hvørjar verkætlanir eru mest samfelagsgagnligar? Hvørjar visjónir eru mest viðkomandi? Ein av orsøkunum til at børn og ung ofta verða gloymd í politiskum kjaki í Føroyum er júst tann, at tað, ið viðkemur børn og barnalívi, ikki hevur raðfesting hjá teimum ráðandi í samfelagnum. Sjálvandi eru undantøk, men hetta er heildarmyndin. Veikir bólkar í samfelagnum (m.a. børnini og ungdómurin) mangla umboðsfólk á tí politiska pallinum, og tað sæst aftur í politisku verætlanunum í landinum. Tí er áhugavert, at her taka børnini fram og spyrja, hvussu teirra raðfestingar síggja út. Á sama hátt sum í talvu 17, so havi eg her argandi givið 4 valmøguleikar. Bankar ella skúlar? Parkerinsgøki ella barna/frítíðarklubbar? Úrslitið er ikki óvæntað. Umleið 60 prosent av børnunum raðfesta skúlan og frítíðina hjá børnum hægst. Umleið 14 prosent siga harafturímóti, at vit fyrst skulu hava fleiri parkeringsøki og bankar. Tað mest óvæntaða úrslitið er, meini eg, at næstan 25 prosent av børnunum ikki vita hvat, ið skal hava hægstu raðfesting. Antin eru tey bara óvitandi, sera varin ella sera greinandi í mun til spurningin. Nøkur børn meina kanska, at hetta er ikki nakað børn skulu taka nakra avgerð um. Nøkur børn kenna seg eyðsæð ikki før fyri at taka avgerð um hetta evni.

**Talva 18. Hvat av hesum eigur at verða gjørt fyrst?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Fáa fleiri parkeringspláss | 8 | 7.2 |
| Fáa fleiri bankar | 7 | 6.3 |
| Fáa betir skúlar | 34 | 30.6 |
| Fáa fleiri klubbar til børn | 33 | 29.7 |
| Eg veit ikki | 26 | 23.4 |
| Ógreitt | 3 | 2.7 |
| | | |
| Íalt | 111 | 100 |

Fyri at halda fram í sama spori, havi eg eisini biðið børnini um at ”spæla”, at tey eru politikarar, ið seta dagsskránna í samfelagnum.  Tey fáa *ein* setning, ið tey skulu bera fram. Aftur her eru einans 4 valmøgulleikar. Hvønn setning velja tey sær? Tey flestu børnini , 50 persónar, høvdu sagt, at føroysk børn trívast – men at vit mugu gera nakað fyri at fáa øll at trívast betri. 29 børn høvdu hinvegin sagt: børnini hava tað ikki gott – vit mugu hjálpa teimum og lurta eftir teimum! Og 5 børn høvdu sagt, at tað er líkamikið, hvussu børn hava tað. Úrslitið vísir, at børnini tekna eina javna miðalgóða mynd av trivnaðinum hjá yngru ættarliðunum í landinum í dag. Støðan er lutfalsliga góð, men kundi verið betri.

**Talva 19. Um tú vart politikari, hvat hevði tú sagt?**

| | N | % |
|---|---|---|
| "Børnini hava tað fínt - tað er óneyðugt at hugsa meira um tey" | 1 | 0.9 |
| "Børnini trívast - men vit mugu gera nakað fyri at fáa øll at trívast betri | 50 | 45.0 |
| "Børnini hava tað ikki gott - vit mugu hjálpa teimum og lurta eftir teimum!" | 29 | 26.1 |
| "Tað er líkamikið hvussu børn hava tað - eg hugsi bara um vaksin" | 5 | 4.5 |
| Eg veit ikki | 20 | 18.0 |
| Ógreitt | 6 | 5.4 |

| Íalt | 111 | 100 |
|---|---|---|

Hvat høvdu børnini í kanningini gjørt fyri børnini í heimbygdini ella heimbýnum hjá sær, um tey vóru kommunupolitikarar? Í hesum opna spurningi skuldu børnini nevna upp til 3 mál, tey høvdu viljað arbeitt fyri. Í hópinum av uppskotum frá børnunum kunnu hesi nevnast:

- ítróttarhøll
- tónleikaskúli til børn
- umhvørvi til børn
- roykiforboð kring allan býin
- nógv betri og fittari lærarar
- nógv betri skúlar
- lurta eftir teimum [børnum]
- betri umhvørvi
- spælipláss
- fleiri skúlar
- tónleikaskúla á Argjum
- børn ókeypis bomm
- børnini fáa verðins størsta biograf
- skoytuhøll
- kurvabólt
- bommhandil í skúlanum
- svimjihøll
- vatnland
- fleiri biografar

Tað er trupult at savna øll hesi málini saman í somu niðurstøðu. Men óansæð kunnu vit siga, at ynskini eru sera fjølbroytt, áhugaverd og stuttlig. Her hava børnini eyðsæð tikið útgangsstøði í heimkommununi, tí t.d. ítróttar- og svimjihallir eru at finna nógvastaðni – serliga á stórplássum – í landinum. Nógv børn nevna roykiforboð – allastaðni! – og tað er ein greið ábending um, at ávísir lærarar og skúlar hava givið undirvísing í fólkaheilsu. Ynskini viðvíkjandi royking eru nógv meira víðgongd enn tað, nakar veruligur politikari her heima hevur sett fram. Eisini er áhugavert at síggja, at ítróttargreinir, ið vit sjáldan hoyra um í Føroyum, fáa umrøðu – t.d. kurvabóltur og skoyting. Hjá skúlamyndugleikum landsins má tað vera hugaligt at síggja, at fleiri børn nevna skúlaumhvørvið og ynskja sær betri skúlar. Vatnland er eisini eitt áhugavert ynski, tí tað er nakað, ið fleiri ferðir seinastu árini hevur verið umrøtt í fjølmiðlunum í Føroyum. Nógv børn hava vitjað ”vatnlond” í Danmark í feriutíð og høvdu ynskt, at tey høvdu lættari atgongd til hetta staðið.

**Talva 20. Hvønn skúla hevði tú valt av hesum?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Skúlan við nýggjum flottum teldum í øllum skúlastovnum | 31 | 27.9 |
| Skúlan við fittum og góðum lærarum | 34 | 30.6 |
| Skúlan við største og besta skúlagarðinum | 19 | 17.1 |
| Skúlan við vakrastu skúlastovunum við góðum borðum og stólum | 15 | 13.5 |
| Eg veit ikki | 7 | 6.3 |
| Ógreitt | 5 | 4.5 |
| | | |
| Íalt | 111 | 100 |

Børnini hugsa nógv um sosialan trivnað, tá skúlin er í brennideplinum. Tað mest týðandi hjá børnunum í 3. flokki er at hava góðar lærarar. Umleið 31 prosent av børnunum høvdu valt sær skúlan við fittum og góðum lærarum, meðan 28 prosent høvdu valt sær skúlan við nýggjum teldum í øllum skúlastovunum. Fysisku karmarnir eru minni týðandi, sambært kanniningi, tí tað hjálpir lítið at hava vøkur borð og ljósar veggir, um samskifti millum børn og vaksin ikki eydnast væl. Børnini hava ikki serliga langar skúladagar í 3. flokki, øðrvísi er í framhaldsdeild fólkaskúlans, og krevja ikki nógv av tí fysiska umhvørvinum. Børnini ynskja eitt gott samskifti – bæði sosialt og fakligt – og góðar vegleiðarar. Úrslitið er gott og gevur eina ábending um, at børnini eru tilvitað um týdningin av læring og menning innan skúlagátt.

**Talva 21. Hvønn skúla hevði tú valt av hesum?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Skúlan við besta bókasavninum | 2 | 1.8 |
| Skúlan við bestu íttrótarhøllini | 39 | 35.1 |
| Skúlan við bestu kantinuni (matstova) | 31 | 27.9 |
| Skúlan, ið liggur mitt úti í náttúruni | 17 | 15.3 |
| Eg veit ikki | 16 | 14.4 |
| Ógreitt | 6 | 5.4 |
| | | |
| Ialt | 111 | 100 |

At teldur eru meira áhugaverdar enn bøkur anno 2008 sæst í talvu 21, har einans tveir persónar høvdu valt sær skúlan við tí besta bókasavninum. Ítrótturin er sera vælumtóktur í skúlatíðini, 39 børn høvdu valt sær skúlan við bestu ítróttarhøllini. Tað er gjøgnumgangandi fyri allar aldursbólkar í fólkaskúlanum, at ítrótturin umboðar eina tiltrongda fríløtu frá lutfalsligu einsháttaðu floksundirvísingini, ið eyðennir næstan allar skúlatímarnar annars. Nógv børn, 31 í tali, høvdu valt skúlan við bestu matstovuni. Hetta er áhugavert, tí umstøðurnar hjá børnum at eta í føroyskum fólkaskúlum hevur verið alment kjakevni við nógvum atfinnandi røddum síðstu árini. Matarsteðgurin hevur verið eitt gloymt kapittul í nógvum skúlakjaki, tí tað er í grundini sera umráðandi at fáa góðan kost innan góðar karmar, um børnini skulu trívast og orka at koma ígjøgnum skúladagin.

Í talvu 22 sæst at børn gjarna vilja sleppa frá at fara tíðliga upp gerandismorgnar og heldur byrja skúladagin klokkan 10. Ein triðingur av børnunum í 3. flokki hevði valt skúlan, har byrjað varð klokkan 10, meðan 25 prosent høvdu valt skúlan, ið var stuttligast at ganga í. Skúlin, har børn lærdu mest er fyrstavalið hjá 18 prosentum av børnunum, meðan 15 prosent hvødu valt skúlan, har ongin fær lektiur at gera heima. Í 3. flokki í Føroyum hava børnini framvegis rættiliga lítið av skúlaarbeiði við sær heim, og tí hugsa tey helst ikki nógv um lektiur o.l. í hesum aldri.

**Talva 22. Hvønn skúla hevði tú valt av hesum?**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Skúlan har børn læra mest** | **20** | **18.0** |
| **Skúlan, ið er stuttligast at ganga í** | **28** | **25.2** |
| **Skúlan har børn ikki fáa skúlating at gera heima** | **15** | **13.5** |
| **Skúlan har børn ikki skulu møta fyrr enn kl . 10 um morgunin** | **37** | **33.3** |
| **Eg veit ikki** | **6** | **5.4** |
| **Ógreitt** | **5** | **4.5** |
| | | |
| **Íalt** | **111** | **100** |

Í talvu 23 sæst at nógv børn, umleið 24 prosent av luttakarunum, ynskja at ganga í einum skúla, har børnini eru nógv úti. Nógv børn í 9-10 ára aldri hava ilt við at sita still og savna sína hugsan um lesing og skriving. Børnini hava trongd til at røra seg nógv og vilja sleppa úr skúlastovuni og út at spæla. 25 børn høvdu valt skúlan, har tónleikur og sjónleikur fylla mest. Børnini, sum ynskja sær ein meira “bókligan” skúla, eru tó rættiliga nógv tilsamans. Heili 40 børn ynskja at hava skriving og rokning, religión og søgu, sum høvuðsinnihald í skúlaundirvísingini. Í talvu 23 er ein stór spjaðing í úrslitunum, ið ger tað trupult at peika á nakað serligt rák millum barna. Ein møgulig niðurstøða er at siga, at børnini hava sera ymisk áhugamál. Tey ynskja ein fjølbroyttan skúla, ið virðir bæði likamliga og sálarliga tørvin hjá skúlabørnum, bæði vitan og kenslur, bæði hørð og bleyt fak.

**Talva 23. Hvønn skúla hevði tú valt av hesum?**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Skúlan, har børn hava mest skriving og rokning** | **19** | **17.1** |
| **Skúlan, har børn hava mest tónleik og sjónleik** | **25** | **22.5** |
| **Skúlan, har børn hava mest religión og søgu** | **21** | **18.9** |
| **Skúlan, har børn eru mest úti** | **27** | **24.3** |
| **Eg veit ikki** | **13** | **11.7** |
| **Ógreitt** | **6** | **5.4** |
| | | |
| **Íalt** | **111** | **100** |

Tað er almenn vitan, at føroyska veðrið er sera skiftandi og at mong sakna sól og hita, serliga vetrarmánaðirnar í Føroyum. At børnini eisini hugsað um veðurlagið og mistrívast í ringum veðri kemur tó eitt sindur óvart á meg. Næstan helvtin av børnunum í 3. flokki høvdu, sæst í talvu 24, valt at búleikast í bygdini við góðum veðri allar ársins dagar, um tað var gjørligt. Hetta er nógv meira týðandi fyri børnini enn, hvussu nógvir bilar eru í bygdini ella hvussu nógvar pengar fólk hava at ráða yvir. 18 prosent av børnunum høvdu valt bygdina, har meira var at fara til hjá børnum. Pengar eru ikki fremst í huganum hjá teimum 9-10 ára gomlu, ið tíbetur ikki eru partur av arbeiðsmarknaðinum. Tey hava nógva frítíð, ið tey helst brúka til uttandura-virksemi, og tí er natúrligt, at veðrið umboðar eina ”hóttan” ímóti nógvum av tí, tey fáast við. Hinvegin kann sigast at føroysku børnini eru von við veðurumstøðurnar í landinum.

**Talva 24. Hvørja bygd / bý hevði tú valt?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Har, tað ongantíð er ringt veður | 49 | 44.1 |
| Har, tað eru færri bilar | 10 | 9.0 |
| Har, børn hava meira at fara til | 20 | 18.0 |
| Har, fólk hava fleiri pengar | 9 | 8.1 |
| Eg veit ikki | 15 | 13.5 |
| Ógreitt | 8 | 7.2 |
| | | |
| Íalt | 111 | 100 |

Spæl er skapandi og mennandi fyri børn og kann síggjast sum partur av bæði skúla- og frítíðarlívinum. Ein triðingur av børnunum høvdu valt bygdina, har børn hava meira tíð til spæl og skemt. Børnini ynskja at spæla, men tey ynskja eisini sjálvi at velja hvat og hvussu tey spæla. Børn vilja, tá tey spæla, vera frí frá foreldranna eftirliti. Børn í 3. flokki eru nóg stór til at vera saman við vinum uttan, at foreldur eru hjástødd. Í hesum lívsskeiði mennast tey nógv sosialt og skapa sær ein persónligan samleika, ið foreldrini ikki altíð heilt skilja og viðurkenna. Einans 7 børn í kanningini høvdu ynskt at farið í skúla longu 5 ára gomul eins og í Stórabretlandi. Børnini hugsa ikki um kappingina millum skúlar og lond um at fáa tey bestu úrslitini. Tey kenna ikki til PISA-kanningar og almenna kjakið, ið hesar kanningarnar hava elvt til.

**Talva 25. Hvørja bygd / bý hevði tú valt?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Har, børn sleppa sjálvi at velja hvat, tey vilja gera | 33 | 29.7 |
| Har, børn kunnu vera politikarar | 17 | 15.3 |
| Har, børn hava meira tíð til spæl og skemt | 37 | 33.3 |
| Har, børn skulu byrja í skúla tá tey eru 5 ár | 7 | 6.3 |
| Eg veit ikki | 12 | 10.8 |
| Ógreitt | 5 | 4.5 |
| | | |
| Íalt | 111 | 100 |

Børn hava til tíðir brúk fyri at savnast saman uttan, at vaksin fólk seta dagskránna. Tað er neyðugt hjá børnum at læra at samskifta, samskipa og leggja til rættis í spæli uttan altíð at hava foreldur ella onnur vaksin at heita á. Í talvu 26 sæst at meira enn ein triðingur av børnunum, 40 persónar, høvdu viljað havt ein barnaklubba, har børn spæla og hugna sær uttan at vaksin eru við. Einans 18 børn høvdu heldur viljað havt ein klubba, har ið børn og foreldur eru saman. Í 9-10 ára aldri royna børn, hóast tey als ikki eru vaksin, at stýra eitt sindur í sínum gerandisdegi. Tey seta krøv til foreldrini, samráðast um avtalur um, nær tey skulu vera heima, geva sínar meiningar til kennar við døgurðaborðið, og royna at fáa ein høgan status í familjuni, hóast tey einans ganga í 3. flokki. Hetta er vanlig viðurskifti í kjarnufamiljum í seinmodernaða samfelagnum.

**Talva 26. Hvønn klubba hevði tú valt?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Klubban har, øll brúka teldur og eru á alnetinum | 22 | 19.8 |
| Klubban har, vaksin fólk læra børn at syngja, tekna og annað | 21 | 18.9 |
| Klubban har, børn spæla & hugna sær uttan at nakar vaksin er við | 40 | 36.0 |
| Klubban har, børn og foreldur eru saman | 18 | 16.2 |
| Ógreitt | 10 | 9.0 |
| Íalt | 111 | 100 |

Børnum dámar sum heild sera væl at vera úti í náttúruni. Hóast tey eru umgird av hátøkniligum tólum bæði heima og í skúla, bæði gerandisdagar og í feriutíð, so hava vanligar náttúruupplivingar eitt heilt serstakt virði hjá børnunum. Eitt sindur øðrvísi er hjá ungdómum. Børnini kenna seg frí og glað, tá tey sleppa á rannsóknarferð úti í villari náttúru. Í Føroyum hava børn, serliga á bygd, heilt til í dag havt sera fríar teymar til at spæla í fjøru, í haga, fram við áir o.s.fr. 43 prosent av børnunum í kanningini siga seg ynskja sær ein klubba, har børn ganga túrar, sigla í báti og annað stuttligt úti í náttúruni. 20 prosent av børnunum ynskja sær ein klubba, har bara gentur ella bara dreingir sleppa at vera við. Í 9-10 ára aldri eru børnini framvegis uppbýtt eftir kyni, skilt á tann hátt, at dreingir eru mest saman við dreingjum og gentur mest saman við gentum. Vinarbólkarnir hava í høvuðsheitum bara eitt kyn – antin dreingir ella gentur.

**Talva 27. Hvønn klubba hevði tú valt?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Klubban har, børn ferðast uttan at foreldrini eru við | 16 | 14.4 |
| Klubban har, stór børn(ungdómar) læra yngri børn (7-9 ár) at syngja, dansa o.s.fr. | 14 | 12.6 |
| Klubban har, bara gentur ella bara dreingir sleppa at vera við | 22 | 19.8 |
| Klubban har, børn eru úti í náttúruni (ganga túrar, sigla í báti...) | 48 | 43.2 |
| Ógreitt | 11 | 9.9 |
| Íalt | 111 | 100 |

Tá børnini sjálvi, uttan leiðbeining, skulu lýsa tann besta barnaklubban, ið tey kunnu hugsa sær, so kemur nógv áhugavert fram í ljósið, ið annars neyvan hevði fingið pláss í spurnarkanningini. Her eru nøkur dømi:

- har foreldrini eru við
- har tey tekna og læra nógv annað
- øll spæla bólt
- at fara í Hvonn og at ferðast
- hugna sær og spæla
- børn hugna sær og fara at ferðast
- børn fara í tivoli
- svimjing og rógva gummibáti

At ferðast dámar børnum væl. Fleiri kundu hugsað sær at ferðast saman við vinum og kenningum. Ein persónur nevnir tivoli, ið flestu børnini hava hoyrt um og nógv eisini hava upplivað, tá tey hava verið í Keypmannahavn í feriu. At fara út at eta er eisini nakað spennandi, ið ofta er knýtt at feriutíð og uttanlandsferðing. Ein persónur hevur ynski um at fara á matstovuna Hvonn í Havn saman við barnaklubbanum.

Børn hugsa eisini um framtíðina hjá sær. Tey hava tankar og dreymar um vaksnamannatilveruna og alt, ið í henni liggur. Familjan er tað mest týðandi hjá børnum, tá tey royna at ímynda sær lívið fyri framman. 38 av børnunum hugsa mest um familjuna, meðan 14 og 15 hugsa um ávikavist arbeiði og vinir. Kærleikslívið er ikki nakað, ið børn undir 10 ár sveimandi droyma um. Einans 9 børn hugsa mest um kærleikan tá framtíðin er í huga. Ein triðingur av børnunum havi ikki nakran serligan tanka at draga fram – tey vita ikki ella hava onki svar. Børn undir 10 ár liva í nútíðini og hava eyðsæð sjáldan valt sær nøkur ítøkilig lívsmál at miðja eftir. Tó eru tey fús at tosa um framtíðina, um tey verða spurd. Í seinmodernitetinum, ið m.a. er eyðkendur av at einstaklingar hava nógv val at taka, eru børn von at hoyra um framtíðina, ið inniber so nógv val og frával.

**Talva 28. Framtíðin – hvat hugsar tú mest um?**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Arbeiði** | 14 | 12.6 |
| **Familja** | 38 | 34.2 |
| **Vinir** | 15 | 13.5 |
| **Kærleikslív** | 9 | 8.1 |
| **Eg veit ikki** | 29 | 26.1 |
| **Ógreitt** | 6 | 5.4 |
| | | |
| **Íalt** | 111 | 100 |

Framtíðin hjá tær - hvat hugsar tú mest um? (ein kross)




Upplivingarbúskapur er eitt hugtak, ið hevur verið nógv frammi síðstu árini. Búskaparfrøðingar og sosiologar tosa um, at upplivingarkapitalurin og upplivingarvinnan vaksa støðugt í týdningi fyri Vestanlond. Øll menniskju søkja upplivingar í seinmodernitetinum. At uppliva nakað, næstan líkamikið hvat, er høgt í metum og eitt aðalmál í lívinum. Eisini børn hugsa um at uppliva nógv og fáa eitt spennandi lív. Í talvu 29 sæst at 37 prosent av børnunum hugsa mest um at uppliva nógv, tá tey verða spurd um framtíðina hjá sær. Einans 15 prosent hugsa mest um útbúgving. At vinna pening og gerast ríkur er eisini týðandi. 24 prosent ynskja helst at verða rík og kend.

**Talva 29. Framtíðin – hvat hugsar tú mest um?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Eg vil læra nógv og fáa góða útbúgving | 17 | 15.3 |
| Eg vil uppliva nógv og hava eitt spennandi lív | 41 | 36.9 |
| Eg vil skapa nakað - mála, tekna, skriva os.f.r. | 4 | 3.6 |
| Eg vil blíva kendur og ríkur | 27 | 24.3 |
| Eg veit ikki | 16 | 14.4 |
| Ógreitt | 6 | 5.4 |
| | | |
| Íalt | 111 | 100 |

x




Lívið er ein verkætlan, har persónar taka nógvar stórar avgerðir, ið ávirka mentan, virði og lívsstílar teirra. Upplivingar eru dýmettur kapitalur, ið kann knýtast at nógvum: læring, skemti, royndum, vinum, samskifti o.s.fr. Ofta verða upplivingar eisini roknaðar sum nakað sosialt mennandi, nakað gevandi fyri persónar, ið ynksja sær sosial netverk og nýggj virði. Undir 4 prosent av børnunum siga í talvu 29 at tey hugsa mest um tað skapandi arbeiðið – mála, tekna o.s.fr. Hetta merkir eyðsæð ikki at børnini ikki vilja brúka hugflogið og skapa list, men tað vísir okkum at børnini knýta tað at mála, tekna og skriva at skúlatíðini og barndómslívinum. Við øðrum orðum er tað partur av ”gerandisdegnum” og sostatt sjáldan partur av stórum framtíðardreymum. Úrslitini í talvu 29 samsvara væl við ástøðið um seinmodernitetin, ið vísir, hvussu trupult tað er at seta børn og vaksin í bás í dag, júst tí at ynskir og dreymar, virði og mál, eru so fjølbroytt og knýtt at individuellum raðfestingum.

Hvat halda børnini sjálvi, við egnum orðum, er týðandi fyri at fáa børn at trívast, vera glað og sterk í Føroyum ídag. Her kom nógv áhugavert fram. Tað er týðiligt at síggja, at góð heilsa er nakað tey flestu meta høgt. Roykipolitikkurin er eisini á dagsskránni. Her hava ávísir fólkaskúlar ávirkað børnini og fingið tey at krevja herd átøk ímóti roykjarum í landinum. Her eru nøkur svar, ið børnini komu við:

- royking bannað
- sigarettir/sigarir forboðið um allan býin!
- royking skal kosta 1000,-!
- drekka mjólk, ikki happa
- sigarettir kr 500.000
- reinari umhvørvi
- bomm kostar minni
- øll eru glað
- meira ítróttur

Heilsa og umhvørvi eru evni, ið børnini kenna og nevna her. Ein persónur sigur haraftrat at prísurin á bommum eigur at fara niður. Tað passar ikki heilt inn í myndina í mun til heilsuna hjá børnum, men kann kanska knýtast til eitt annað svar: ”øll eru glað”. At vera glaður er sjálvandi nakað, ið kann vera ávirkað av heilsustøðuni hjá persónum, men tað er eisini nakað, ið hevur við frælsi og tryggleika at gera.

Við lága aldrinum í huga, at børnini eru 9-10 ára gomul, so meini eg, at tey duga sera væl at svara spurningum og at sjálvi greitt orða sínar meiningar. Børnini eru von við at skula fortelja um sínar áskoðanir og sínar raðfestingar. Tað er nakað tey læra heima og í skúla. Tað verður kravt av teimum, at tey skulu duga at velja, duga at verja síni sjónarmið og duga at grundgeva fyri sínum avgerðum. Sostatt er samskifti ein sera týðandi partur av øllum, tey fáast við. Børnini skulu eisini royna at hugsa fram í tíð, eftirmeta sínar gerðir og skapa sær ein mentanarligan samleika. Tó er mark fyri, hvussu nógv, ið kann krevjast av børnum í 9-10 ára aldri, tá tey skulu virka sum samfelagsborgarar við rættindum og skyldum. Tey eru hóast alt børn, ið ikki kunnu ábyrgdast fyri alt, tey siga og gera. Øðrvísi er 5 ár seinni í lívinum, tá tey ganga í framhaldsdeildini í fólkaskúlanum. Nú skulu vit hyggja nærri at úrslitunum av kanningini í 8. flokkum kring landið.

## [3] Úrslit – 8. flokkur

Ungdómurin í 8. flokki er 14-15 ára gamal. Í kanningini eru tó eisini tveir næmingar, ið eru 13 og 16 ára gamlir. Hví hesir persónarnir ganga í 8. flokki er ikki greitt her. Tá spurnarkanningin fór fram á vári 2008 vóru tey 14 og 15 ára gomlu ávikavist 92 og 18 í tali. Tíverri hava heili 16 av undarligum orsøkum ikki givið nakað greitt svar uppá spurningin um aldur. Íalt 127 ungdómar luttóku í spurnarkanningini. Ungdómurin í 8. flokki er í einum viðbreknum aldri, ið umboðar eina skiftistíð. Bæði kroppsliga og sálarliga hendir nógv í hesum lívsskeiði og foreldrini halda ofta, at børnini eru strævin og óstøðug.

Tey ungu kenna seg vaksin og búgvin og seta høg krøv til umhvørvið, tey røra seg í. Tey vilja sleppa at gera, sum teimum lystir, tó uttan ta ábyrgd, ið vaksin fólk vanliga hava. Í hesum aldri er sosiala trýstið frá javnaldrum sera stórt. Vinir hava næstan alt at siga. Sambandið við foreldur er ofta trupult, tí tey ungu royna at ríva seg leys frá myndugleika foreldrana. Nógv ung eru eisini júst byrjað at ”ganga í býnum” í vikuskiftum, tá tey ganga í 8. flokki. Nógv ung hava sjeik ella damu og byrja eitt kynslív. Øll hesi viðurskifti innibera stór val og vandar, ið tey ungu noyðast at taka støðu til.

Ungdómsbólkar uppstanda eisini í hesum umhvørvi. Frástøðan – sosialt, mentanarliga – millum bólkarnar verður størri enn áður, m.a. í mun til hvør, ið gongur í dans og ikki. Tey ungu hava klikur og ”bandar” og eru sera tilvitað um mørkini, tey seta millum bólkarnar. Kappingin millum ung og millum ungdómsbólkar er ofta stór og beisk. At fáa viðurkenning millum javnaldrar hevur alt at siga. Tað er eisini í hesum tíðarskeiði, at nøkur ung verða marginaliserað og stigmatiserað (stemplað) sum ”taparar”. Hesi hava nógvar trupulleikar at dragast við.

**Talva 30. Aldur**

| | N | % |
|---|---|---|
| 13 | 1 | 0.8 |
| 14 | 92 | 72.4 |
| 15 | 18 | 14.2 |
| 16 | 1 | 0.8 |
| Ógreitt/onki svar | 15 | 11.8 |
| | | |
| Íalt | 127 | 100 |

Tey ungu búgva eyðsæð í bygdunum og býunum, sum hava skúlar, ið luttóku í kanningini hjá mær. Í talvu 31 hava nógv, 20 persónar, ikki svarað spurninginum. 31 persónar búgva í høvuðsstaðarkommununi. Í klaksvík búgva 19 luttakarar. Sandoyggin er væl umboðað við sínum 11 ungdómum. 19 ungfólk úr Suðuroynni, harav 11 búgva í Vági, luttóku. Fleiri børn hava lutfalsliga langan veg í skúla í Suðuroynni – t.d. 3 persónar, ið búgva í Sumba og ganga í skúla í Vági. Tveir næmingar búgva eisini í Hovi. 11 næmingar búgva í Eysturoynni. Hesi hoyra til Tofta skúla.

**Talva 31. Bústaður**

| | N | % |
|---|---|---|
| Argir | 11 | 8.7 |
| Hov | 2 | 1.6 |
| Hoyvík | 9 | 7.1 |
| Kaldbak | 3 | 2.4 |
| Klaksvík | 19 | 15.0 |
| Miðvágur | 7 | 5.5 |
| Nes, Eysturoy | 2 | 1.6 |
| Porkeri | 3 | 2.4 |
| Sandavágur | 6 | 4.7 |
| Sandur | 5 | 3.9 |
| Skálavík | 2 | 1.6 |
| Skopun | 4 | 3.1 |
| Sumba | 3 | 2.4 |
| Toftir | 9 | 7.1 |
| Tórshavn | 8 | 6.3 |
| Vatnsoyrar | 3 | 2.4 |
| Vágur | 11 | 8.7 |
| Ógreitt/onki svar | 20 | 15.7 |
| | | |
| Íalt | 127 | 100 |

Í talvu 32 sæst, at næstan øll tey ungu hava búð í Føroyum í meira enn 3 ár. Og tey flestu av hesum fólkunum hava altíð búð í Føroyum. Einans ein persónur hevur búð í Føroyum í minni enn eitt ár. Haraftrat hevur ein persónur búð 1-3 ár í Føroyum. Flestu børnini í Føroyum ganga í sama skúla øll árini, tey ganga í fólkaskúla. Tó noyðast tey, ið hoyra til smáar fólkaskúlar í útjaðaranum, sjálvandi, at skifta skúla tá tey fara í framhaldsdeidina. Tað kann t.d. vera børn úr Húsavík og Skálavík, sum skulu til Sandoyar Meginskúla. Í talvu 33 sæst at 9 ung eru flutt til bygdina ella býin, ið tey búgva í, innanfyri 3 tey seinastu árini. 104 ung hava búð á staðnum í meira enn 3 ár. 11 prosent, tað er 14 persónar, hava ikki svarað spurninginum.

**Talva 32. Hvussu leingi hevur tú búð í Føroyum?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Undir 1 ár | 1 | 0.8 |
| 1 - 3 ár | 1 | 0.8 |
| Meira enn 3 ár | 110 | 86.6 |
| Veit ikki | 1 | 0.8 |
| Ógreitt/onki svar | 14 | 11.0 |
| Íalt | 127 | 100 |

**Talva 33. Hvussu leingi hevur tú búð í bygdini/býnum?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Undir 1 ár | 4 | 3.1 |
| 1 - 3 ár | 5 | 3.9 |
| Meira enn 3 ár | 104 | 81.9 |
| Eg veit ikki | 1 | 0.8 |
| Ógreitt/onki svar | 13 | 10.2 |
| Íalt | 127 | 100 |

Ungdóminum dámar sum heild sera væl at búgva har, hann hevur bústað. Einans tveir ungdómar trívast illa á staðnum. 11 ungum dámar ikki so væl. Staðartilknýtið ti lokalsamfelagið er sum heild sera sterkt í Føroyum, og tey flestu ungu hava djúpar røtur í bygdini, sum tey búgva í. Tey flestu hava síni nærmastu, bæði vinir og skyldfólk, í bygdini og hava sterkar kenslur til heimliga umhvørvið. Tó eru líkindini til, at tey ungu seinni fara at flyta burtur úr bygdini lutfalsliga stór. Serliga kvinnurnar flyta í stórum tali uttan at venda heimaftur.

**Talva 34. Dámar tær at búgva her?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Sera væl | 55 | 43.3 |
| Væl | 47 | 37.0 |
| Ikki so væl | 11 | 8.7 |
| Illa | 2 | 1.6 |
| Eg veit ikki | 1 | 0.8 |
| Ógreitt/onki svar | 11 | 8.7 |
| Íalt | 127 | 100 |




Ein stórur partur av ungdóminum veit ikki reiðiliga, um hann vil búgva á sama plássi, tá hann verður vaksin. Hóast tey ungu í 8. flokki eru 14-15 ára gomul, so eru sera nógv ivamál viðvíkjandi framtíðini. Tey hava sera nógv ymist mál, ið ávirka framtíðartilveruna, at taka støðu til. Hvat fyri arbeiði ynskja tey sær? Hvat fyri familjulív ynskja tey sær? Hvat fyri frítíðarlív ynskja tey sær? Hvat fyri bústað ynskja tey sær? Tað er ikki óvanligt at hoyra ungdóm á bygd, kanska serliga í útjaðaranum, siga, at honum dámar sera væl í heimbygdini, har er gott at vera, men at hann tó ikki væntar at blíva verandi. Ofta er tað arbeiðsmarknaðurin, ið noyðir ungdómin at søkja aðrar leiðir. Ein triðingur av ungdóminum í kanningini vil gjarna verða verandi í bygdini, men avgerðin kann skjótt broytast. Ungdómurin er meira mobilur enn hann var fyrr. Tá ung skulu velja sær útbúgving fáa tey at vita, at møguleikarnir eru markleysir og ongin forðing er fyri at flyta úr kommununi ella av landinum. Tey fáa lokkandi faldarar um útbúgvingar kring allan knøttin. Hóast sagt verður, at møguleikarnir hjá ungdóminum eru markleysir og tað er bara at pakka taskuna og leypa avstað, so er veruleikin kortini ikki so einfaldur. Ikki øll ung hava hug at flyta og skapa eina øðrvísi karrieru. Ein partur av ungdóminum er meira siðbundin og ynskir ikki at kvetta bondini við lokalsamfelagið. Spurningurin er, hvørji mál ein setur sær og hvat, ið vigar tyngst, tá ein skal velja og frávelja.

**Talva 35. Vilt tú gjarna búgva her tá tú verður vaksin?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Ja | 42 | 33.1 |
| Nei | 24 | 18.9 |
| Eg veit ikki | 50 | 39.4 |
| Ógreitt/onki svar | 11 | 8.7 |
| | | |
| Íalt | 127 | 100 |

Í talvu 36 sæst at ungdómurin als ikki trívist líka væl sum tey 9-10 ára gomlu børnini í skúlanum. Myndin er heilt øðrvísi hjá teimum 14-15 ára gomlu. Einans 9 ung trívast sera væl, og heili 24 trívast beinleiðis illa. 45 ung trívast væl í skúlanum, meðan 35 ung ikki trívast serliga væl. Næmingarnir í 8. flokki eru ofta skúlatroyttir og gleða seg til at fáa fólkaskúlaprógv og sleppa avstað. Tað, ið var nýtt og spennandi í 3. Flokki, er kanska keðiligt og einsháttað í 8. flokki. Tað er ofta strævið hjá lærarum at hava 8. flokkar, tí nógvir næmingar als ikki tíma at arbeiða. Ofta eru teir dovnu næmingarnir ráðandi, so at teir góðu næmingarnir ikki hoyrast ella síggjast. Talan er tó ikki einans um at vera dovin ella líkasælur, tí støðan hjá ungdóminum er eisini ávirkað av likamligum broytingum, ið gera at næmingarnir kunnu tykjast sløvir og fráverandi. Nógvir næmingar hava eisini so nógv um oyruni, at skúlin hvørvur millum alt annað. Sostatt fáa næmingarnir ikki savnað seg um skúlan og skúlaarbeiðið, og tað er spell. Hugurin at ganga í skúla verður eisini ávirkaður av umhvørvinum í heiminum. Um foreldrini ikki tosa við børnini um skúlan og ikki vísa skúlanum nakran áhuga, so sigur tað seg sjálvt, at mynstrið ávirkar skúlabørnini á neiligan hátt. Virðingin fyri skúlanum minkar, og næmingurin raðfestir ikki skúlan. Hjá nógvum børnum er hugurin at taka hægri útbúgving til staðar, hóast tey ikki tíma í skúla. Tað kann t.d. vera at næmingurin keðir seg og gleðir seg at sleppa á miðnámskúla, har hann fer at fáa størri spennandi avbjóðingar. Sostatt eru nógv børn, sum klára seg væl seinni í lívinum, hóast tey í framhaldsdeild fólkaskúlans mistrívast og gera sera lítið við skúlan.

**Talva 36. Dámar tær væl at ganga í skúla?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Sera væl | 9 | 7.1 |
| Væl | 45 | 35.4 |
| Ikki so væl | 35 | 27.6 |
| Illa | 24 | 18.9 |
| Eg veit ikki | 3 | 2.4 |
| Ógreitt/onki svar | 11 | 8.7 |
| | | |
| Íalt | 127 | 100 |

Ítrótturin er, ikki óvæntað, best umtókta frítíðarítrivið hjá ungdóminum. Heili 72 útav 127 ungdómum ganga til ítrótt. Síðan koma samkomurnar og sangur/tónleikur við ávikavist 43 og 34 persónum. Einans 3 persónar eru skótar. Ikki øll í 14-15 ára aldri hava serlig frítíðarítriv. 15 persónar ganga ikki til nakað í frítíðini hjá sær. Nógv ganga til annað enn tað, ið talva 37 nevnir. Her er eitt úrval:

- ríðing
- neyðhjálp
- føroyskan dans
- arbeiði
- fimleik, eri venjari í fimleiki
- hondbólt og lyfti vektir
- rógving
- vatnski
- rullifjøl (skateboard)

Ein partur av ungdóminum hevur arbeiði í frítíðini. At bera tíðindabløð út til haldarar er eitt arbeiði, ið fleiri í hesum aldursbólkinum hava. Nøkur arbeiða í kiosk ella á bakaríi. Tey flestu í 14-15 ára aldri hava roynt okkurt slag av arbeiði í feriutíð. Á bygd hava tey ungu viðhvørt royndir innan fiskivinnuna á landi. Tey hava hjálpt til á flakavirkjum ella í egningarskúrum. Sambært PhD-granskingini hjá mær eru tó alt færri ungdómar, ið javnan arbeiða innan flakavinnuna. Fyrr arbeiddu næstan allir ungdómar í summarferiunum, men støðan er nógv broytt. Arbeiðsmarknaðurin er broyttur og nógv ung ynskja at brúka frítíðina hjá sær til annað enn lønararbeiði. Sum sagt, so fer nógv tíð til ítróttin. Ítróttarfólkið hevur venjingar, kappingar, uttanlandsferðir o.s.fr. á skránni allar ársins tíðir. Hjá nógvum ungdómum verður frítíðarlívið tikið í størsta álvara – tað er teimum líka týðandi sum lønararbeiði – og umboðar nakað, ið tey ungu vilja hava sum arbeiði seinni í lívinum. Tey droyma um at liva av ítróttinum ella tónleikinum, ið tey venja og spæla í frítíðini hjá sær.

**Talva 37. Frítíð – gongur tú til..?**

| | Ja | Nei | Ógreitt | N |
|---|---|---|---|---|
| Ítrótt | 72 | 45 | 10 | 127 |
| Sang & tónleik | 34 | 83 | 10 | 127 |
| Møti | 43 | 74 | 10 | 127 |
| Sjónleik | 2 | 115 | 10 | 127 |
| Dans | 8 | 109 | 10 | 127 |
| Skóti | 3 | 114 | 10 | 127 |
| Annað | 23 | 93 | 11 | 127 |
| Onki | 15 | 100 | 12 | 127 |

Ungdómurin í kanningini hevur nógv áhugamál og nógv at fáast við, men hann saknar tó nógv í lokalsamfelagnum. Útboðið av skipaðum frítíðarvirksemi er ikki nøktandi, serliga ikki í minstu kommununum, og aldursbólkurin umleið 14-18 ár er serliga hart raktur. Tey ungu úr 8. flokki eru ov ung at sleppa í dans (diskotek) og ov gomul til barnadansititøk. Nógv í 14-15 ára aldri ganga nógv úti í býnum um kvøldarnar, men tey mangla okkurt stað at fara. Í høvuðsstaðnum er Margarinfabrikkin – Virkishús fyri børn og ung – eitt gott tilboð til hesi fólkini. Eisini í Klaksvík er eitt væl rikið ungdómshús, ið nógv børn og ung brúka. Aðrar størri bygdir hava eisini uppdagað, hvussu gott tað er fyri ungdómin, at hava eitt frítt savningarstað. Í Vestmanna og í Vágum eru líknandi ungdómshús sett á stovn, og fleiri ungdómshús eru á veg aðrastaðni í landinum. Á Tvøroyri hevur ungdómurin nýliga fingið sera vøkur og hóskandi høli til frítíðarbrúk.

Í talvu 38 sæst, at 65 ungdómar sakna ungdómsklubbar og diskotek. 38 sakna eisini onnur dansistøð. 9 sakna frítíðarskúlar fyri ung. Tað er ofta tann ungdómur, sum av ymsum orsøkum ikki gongur til ítrótt ella tónleik, ið er ónøgdur við støðuna í lokalsamfelagnum, tá hugsað verður um frítíðarlív. Ung í 14-15 ára aldri eru forvitin og ynskja at sleppa út í náttarlívið. Tey ynskja at fáa eitt sosialt umhvørvi, har tey kunnu hugna sær, práta og koma í samband ið ung úr sama aldursbólki. Tey ynskja at fáa nakrar karmar, ið virka sum savningarstað hjá ungdómi. Í einum ungdómshúsið kunnu øll hittast uttan mun til áhugamál, trúgv, kyn ella sosiala bakgrund. Tað er eitt blandað umhvørvi, ið hevur ein óformellan dám yvir sær.

**Talva 38. Frítíð – hvat manglar í bygdini/býnum hjá tær..?**

| | Ja | Nei | Ógreitt | N |
|---|---|---|---|---|
| Ítrótt | 24 | 92 | 11 | 127 |
| Svimjing | 16 | 100 | 11 | 127 |
| Sang & tónleik | 18 | 98 | 11 | 127 |
| Møti | 6 | 110 | 11 | 127 |
| Sjónleik | 17 | 98 | 12 | 127 |
| Føroyskan dans | 6 | 110 | 11 | 127 |
| Annan dans | 38 | 78 | 11 | 127 |
| Skóti | 7 | 108 | 12 | 127 |
| Ungdómsklubbi | 65 | 51 | 11 | 127 |
| Ungdómsdiskotek | 65 | 51 | 11 | 127 |
| Talv | 5 | 111 | 11 | 127 |
| Frítíðarskúli | 9 | 107 | 11 | 127 |
| Annað | 16 | 100 | 11 | 127 |
| Onki | 4 | 110 | 13 | 127 |

Tað eru eisini 24 útav 127 ungdómum, ið ikki hava tað ítróttarumhvørvið, tey kundu tonkt sær. Serliga í smáum bygdum er ítróttarlívið ofta avmarkað til fótbólt og hondbólt, viðhvørt eisini rógving. 16 ung sakna svimjiumstøður í heimbygdini. Sjónleikur er eisini nakað, fleiri ungum dámar væl, uttan at hava møguleika til at gera nakað við áhugamálið í gerandislívinum. 17 ung sakna eitt sjónleikarumhvørvi.

Tey ungu nevna ymist, tá tey skulu skriva hvat, ið tey sakna í heimkommununi – t.d nevna tey:

- klædnahandil
- skutaralógin skal vera sett niður til 15 ár
- meira ung-vinarlig tiltøk
- DJ-show
- baðiland
- ungdómshús
- teldu-café
- betri skateboard-park

Ungdómsklubbarnir, sum eru komnir síðstu árini, hava Margarinfabrikkina til fyrimynd. Tað eru virkishús har børn og ung kunnu brúka teldur til spøl og annað, spæla kort, lurta eftir tónleiki, hyggja at filmum, dansa, syngja, spæla sjónleik, gera mat o.s.fr. Tiltøkini eru sera fjølbroytt og luttakararnir eru í miðdeplinum, t.v.s. at tey ungu avgera í stóran mun sjálvi hvat, tey skulu gera.

Óskipað og skipað frítíðarítriv eru ikki ósambæriligar eindir, ið koyra ungdómin í tvíningar, tí øll luttaka viðhvørt í óskipaðum frítíðarvirksemi av onkrum slag. Teimum ungu dámar væl at vera saman við vinum í frítíðini. Um ung í høvuðsstaðnum stendur (Álit um Ung 2006):

> *At vera saman við vinfólki er heilt greitt tað, ið ungdóminum dámar best at gera í frítíðini. Fleiri av teimum best umtóktu frítíðarítrivunum eru slík, har tey ungu eru saman og felags um eitthvørt, eitt nú, tá tey íðka ítrótt, ballast, ganga í samkomu, eru saman við familjuni ella fara í biograf. Onnur væl umtókt ítriv, ið ikki neyðturviliga eru í sosialum høpi, eru eitt nú at lurta eftir tónleiki og at hyggja í sjónvarp.*

Teimum ungu dámar væl at lurta eftir tónleiki, at kjatta, at ”shoppa”, at spæla telduspøl , at hyggja í sjónvarp o.s.fr. Modernaðir miðlar eru í hvørjum heimi, og ungdómurin er stórnýtari av hesum miðlum. Tey 14-15 ára gomlu hava longu fleiri ár á baki sum nýtarar av alnetinum. Tey ungu í dag eru vaksin upp við modernaðum miðlum heima, í skúla og í frítíð. Tey kenna ikki til annað. Einans tveir útav 127 næmingar í 8. flokki dáma at fiska í frítíðini hjá sær. Tað er minni enn væntað, hóast aðrar kanningar hava víst somu úrslit. Nógv ung hava tó bæði innandura og uttandura áhugamál fyri frítíðina hjá sær. At ganga túrar er væl umtókt, og tað kann bæði vera í býnum og í náttúruni. At vera saman við vinum, uttan nakað serligt virksemi á skránni, er nakað tey flestu gleðast yvir.

**Talva 39. Hvat annað dámar tær at gera í frítíðini? (vel nr. 1 og nr. 2 og nr. 3)**

| | 1 | 2 | 3 | Ikki raðfest | N |
|---|---|---|---|---|---|
| Ganga túrar | 8 | 3 | 5 | 111 | 127 |
| Súkkla | 1 | 1 | 2 | 123 | 127 |
| Fiska | 1 | 0 | 1 | 125 | 127 |
| Spæla telduspøl | 9 | 6 | 1 | 111 | 127 |
| Kjatta | 8 | 7 | 6 | 106 | 127 |
| Hyggja í sjónvarp | 0 | 14 | 13 | 100 | 127 |
| Lurta eftir tónleiki | 5 | 16 | 15 | 91 | 127 |
| Fara á bókasavn | 1 | 0 | 0 | 126 | 127 |
| Lesa | 2 | 2 | 0 | 123 | 127 |
| Tekna | 1 | 1 | 0 | 125 | 127 |
| Skateboarda | 1 | 0 | 0 | 126 | 127 |
| Arbeiða | 3 | 1 | 3 | 120 | 127 |
| Gera mat | 0 | 1 | 5 | 121 | 127 |
| Ríða | 3 | 2 | 2 | 120 | 127 |
| Keypa | 10 | 10 | 7 | 100 | 127 |
| Annað | 12 | 3 | 4 | 108 | 127 |
| Onki | 1 | 0 | 1 | 125 | 127 |

Í kategoriini ”annað” í talvu 39 verður t.d. hetta nevnt:

- trena svimjing
- vinir
- sparka fótbólt
- hondbólt
- slappa av saman við vinum
- rógving
- vera saman við vinum, familju og sjeiki
- vatnski

Longu í 14-15 ára aldri eru nógv ung, sum hava sjeik ella damu, ið tey eru saman við í frítíðini hjá sær. Sum heild eru ung av báðum kynum umboð í teimum flestu bólkunum og umhvørvunum, ið tey 14-15 ára gomlu hoyra til. Tó eru ítriv, sum serliga gentum dámar og øvugt. Fleiri dreingir enn gentur standa á skateboard, meðan fleiri gentur enn dreingir dansa ballett. Tó flytast mørkini allatíðina fyri, hvat gentur og dreingir gera.

Tá børn eru blivin 14 ár kenna tey nakað til almenna samfelagskjakið og politikkin í landinum. Nógv ung fylgja við í tí, sum fjølmiðlarnir skriva og siga. Tey eru sostatt eisini før fyri at taka støðu til ymisk mál, sum eru frammi í kjakinum. Tey hava meiningar um viðurskifti, ið beinleiðis ella óbeinleiðis ávirkar teirra tilveru og framtíð. Í skúlanum eru tey eisini farin at læra um samfelagið, sum tey liva í. Tey 14-15 ára gomlu hava onga politiska ávirkan, tí tey hava ikki valrætt, men tey eru samfelagsborgarar, ið hava eitt lutfalsliga stórt forbrúk. Nøkur ung hava áhuga fyri partapolitikki og kenna til politisku ungmannafeløgini.

**Talva 40. Hevur kommunan hjá tær nakran barna- og ungdómspolitikk?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Ja | 9 | 7.1 |
| Nei | 33 | 26.0 |
| Eg veit ikki | 72 | 56.7 |
| Ógreitt/onki svar | 13 | 10.2 |
| | | |
| Íalt | 127 | 100 |

Í talvu 40 sæst, at tey flestu ungu ikki vita, um kommuna teirra hevur nakran barna- og ungdómspolitikk. 57 prosent vita ikki, um nakar ungdómspolitikkur er í heimkommununi. 7 prosent meina, at ein ungdómspolitikkur er í kommununi. Veruleikin er tó at næstan ongin kommuna hevur nakran orðaðan politikk fyri børn og ung í økinum. Tað er sostatt lætt at skilja, at tey ungu ikki hava hoyrt um nakran barna- og ungdómspolitikk. Mentamálaráðið er í løtuni í ferð við at orða ein mentanarpolitikk fyri børn og ung í Føroyum.

**Talva 41. Heldur tú at kommunan hjá tær ger nóg nógv fyri børn og ung?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Ja | 11 | 8.7 |
| Nei | 75 | 59.1 |
| Eg veit ikki | 29 | 22.8 |
| Ógreitt/onki svar | 12 | 9.4 |
| | | |
| Íalt | 127 | 100 |

Tey ungu eru ikki í iva, tá tey verða spurd um heimkommunan ger nóg nógv fyri ungdómin. 75 ung svara nei, einans 11 svara ja. Hetta er eitt heilt greitt tekin um, at ungdómsøkið ikki verður raðfest og at ungdómurin ikki verður tikin upp á ráð. Um kommunurnar kring landið høvdu eina ætlan um hvat, ið skal gerast fyri at fáa børnini á staðnum at trívast væl – ein ungdómspolitikk – so hevði støðan óivað verið øðrvísi. Tað snýr seg fyrst og fremst um at sýna virðing fyri yngru ættarliðunum. Hetta er eitt øki, ið vónandi fer at mennast nógv næstu árini.

Hóast flestu kommunurnar mangla ein barna- og ungdómspolitikk, so trívast tey flestu ungu eilt væl í heimbygdini. 52 ung siga, at ung hava tað gott í kommununi hjá sær. Men tað kann vera trupult at úttala seg um øll tey ungu í senn, og tí eru 49 ungdómar, sum ikki vita hvussu støðan er hjá børnunum í kommununi. Tað er ikki alt, ið er so lætt at eygleiða. Einans 13 meina, at børnini ikki trívast í kommununi. Tað, ið er áhugavet at spyrja her, er: Hvør skal lofta teimum, ið mistrívast, um kommunan ikki hevur nakra ætlan á økinum?

**Talva 42. Heldur tú at børn og ung hava tað gott í kommunini hjá tær?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Ja | 52 | 40.9 |
| Nei | 13 | 10.2 |
| Eg veit ikki | 49 | 38.6 |
| Ógreitt/onki svar | 13 | 10.2 |
| | | |
| Íalt | 127 | 100 |



Tey ungu, ið ganga í 8. flokki, eru rættiliga samd um at kommunan eigur at geva skúlunum hægstu raðfesting í sínum lokalpolitikki. Vegir og samferðsla koma í aðru røð. 61 prosent av teimum ungu ráða kommunalpolitikarunum til at satsa uppá útbúgving. Tey gomlu í kommununi hava ikki eins stóran áhuga, einans 9 prosent av ungdómunum meina, at ellisheim skulu fáa hægstu raðfesting. Ungdómurin umboðar framtíðina, og vitan er hin mest týðandi kapitalurin fyri samfelagið.

**Talva 43. Hvat eigur kommunan at raðfesta hægst?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Skúlar | 78 | 61.4 |
| Vegir | 21 | 16.5 |
| Ellisheim | 12 | 9.4 |
| Ógreitt/onki svar | 16 | 12.6 |
| | | |
| Íalt | 127 | 100 |

Í talvu 44 sæst, hvussu tey ungu sum heild raðfesta frítíðarlívið. Kommunan eigur, sambært 45 ungdómum, at byggja nýggj ítróttarøki. Pengar skulu setast í ítróttin fyri at fáa eitt blómandi ungdómsumhvørvi í bygdini. Tað er tó, sambært 36 ungdómum, av størri týdningi at byggja eitt ungdómshús í bygdini. Hetta meta tey vera meira tiltrongt. Átrúnaðarliga umhvørvið eigur, sambært 17 ungdómum, at setast í fokus, tá politikarar í bygdini skulu gera íløgur, ið skulu betra um korini hjá ungdóminum. Úrslitið í talvu 44 samsvarar rímiliga væl við frítíðarítrivini hjá ungdóminum í landinum.

**Talva 44. Hvat eigur kommunan at raðfesta hægst?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Ítróttarøki | 45 | 35.4 |
| Ungdómsklubbi | 36 | 28.3 |
| Kirkjur og samkomur | 17 | 13.4 |
| Musikkskúla | 10 | 7.9 |
| Ógreitt/onki svar | 19 | 15.0 |
| | | |
| Íalt | 127 | 100 |

Ungdómurin metir tað vera meira týðandi hjá kommununum at arbeiða fyri einum reinari umhvørvi enn at menna vinnulívið. Umhvørvis-politikkurin er meira týðandi enn nakar annar kommunalpolitikkur sambært 47 ungdómum. 29 ungdómar meta ungdómspolitikkin eiga at hava hægstu raðfesting í kommununi. Hetta vísir at ungdómsmentan og -politikkur ikki altíð er tað mest áhugaverda hjá ungdóminum. Tað kann víðari vera eitt tekin um, at ungdómurin hevur ein størri sjónarring enn ofta hildið. Umhvørvistrupulleikar raka okkum øll, óansæð aldur og kyn.

**Talva 45. Hvat eigur kommunan at raðfesta hægst?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Sterkari vinnulív | 12 | 9.4 |
| Reinari umhvørvi | 47 | 37.0 |
| Ungdómsmentan og -politikkur | 29 | 22.8 |
| Fleiri matstovur | 19 | 15.0 |
| Ógreitt/onki svar | 20 | 15.7 |
| | | |
| Íalt | 127 | 100 |

Í talvu 46 sæst, eins og hjá børnunum úr 3. flokki, at tey ungu helst vilja hava ein skúla við fittum og góðum lærarum. 47 prosent høvdu valt sær skúlan við bestu lærarunum heldur enn skúlan við vøkrum skúlastovum ella góðum skúlagarði. Um samskifti við lærarnar er vælvirkandi, so telja skúlakarmarnir ikki so nógv. 18 ungdómar vilja helst hava ein skúla við nýggjum teldum í øllum skúlatovunum. Tey ungu eru sera tilvitað um, hvønn leiklut teldur hava sum arbeiðsamboð í dag. Tey seta krøv til tøknina og góðskuna og vilja helst hava atgongd til nýggjastu teldurnar við bestu forritunum. Onkursvegnað kann sigast, at í dag er teldan eisini ein "lærari", sum tey ungu skulu samstarva við.

**Talva 46. Hvønn skúla hevði tú valt av hesum?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Skúlan við nýggjum flottum teldum í øllum skúlastovunum? | 18 | 14.2 |
| Skúlan við fittum og góðum lærarum | 59 | 46.5 |
| Skúlan við størsta og besta skúlagarðinum | 13 | 10.2 |
| Skúlan við vakrastu skúlastovunum við góðum borðum og stólum | 13 | 10.2 |
| Veit ikki | 10 | 7.9 |
| Ógreitt/onki svar | 14 | 11.0 |
| | | |
| Íalt | 127 | 100 |

Í talvu 47 kemur greitt til sjóndar, hvat ið næmingarnir hugsa mest um á skúlanum. Vit síggja sama mynstur sum í 3. flokki. Bókasavnið er ikki tað, ið næmingarnir virða hægst. Nógv ung brúka ongantíð bókasøvn. Einans 7 ungdómar vilja hava skúlan við tí besta bókasavninum. Harafturímóti ynskja 50 næmingar at fáa skúlan við tí bestu kantinuni. Fáir føroyskir fólkaskúlar hava tíðarhóskandi matstovur til sínar næmingar. Serliga gomlu skúlarnir mangla góð høli at brúka til matarsteðgin í skúladegnum. Ungdómarnir sakna góð høli, har tey kunnu sita og eta og práta í friði. Ein kantina hevur fleiri funktiónir – bæði til heilsu og samveru. 36 ungdómar høvdu valt sær skúlan við bestu ítróttarhøllini. Ítrótturin er, sum vit hava sæð, altíð ovarliga á ynskilistanum hjá nógvum ungdómum.

**Talva 47. Hvønn skúla hevði tú valt av hesum?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Skúlan við besta bókasavninum | 7 | 5.5 |
| Skúlan við bestu Íttrótarhøllini | 36 | 28.3 |
| Skúlan við bestu kantinuni | 50 | 39.4 |
| Skúlan, ið liggur mitt úti í náttúrini | 13 | 10.2 |
| Eg veit ikki | 6 | 4.7 |
| Ógreitt/onki svar | 15 | 11.8 |
| | | |
| Íalt | 127 | 100 |

Rokning og skriving eru kjarnufak í fólkaskúlanum, og tað eru hesi evni, tey ungu vilja læra, tá tey eru í skúlanum. Fyri at fáa eitt gott prógv og harvið atgongd til miðnámsskúlar krevst av næmingunum, at teir hava góðar førleikar innan m.a. mál og støddfrøði. Burtursæð frá tí bókliga partinum, so dámar teimum ungu væl at vera úti. At fara á útferð er altíð stuttligt. Eisini dámar næmingunum at fara út at vitja stovnar og arbeiðspláss. Tað skapar eina variatión í mun til vanligar flokstímar í skúlastovu. Nógv ung hava listargávur og ynskja at menna sínar dygdir innan tónleik og sjónleik.

**Talva 48. Hvønn skúla hevði tú valt?**

| | N | % |
|---|---|---|
| Skriving og rokning | 29 | 22.8 |
| Tónleik og sjónleik o.a | 24 | 18.9 |
| Religión og søgu | 10 | 7.9 |
| Mest úti | 27 | 21.3 |
| Eg veit ikki | 24 | 18.9 |
| Ógreitt/ikki svara | 13 | 10.2 |
| | | |
| Íalt | 127 | 100 |

Í talvu 49 sæst hvørji val tey ungu høvdu tikið, um tey vóru borgarstjóri ella bygdaráðsformaður/kvinna í heimkommununi. Og her er ongin ivi um hvat, tey ungu beinanvegin høvdu sett á ovastu dagsskrá: ungdómshús. 26 næmingar høvdu sett ungdómshúsið sum fyrstu raðfesting og 17 næmingar høvdu sett tað sum aðru raðfesting. Ungdómshúsið hevði við øðrum orðum verið stovnað rættiliga skjótt. Ungdómsdiskotek hevur eisini høga raðfesting millum ung, og hetta kann eyðsæð knýtast til eitt nýtt ungdómshús. Nógv ung høvdu viljað givið ungdóminum eitt nýtt ítróttarøki. Eisini eru fleiri, ið fyrst og fremst høvdu bygt ein nýggjan skúla til skúlabørnini. Nýtt mentanarhús er eisini nakað, ið fleiri ung ynskja sær til heimkommununa. Sum vit síggja, so er tað mesta, ið er nevnt her, partur av frítíðarlívinum. Tað er har íløgur skulu gerast. Men fólkaskúlin hevur eisini brúk fyri eina hjálpandi hond. Tónleikahús og tivoli hevur eisini sera høga raðfesting. Ein ungdómsklubbi við einum bygningi kann eyðsæð rúma nógvum av tí, ið ungdómurin nevnir sum týðandi mál fyri lokalpolitikarar at arbeiða við. Tey ungu ynskja sær list, mentan, undirhald og mangt annað.

**Talva 49. Um tú vart borgarstjóri, hvat hevði tú gjørt fyri ungdómin? (set nr. 1 og nr. 2 og nr. 3)**

| | 1 | 2 | 3 | Ikki raðfest | N |
|---|---|---|---|---|---|
| Nýtt ungdómshús | 26 | 17 | 8 | 76 | 127 |
| Nýtt tónleikahús | 7 | 12 | 6 | 102 | 127 |
| Nýggja kirkju | 0 | 1 | 1 | 125 | 127 |
| Sirkus | 2 | 1 | 2 | 122 | 127 |
| Tivoli | 8 | 7 | 7 | 105 | 127 |
| Ungdómsdiskotek | 4 | 16 | 11 | 96 | 127 |
| Nýggjan skúla | 9 | 5 | 10 | 103 | 127 |
| Nýggja telducafé | 2 | 5 | 7 | 113 | 127 |
| Nýtt mentanarhús | 7 | 1 | 2 | 117 | 127 |
| Ungdómsting | 1 | 3 | 1 | 122 | 127 |
| Nýtt bókasavn til ung | 1 | 1 | 2 | 123 | 127 |
| Nýtt listasavn til ung | 0 | 0 | 3 | 124 | 127 |
| Nýggj ungdómsbløð | 1 | 1 | 3 | 122 | 127 |
| Nýggjar heimasíður til ung | 3 | 1 | 3 | 120 | 127 |
| Nýtt ítróttarøki til ung | 8 | 12 | 12 | 95 | 127 |
| Annað | 3 | 0 | 0 | 124 | 127 |
| Onki | 0 | 0 | 0 | 127 | 127 |

Hvat skal ein ungdómur velja, um hann kann fáa 3 hypotetisk politisk ynski uppfylt? Hvat hevur størstan áhuga av tí, ið stendur á listanum, ið hann kann velja burturúr? Sum fyrsta ynski, sæst í talvu 50, ynskja flest ung at fáa heimsins besta skúla. Tað svarar fínt til Visión 2015, ið tey ungu helst hava hoyrt um. 18 persónar velja heimsins besta fólkaskúla sum fyrsta ynski. Um vit hyggja at øllum ynskjum ungdómsins, ikki bara tí fremsta ynskinum, so er tó eitt annað mál, ið vinnur: "ungdómurin, ið trívist best". Hetta er alt í alt tað mest týðandi ynskið hjá ungdóminum úr 8. flokki anno 2008. Næstan helvtin av øllum luttakarunum hava hetta sum eitt av sínum trimum politisku ynskjum. Tað er ongin loyna at ungum dámar væl at "shoppa" og brúka pengar upp á forbrúksvørur. Nógv ung hava sum ynski at fáa heimsins størsta handilsdepil til kommununa.

Eitt annað sera týðandi politisk mál er at fáa heimsins reinastu náttúru. 12 ungdómar hava hetta sum sítt fremsta ynski. Tey ungu í dag eru vaksin upp við kjakinum um umhvørvisdálking heima og úti í heimi. Eisini í skúlanum lesa og práta tey um náttúruna og hóttanirnar ímóti henni. Kjakið um veðurlagið og umhvørvið á jørðini er eftirhondini ein "natúrligur" partur av gerandisdegnum hjá okkum øllum. Tey ungu vita, at rein náttúra er fortreytin fyri so nógvum øðrum og sostatt ein spurningur, ið politikarar og onnur eiga at taka framum mangt annað. Ikki so fáir persónar hava sum ynski at fáa heimsins ríkasta land. Vælferðin í samfelagnum er eisini nakað, ið nógv ung seta í samband við trivnaðin hjá børnum og ungdómi. Hvussu nógv ungdómurin hevur hugsað um býtið av ríkidøminum millum fólk er so ein annar spurningur.

**Talva 50. Tú fært 3 politisk ynski uppfylt – hvørji velur tú? (set nr. 1 og nr. 2 og nr. 3)**

| | 1 | 2 | 3 | ikki raðfest | N |
|---|---|---|---|---|---|
| Altjóða flogvøll | 2 | 4 | 3 | 117 | 127 |
| Heimsins størsta handilsdepil | 13 | 7 | 8 | 99 | 127 |
| Heimsins longsta undirsjóvartunnil | 5 | 3 | 1 | 118 | 127 |
| Heimsins besta fólkaskúla | 18 | 10 | 7 | 92 | 127 |
| Heimsins besta listaskúla | 2 | 0 | 0 | 125 | 127 |
| Heimsins besta ítróttarskúla | 11 | 8 | 7 | 101 | 127 |
| Heimsins besta tónleikaumhvørvi | 5 | 4 | 5 | 113 | 127 |
| Heimsins størsta biograf | 1 | 5 | 5 | 115 | 127 |
| Heimsins kendasta náttklubba | 1 | 4 | 6 | 114 | 127 |
| Heimsins ríkasta land | 3 | 12 | 10 | 102 | 127 |
| Heimsins reinastu náttúru | 12 | 9 | 11 | 95 | 127 |
| Ungdómin, ið trívist best | 10 | 19 | 20 | 78 | 127 |

Tá tosað verður um raðfestingar, so er talan ofta um, hvussu pengarnir hjá kommununi ella landinum skulu brúkast og spjaðast. Hvat hava vit ráð til, er vanligur spurningur, ið verður settur. Hvat skal gerast nú, hvat kann bíða. Um tey ungu høvdu valdið og skuldu gjørt politiskar raðfestingar, so høvdu flest teirra koyrt 10 milliónir í barna- og ungdómsarbeiðið. Hetta er umráðandi arbeiði, ið ikki eigur at undirmetast. Men *eitt* annað øki, sæst í talvu 51, hevur eins stóran týdning, sambært ungdóminum í kanningini. Neyðhjálpararbeiðið hevði eisini fingið 10 milliónir handað frá ungdóminum. Her kann ikki sigast annað enn, at børn og ung hava heilt aðrar raðfestingar enn tey, ið veruliga sita við valdinum í samfelagnum. Ungdómurin hevur vent myndini á høvdið. 79 ung høvdu bjóðað ungdómsmentanini og/ella neyðhjálpina 10 milliónir krónur. Eisini eru nógv ung, ið hugsa um skúlan og heilsuverkið, tá pengar skulu játtast til góð endamál. Tey gomlu er heldur ikki gloymd. Ungdómurin hugsar við øðrum orðum mest um tey veiku í samfelagnum – í Føroyum og úti í heimi.

**Talva 51. Tú fært 3 politisk ynski uppfylt – hvørji velur tú?**

| | 1 | 2 | 3 | ikki raðfest | N |
|---|---|---|---|---|---|
| 10 milliónir til privata vinnulívið | 4 | 3 | 7 | 113 | 127 |
| 10 milliónir til oljuleiting | 5 | 3 | 2 | 117 | 127 |
| 10 milliónir til tunlar | 10 | 3 | 6 | 108 | 127 |
| 10 milliónir til neyðhjálp | 21 | 10 | 9 | 87 | 127 |
| 10 milliónir til mentan og bøkur | 1 | 3 | 3 | 120 | 127 |
| 10 milliónir til sjúkrahúsini | 6 | 17 | 13 | 91 | 127 |
| 10 milliónir til barna- og ungdómsmentan | 20 | 12 | 7 | 88 | 127 |
| 10 milliónir til skúlan | 12 | 12 | 10 | 93 | 127 |
| 10 milliónir til kirkjuna | 0 | 2 | 4 | 121 | 127 |
| 10 milliónir til tey gomlu | 2 | 13 | 16 | 96 | 127 |
| 10 milliónir til umhvørvið | 6 | 10 | 7 | 104 | 127 |
| 10 milliónir til vápn | 1 | 0 | 4 | 122 | 127 |

Um vit her halda fram við at geva ungdóminum leiklutin sum politiskur leiðari við alstórum avgerðarrætti, so sæst, at ungdómspolitisk mál ganga á odda. Hóast hetta ikki er serliga óvæntað, tá tað er ungdómurin sjálvur, ið tekur avgerðirnar, so er tað av týdningi at fáa staðfest, at stórur tørvur er á tíðarhóskandi innsatsi innan ungdómsmentan og -politikk í Føroyum. Talan er um at viðurkenna og stuðla ein samfelagsbólk, ið hevur eina lutfalsliga veika støðu í samfelagnum anno 2008. Í talvu 52 hava 46 ungdómar sett fram ynski um at fáa fleiri útbúgvingartilboð til ungdómin.

Alt kostar pengar, vita vit, og nógv ung hava fáar pengar samstundis, sum tey vilja keypa mangt og hvat. Tey flestu í 14-15 ára aldri hava onki arbeiði í frítíðini hjá sær og harvið onga inntøku til privat forbrúk. Sera ymiskt er, hvussu nógvar "lummapengar" tey ungu fáa frá foreldrunum. Heili 53 persónar ynskja, at ung fáa avsláttur í sambandi við keyp av vørum og tænastum. Tað hevði hjálpt nógvum børnum og familjum í landinum. Ungdómar hava ofta eitt stórt forbrúk av vørum, ið tey knýta til sínar lívsstílar og síni virði. Mentanarligi samleikin hjá nógvum ungdómum er knýttur at merkjavørum og serligum brúkaramynstrum.

**Talva 52. Tú fært 3 politisk ynski uppfylt – hvørji velur tú? (set nr. 1 og nr. 2 og nr. 3)**

| | 1 | 2 | 3 | ikki raðfest | N |
|---|---|---|---|---|---|
| **Meira politisk vald til ungdómin** | 10 | 3 | 6 | 108 | 127 |
| **Fleiri mentanartilboð til ungdómin** | 10 | 5 | 5 | 107 | 127 |
| **Fleiri útbúgvingartilboð til ungdómin** | 26 | 11 | 9 | 81 | 127 |
| **Fleiri inntøkumøguleikar til ungdómin** | 1 | 9 | 11 | 106 | 127 |
| **Fleiri hús/pláss til ungdómin í bygdini** | 9 | 16 | 8 | 94 | 127 |
| **Fleiri bústaðir til ungdómin** | 4 | 6 | 9 | 108 | 127 |
| **Fleiri sendingar til ung í útvarpi/sjónvarpi** | 3 | 11 | 6 | 107 | 127 |
| **Lægri prísir til ung (avsláttur)** | 20 | 15 | 18 | 74 | 127 |
| **Betri ráðgeving til ung (sosial, kynslig, juridisk..)** | 0 | 6 | 8 | 113 | 127 |
| **Rættindini hjá børnum/ungdómi betrast** | 2 | 4 | 7 | 114 | 127 |
| **Bókasøvnini hava longri opningstíðir** | 2 | 0 | 2 | 123 | 127 |
| **Ung sleppa ókeypis inn á (lista)søvn** | 2 | 0 | 2 | 123 | 127 |

Í talvu 53 fáa tey ungu úr 8. flokki nøkur heilt onnur viðurskifti at taka støðu til. Her eru tey eisini "politikarar", ið skulu velja, men evnini eru fjølbroytt og kanska trupul at samanbera. Spurningurin kann eisini tulkast sum boðskapurin hjá 12 politikarum, ið tosa til ungdómin. Úrslitið vísir, at tað mest týðandi fyri ungdómin er at fáa betri verju ímóti kynsligum ágangi. Hetta er eitt sera álvarsamt mál, ið tey ungu kenna, antin úr almennum kjaki ella gjøgnum persónligar royndir. Eisini eru nógv, ið hava vinir og kenningar, ið hava verið fyri kynsligum ágangi. Nógv børn og ung eru offur, men evnið er kenslusamt, eitt tabu og tískil sjáldan tikið fram til opið kjak. Føroyska samfelagið er tætt og lítið, og tað kann vera sera trupult hjá børnum og ungum at finna nakran, ið kann lurta eftir teimum og geva teimum hjálp.

**Talva 53. Tú fært 3 politisk ynski uppfylt – hvørji velur tú? (set nr. 1 og nr. 2 og nr. 3)**

| | 1 | 2 | 3 | ikki raðfest | N |
|---|---|---|---|---|---|
| Ung almennan umboðsmann, Ið verjir rættindi teirra | 8 | 3 | 5 | 111 | 127 |
| Ung við til at orða ein ungdómspolitikk | 8 | 4 | 3 | 112 | 127 |
| Ung betri vard ímóti happing frá vaksnum | 13 | 8 | 7 | 99 | 127 |
| Ung betri vard ímóti kynsligum ágangi | 18 | 14 | 9 | 86 | 127 |
| Ung betri og bíligari mat í skúlunum | 9 | 14 | 3 | 101 | 127 |
| Ung betri undirvísing um trivnað, heilsu og samskifti í skúlunum | 9 | 14 | 8 | 96 | 127 |
| Ung betri undirvísing um kynslív í skúlunum | 4 | 5 | 18 | 100 | 127 |
| Valrættaraldur niður í 16 ár | 2 | 4 | 4 | 117 | 127 |
| Valrættaraldur niður í 14 ár | 0 | 3 | 1 | 123 | 127 |
| 16-ára gomul fáa koyrikort til bil | 8 | 6 | 8 | 105 | 127 |
| Ung undir 20 ár fáa ikki koyrikort til bil | 1 | 1 | 6 | 119 | 127 |
| Fleiri bussleiðir og fleiri túrar hvønn dag | 4 | 10 | 17 | 96 | 127 |

Í talvu 53 sæst eisini, at ungdómurin ynskir betri undirvísing um trivnað, heilsu og samskifti í fólkaskúlanum. Hetta eru viðurskifti, ið tey ungu hugsa nógv um. Viðhvørt tykist, sum um tey ungu vita meira um, hvat ið er forteytin fyri trivnaði, enn tey vaksnu gera. Eitt gott samskifti við lærarar og onnur vaksin fólk er t.d. ein fortreyt fyri, at tey ungu kunnu kenna seg vard ímóti ágangi. Samskifti inniber m.a. at tey ungu merkja, at tey hava vaksin fólk, ið tey hava álit á og kunnu tosa í trúnaði við. Hetta er serliga umráðandi hjá børnum og ungdómum, ið koma úr heimum, har samskiftið millum børn og foreldur als ikki fungerar. Nógv ung, 28 í tali, hava eisini sett fram ynski um at verða betri vard ímóti happing frá vaksnum. Børn, ið ikki fáa virðing sum sjálvstøðug menniskju við grundleggjandi rættindum, missa skjótt sjálvsálitið og fara at mistrívast. Hetta er enn eitt prógv um, hvussu týðandi tað er at fáa eitt javnt samskifti, uttan valdsnýtslu, millum børn og vaksin, ið taka sær av teimum á almennum stovnum.

**Talva 54. Í Føroyum hava vit ein sera góðan mentanarpolitikk fyri ung**

| | N | % |
|---|---|---|
| Heilt samdur | 2 | 1,6 |
| Nokkso samdur | 18 | 14,2 |
| Ivasamur | 47 | 37,0 |
| Nokkso ósamdur | 24 | 18,9 |
| Heilt ósamdur | 23 | 18,1 |
| Ógreitt/onki svar | 13 | 10,2 |

Mentanarpolitiskt er ikki komið á mál, tá hugsað verður um ungdómin. Tað meina tey ungu í øllum førum sjálvi. Tey eru als ikki nøgd við støðuna og hava ilt við at skilja, hví tey ikki skulu takast upp á ráð viðvíkjandi ungdómspolitikkinum í landinum. Einans tveir persónar útav 127 meina, at vit hava ein góðan mentanarpolitikk fyri ung í Føroyum í dag. Talva 54 vísir úrslitini, ið kunnu tulkast sum eitt mótmæli. 47 persónar eru (nokkso ella heilt) ósamdir við útsagninum ”í Føroyum hava vit ein sera góðan mentanarpolitikk fyri ung”.  Nógv eru ivasom. Ein genta sigur, at hon er ikki so áhugað í mentan. Ein persónur er ónøgdur við dansiviðurskiftini: ”Tað er 18 ára aldursmark allastaðni fríggja- og leygarkvøld!!! Deyðakeðiligt”. Ein onnur ónøgd rødd sigur, at tað er ”ov lítið at fara til í frítíðini”. Tó eru onnur ung, ið meina at ung hava tað gott í Føroyum samanborið við støðuna aðrastaðni, hóast mentanarpolitikkurin møguliga manglar. Ein ungdómur sigur: ”Í Føroyum er tað ikki líka nógvur kriminalitetur ímillum ung – men manglar enn meira ungdómshús”.



Í talvu 55 verður eitt sindur argandi spurt, um tað er óneyðugt at hava nakran mentanarpolitikk fyri ung. Tey flestu eru ósamd. 54 persónar eru heilt ósamdir, meðan 10 eru heilt samdir. 27 ungdómar ivast. Mentanarpolitikkur er ikki tað, sum ungdómar tosa mest um í gerandisdegnum, og tað eru nokkso nógv, ið als ikki hava nakra meining um evnið.

**Talva 55. "Í Føroyum er óneyðugt at hava nakran mentanarpolitikk fyri ung"**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Heilt samdur** | **10** | **7,9** |
| **Nokkso samdur** | **7** | **5,5** |
| **Ivasamur** | **27** | **21,3** |
| **Nokkso ósamdur** | **15** | **11,8** |
| **Heilt ósamdur** | **54** | **42,5** |
| **Ógreitt/onki svar** | **14** | **11,0** |

Ofta verður í fjølmiðlunum sagt, at tey ungu í Føroyum hava tað era gott. Tey eru sunn og frísk, glað og jalig. Men er tað soleiðis ungdómurin sjálvur lýsir sítt lív? Tey ungu hava nógvar viðmerkingar til spurningin. Í Vági sigur ein ungdómur: "Ikki her í bygdini. Her er onki at gera um dagarnar". Ein annar ungdómur sigur at "øll hava eitt heim", men, sigur ein triðji persónur, "ikki nógv at fara til!". Nógv ung hava tryggar karmar og góða familju, men sakna eitt meira fjølbroytt frítíðarlív. Ein genta sigur t.d.: "Eg hevði verið heilt samd, um tað hevði verið meiri tiltøk at farið til". Tey ungu vita væl at tey eru sera heppin, tá hugsað verður um vælferð og trygd, men lokalsamfelagið tykist teimum ofta ov einsháttað. "Tí tað er so friðarligt, men ikki annars", er stutta svarið hjá einum ungdómi úr Eysturoynni. Tey ungu duga at víðka sjónarringin og seta tingini í eini størri heild. Ein genta svarar: "Børnini í teimum fátæku londunum hava tað ringt". Tá fólk skulu siga, um tey hava tað gott ella ringt, so verður svarið eyðsæð sterkt ávirkað av kontekstinum. Í mun til hvønn? Tey ungu kenna nógv til umheimin, tí tey brúka modernaðar miðlar, ið geva teimum upplýsingar um lívið hjá ungdómum í fremmandum londum. Tey knýta seg til ungdómsmentanarlig rák, ið røkka kring allan heim. Hetta ávirkar eisini teirra kenslur og áskoðanir mótvegis heimstaðnum.

**Talva 56. "Í Føroyum hevur ungdómurin tað nógv betri enn aðrastaðni"**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Heilt samdur** | **16** | **12,6** |
| **Nokkso samdur** | **33** | **26,0** |
| **Ivasamur** | **35** | **27,6** |
| **Nokkso ósamdur** | **16** | **12,6** |
| **Heilt ósamdur** | **13** | **10,2** |
| **Ógreitt/onki svar** | **14** | **11,0** |

Familjan er hornasteinurin í føroyska samfelagnum. Føroyingar flest hava eitt tætt tilknýti til sína familju – bæði kensluliga og sosialt. Ein stórur partur av tí sosiala netverkinum hjá einstaklingum er samstundis familjubond, ið verða røkt. Soleiðis hevur verið í fleiri øldir. 41 prosent av ungdómunum í kanningini eru heilt samd í útsagninum: ”Í Føroyum hava tey ungu eina góða familju, ið stuðlar teimum gjøgnum lívið”. 28 prosent eru nokkso samd, meðan 10 prosent av ungdómunum eru ivasom. Einans 6 prosent eru heilt ósamd. Tó hava tey ungu nógvar viðmerkingar, ið vísa, at tey vita, at tað altíð eru undantøk. Ein ungdómur úr høvuðsstaðnum sigur t.d.: ”vit generalisera alt ov nógv á hasum økinum”. Ein annar persónur hugsar um familjuskipanina og sigur, at ”ikki øll hava 2 foreldur”. Ein genta mótmælir eisini einfaldum niðurstøðum: ”Tað eru bæði ringar familjur og góðar, tað er ymist”.

**Talva 57. ”Í Føroyum hava tey ungu eina góða familju, ið stuðlar teimum gjøgnum lívið”**

| | N | % |
|---|---|---|
| Heilt samdur | 52 | 40,9 |
| Nokkso samdur | 36 | 28,3 |
| Ivasamur | 13 | 10,2 |
| Nokkso ósamdur | 6 | 4,7 |
| Heilt ósamdur | 7 | 5,5 |
| Ógreitt/onki svar | 13 | 10,2 |

Ungdómsmentanin í Føroyum blómar. Hetta er vanlig yvirskrift í føroysku bløðunum, júst eftir at áhugaverd konsert ella líknandi ungdómstiltak hevur verið á skránni. Tey vaksnu eru hugtikin av avrikinum hjá ungdóminum og rósa ættarliðinum til skíggja. Hvat siga tey ungu til hetta? ”Forferdeligt tvætl”, sigur ein genta um yvirskriftina. Ein annar ungdómur svarar, at tað ger ungdómsmentanin ”slett ikki”. Tað eru nógv skapandi ung, ið fáast við mentan, uttan iva, men ”tað mugu vera meira spennandi tilboð”, sigur ein 15-ára gamal drongur. Tað eru serliga tey ónøgdu, ið hava gjørt viðmerkingar til spurningin, tí sambært talvu 58 eru tey flestu ungu hvørki heilt samd ella ósamd. Tey flestu ivast og hava kanska ringt við at geva dóm.

**Talva 58. ”Ungdómsmentanin í Føroyum blómar”**

| | N | % |
|---|---|---|
| Heilt samdur | 6 | 4,7 |
| Nokkso samdur | 18 | 14,2 |
| Ivasamur | 59 | 46,5 |
| Nokkso ósamdur | 19 | 15,0 |
| Heilt ósamdur | 9 | 7,1 |
| Ógreitt/onki svar | 16 | 12,6 |




Helvtin av ungdómunum í kanningini eru samd í, at ov fá mentanartilboð eru til ung í Føroyum. Einans 4 persónar eru heilt ósamdir. ”Í teimum smáu bygdunum er onki”, sigur ein drongur. Ein ungdómur í Suðuroynni spyr: ”Hví gera tey onki við tað?” Her er ein breið semja um, at støðan ikki er nøktandi og at okkurt átti at verðið gjørt fyri at fáa ungdómin at trívast betri í sínum umhvørvi.

**Talva 59. ”Alt ov fá mentanartilboð eru til ung kring landið”**

| | N | % |
|---|---|---|
| Heilt samdur | 32 | 25,2 |
| Nokkso samdur | 37 | 29,1 |
| Ivasamur | 31 | 24,4 |
| Nokkso ósamdur | 9 | 7,1 |
| Heilt ósamdur | 4 | 3,1 |
| Ógreitt/onki svar | 14 | 11,0 |

Tey flestu í 14-15 ára aldri eru samd um, at ov lítið er av virksemi til ungdómar, ið ikki ganga til ítrótt ella møti. 35 prosent eru heilt samd, meðan 13 prosent eru heilt ósamd. Ítrótturin og samkomurnar hava ikki nógv í felag burtursæð frá tí, at í fleiri kommunum kring landið er onki annað frítíðartilboð til børnini og ungdómin. Tey ungu hava nógv áhugaverd sjónarmið viðvíkjandi útsøgnini í talvu 60. Nógv ung hava sterkar kenslur og meiningar um evnið. ”Tey kunnu fara til nógv annað”, sigur ein persónur, ið ikki sær nakran trupulleika í hesum. ”Tað er teirra feilur”, sigur ein annar ungdómur, ið harvið leggur ábyrgdina á ungdómin, ið ikki gongur til ítrótt ella átrúnaðarligt frítíðarvirksemi. Ein genta sigur hinvegin: ”púra samd, men eg kann ikki úttala meg so nógv, tí eg geri bæði”. Ein drongur metir, at hesi ungu umboða umleið helvtina av ættarliðnum. Fleiri ung eru ikki heilt samd, og nevna onnur frítíðartilboð, ið eru til ungdómin: ”Tey kunnu eisini ganga til skótar, ið umboðar mentan uttanlands”, sigur ein persónur. Fleiri ungdómar nevna ungdómshús, ið tey vóna kunnu setast á stovn fyri at fylla eitt ”tómrúm” í mentanarliga umhvørvinum í kommununum kring landið. Onnur nevna tónleikin sum eina loysn. ”Tað eru nógvir møguleikar innan fyri tónleik”, sigur ein drongur úr Eysturoynni. Tey, ið íðka ítrótt, meta ofta, at tað er tann besta leiðin at fara hjá øllum ungdómum. Ein genta sigur: ”Gangi til ítrótt, so eg keði meg ikki nógv”. Ein onnur sigur: ”Um man ikki íðkar ítrótt ella gongur á møti, so eru ikki nógvir aðrir mátar at møta onnur ung”.

**Talva 60. ”Tey ungu, ið ikki íðka ítrótt ella ganga á møti, hava onki at fara til”**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Heilt samdur** | **44** | **34,6** |
| **Nokkso samdur** | **24** | **18,9** |
| **Ivasamur** | **19** | **15,0** |
| **Nokkso ósamdur** | **11** | **8,7** |
| **Heilt ósamdur** | **16** | **12,6** |
| **Ógreitt/onki svar** | **13** | **10,2** |

Tey ungu meina, at nógv ung keða seg og eru einsamøll. Ikki *ein* einasti persónur er heilt ósamdur í útsagninum ”Nógv ung í Føroyum keða seg og kenna seg einsamøll”. Umleið 58 prosent eru samd, meðan 24 prosent eru í iva. Úrslitið í talvu 61 samsvarar væl við nógvum av tí, sum ungdómurin hevur sagt um trivnað, frítíð og mentan. Nógv keða seg, tí at tey mangla tilboð á heimstaðnum. Onnur keða seg, tí tey ikki hava ráð at luttaka í frítíðarvirkseminum, ið onnur ung brúka tíð til. Nógv keða seg, sigur ein drongur á Sandi, ”tí alt kostar pengar og næstan ongin hevur yvirflóð av tí”.

**Talva 61. ”Nógv ung í Føroyum keða seg og kenna seg einsamøll”**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Heilt samdur** | **36** | **28,3** |
| **Nokkso samdur** | **37** | **29,1** |
| **Ivasamur** | **30** | **23,6** |
| **Nokkso ósamdur** | **12** | **9,4** |
| **Heilt ósamdur** | **0** | **0** |
| **Ógreitt/onki svar** | **12** | **9,4** |

Tveir triðingar av ungdóminum meina, at politikarar vita ov lítið um ungdómin í Føroyum. Einans 3 prosent, tað er 4 persónar, eru ósamd í hesum. Ein ungdómur sigur, at teir bara hugsa ”um tey hørðu virðini”. Sostatt vísa tey ungu, at tað ikki er tilvild, ið ger at ungdómurin ikki kemur ovast á politisku dagsskránna. Tvørturímóti er tað tí, at tey ikki umboða sonevnd ”hørð” virði. Ein 14-ára gomul genta sigur, ”ja, teir tonkja bara uppá tunlar og blabla…”. Atfinningarnar eru harðar og greiðar. ”…Teir vita f.. ikki hvat okkum tørvar!”, sigur ein ónøgdur unglingi. Aðrar røddir siga, at politikarar ikki vita nóg nógv um yngru ættarliðini í samfelagnum, ”tí annars høvdu teir gjørt meira fyri ungdómin…”. Úrslitið í talvu 62 kann møguliga sigast at vera ávirkað av orðingini í spurninginum – setningurin leggur upp til eitt serligt svar – men hinvegin fellur úrslitið væl inn í heildarúrslitið í verkætlanini.



**Talva 62. ”Politikarar vita ov lítið um ungdómin í Føroyum”**

| | N | % |
|---|---|---|
| Heilt samdur | 55 | 43,3 |
| Nokkso samdur | 27 | 21,3 |
| Ivasamur | 28 | 22,0 |
| Nokkso ósamdur | 2 | 1,6 |
| Heilt ósamdur | 2 | 1,6 |
| Ógreitt/onki svar | 13 | 10,2 |

Í talvu 63 sæst at næstan tveir triðingar av ungdómunum í kanningini eru samd um, at tey ungu ikki verða hoyrd í føroyskum politiskum kjaki. 25 prosent eru í iva og 5 prosent eru ósamd. Tó eru fleiri, ið hava viðmerkingar til útsøgnina. Persónligu viðmerkingarnar hjá ungdóminum vísa ofta, at tað er torført at vera samdur ella ósamdur (uttan nakað fyrivarni) við hypotesurnar. Veruleikin er ikki so einfaldur. Ein persónur úr Norðuroyggjum sigur t.d. ”ung skulu vera ung og nýtast tí ikki at vera innblandað í politikki, haldi eg”. Ein annar persónur minnir á, at ”tað hevur verið skipað fyri ungdómstingi nakrar ferðir”.  Ein eyðmjúkur unglingi sigur, at ”tey ungu kunnu eisini hava góðar meiningar”. Ein persónur úr Vágum hugleiðir um aldursbólkarnar í samfelagnum: ”Politikarar skulu lurta meira eftir tey ungu ístaðin fyri `tey gomlu´, ung eru jú framtíð Føroya”. Tað er týðiligt at síggja, at tey ungu, hóast tey ynskja at fáa eina rødd í politiskum kjaki, ikki er serliga kollveltingarsinnað. Tey er samd í at ymisk politisk viðurskifti kundu verið øðrvísi, men tey seta ikki serliga stór krøv.

**Talva 63. ”Tey ungu verða ikki hoyrd í politikki í Føroyum”**

| | N | % |
|---|---|---|
| Heilt samdur | 44 | 34,6 |
| Nokkso samdur | 30 | 23,6 |
| Ivasamur | 32 | 25,2 |
| Nokkso ósamdur | 5 | 3,9 |
| Heilt ósamdur | 1 | 0,8 |
| Ógreitt/onki svar | 15 | 11,8 |




Næmingarnir í 8. flokki meta, at nakrar ungdómsmentanir í landinum eru ráðandi og seta dagsskránna. Sostatt eru ung, ið ikki hoyra til hesar høvuðsbólkarnar innan ungdómslívið, onkursvegnað ”gloymd” ella ósjónlig í samfelagnum. Sambært talvu 64 eru 36 prosent av teimum ungu samd í, at ”nógv ung (ið ikki hoyra til `vanliga´ ungdómsmentan) eru gloymd í Føroyum…”. 6 prosent eru ósamd í hesum. Sera nógv ung, 35 prosent, eru ivasom. Tey hava ikki nakra serliga meining um evnið. Ein persónur sigur t.d. ”mentan er ikki mín áhugi”.

**Talva 64. ”Nógv ung (ið ikki hoyra til `vanliga´ ungdómsmentan) eru gloymd í Føroyum…”**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Heilt samdur** | **31** | **24,4** |
| **Nokkso samdur** | **28** | **22,0** |
| **Ivasamur** | **44** | **34,6** |
| **Nokkso ósamdur** | **5** | **3,9** |
| **Heilt ósamdur** | **3** | **2,4** |
| **Ógreitt/onki svar** | **16** | **12,6** |

Í talvu 65 sæst, at 35 prosent av ungdóminum í 14-15 ára aldri droymir um at fáa eitt spennandi lív við nógvum upplivingum. 28 prosent av ungdóminum hugsar harafturímóti mest um at læra nógv og fáa eina góða útbúgving. 7 prosent hava nakað heilt annað í huga, tá framtíðin er í tonkunum: at blíva ríkur og kendur. Her sæst, at hóast børn og ung í Føroyum hugsa nógv um skúla og læring, so eru onnur virði, ið viga mest. Ung vilja gjarna hava eina góða útbúgving, ið gevur atgongd til áhugaverd størv, men starsleiðin skal síðan helst geva teimum spennandi upplivingar og annað. Tey ungu ynskja at fáa royndir á nógvum økjum. Tað eru eisini ung, ið hava sera ítøkilig mál og mið fyri framtíðina. Ein unglingi sigur, ”eg hugsi um H71”. Hesin veit hvat, hann vil.

**Talva 65. Framtíðin hjá tær - hvat hugsar tú mest um?**

| | N | % |
|---|---|---|
| **Eg vil læra nógv og fáa góða útbúgving** | **36** | **28.3** |
| **Eg vil uppliva nógv og hava eitt spennandi lív** | **45** | **35.4** |
| **Eg vil skapa nakað - mála, tekan, skriva o.s.fr.** | **7** | **5.5** |
| **Eg vil bílva kendur og ríkur** | **9** | **7.1** |
| **Eg veit ikki** | **7** | **5.5** |
| **Ógreitt/onki svar** | **23** | **18,2** |
| | | |
| **Íalt** | **127** | **100** |

Tey ungu hava nógv áhugavert uppá hjartað, tá tey verða biðin um at fortelja, hvat er mest týðandi, fyri at fáa ungdómin í landinum at trívast og vera sterkur og glaður. Her eru dømi tikin úr hópinum:

- Allir skúlar í Føroyum skuldu havt 1 tíma í ítrótti um dagin, og undirvíst í 2-3 tímar um happing um vikuna
- Hava okkurt at gera í frítíðini og ein high-tech skúla :)
- Byggja ungdómshús, skapa nýggj og spennadi tiltøk fyri ung
- At vit fáa meira at gera her. Her er næstan onki, her er ONKI lív í FØROYUM
- Kundu gjørt okkurt í teimun smærri bygdunum so sum ungdómshús og tílíkt. Tey flestu sita bert inni. Hyggja sjónvarp, kjatta og lurta musikk. Soleiðis fer mín dagligdagur fram. Politikarinir hugsa bert um at gera tunlar og sovorði hørð virði
- At tey hava tað gott, ella er tað ikki viktigt? Finna uppá okkurt, øll kunnu gera
- Nýggjan skúla og ongin happing fer fram í skúlanum. Nýggj ítttrótarhús og ungdómshús + eina reina bygd
- Fyri at ung skulu trívast mugu tey helst hava vinir, og tað fær man ofta ígjøgnum síni frítíðarítriv. Her í bygdini er einki at fara til. Dámar tær ikki fótbólt ella svimjing, mást tú fara onkra aðrastaðni, tí her er einki annað. Ikki eingong ungdómshús. Ung í Vági sita inni allan dagin, uttan tey ið venja okkurt, tey eru úti nakrar tímar
- Happing verður steðgað!

- Ein týðandi lutur í at trívast er, at tey hava nakað innihald í lívinum, okkurt at gera, og ikki bert sita heima t.d...men ofta eru ongi tilboð, sum tey kanska hava áhuga í
- Eitt ungdómshús, Eina telducafé, eitt tivoli. Nú vet eg ikki meir
- Arbeiði hevur fyrst og fremst nógv at siga
- Tey, sum ongar/næstan ongar pengar hava til heim og mat, altso familjur og t.d. einligar mammur
- Gera fleiri støð, hvar ið tey ungu kunu halda til
- At fáa nógv meira til Føroyar, meira ting og alt
- At hava okkurt stuttligt fyri ung t.d. tivoli og eitt stórt flott stadion
- Tað skulu gerast fleiri ungdómshús til eftir skúlatíð og til um kvøldið. Har burdi man kunnað sloppið inn bíliga at spæla teldu, billard og hyggja eftir film
- At ung fáa betri skúlar og studentaskúlar og ikki brúka pengarnar uppá tunlar til Sandoy !!!
- Drop it all! Tunlar! hugsa um skúlar, betri tilboð til útbúgving
- At tey ikki keða seg, og hava okkurt at gang til sum tey tíma ordiliga gott
- At vit fáa góðar skúlar og hava okkurt at fara til aftaná skúlatíð
- At vit fáa eitt nýtt ungdómshús, har øll føla seg vælkomnan. PS: Scootara-loyvið sum fimtan ára gomul
- At hava meira tiltøk til ung millum 14 og 18 ár, so tað ikki eru so nógv, sum keða seg
- Vit skulu hava meira at fara til og trívast væl
- Eitt stað har ungdómurin kann samlast, tað behøvist ikki at vera so stórt, bara eitt lítið fitt ungdómshús, har ungdómurin kan samlast, serliga í Kaldbak
- At lærarar hjálpa teimum vi tí í skúlanum, t.d. happing. Og at ung fáa betri møguleika at siga sína meining um okkurt - mentan, ítrótt, vinir og tílíkt. Tað burdi eisini verið betri undrvísing. Fleiri tiltøk í vikuskiftinum, so vit ungu kunnu hava tað stuttligari og meira spennandi við vinunum
- At fáa meir tiltøk í Havn og at tað ikki kostar so nógv, gera eitt nýtt størri SMS, sum er annað enn bara SMS".
- At hava eina góða familju, at kenna bæði síni foreldur, sjálvt um tey búgva í øðrum londum og at ung skulu hava okkurt at fara til í vikiskiftinum
- Tað skulu vera fleiri tiltøk til ung í Føroyum og fleiri ítróttarpláss og betri umhvørvi á Eysturskúlanum Her er bara cement og betong (Reint sagt: skúlin stinkar her!)
- Politikararnir kundu tosa við tey ungu ella rættari sagt, latið tey ungu tosa við teir uttan at altíð skula tosa og siga sovorðin orð, sum eingin skilir kortini. Teir kundu eisini steðga eina løtu við at tosa um olju og tunlar og vegir allatíðina. Stutt sagt er tað ONKI til tey ungu í Føroyum
- Fáa sunnar og góðar kantinur í allar skúlar, ið er nóg stórir til tað. Hava DJ-show fyri ung í Havn
- Tað hevði glett meg og nógv onnur í Vágum, um vit høvdu fingið eitt ríðihøli í Vágum. Tí fólk klaga, um vit ríða í bygdini. Men vit hava einki annað stað at ríða, eitt ríðihøli hevði eisini gjørt interessuna fyri rossum størri! PS Eitt høli, har man kann trena øll gonguløgini!"

- Eg haldi, at tað burdi verið líka í Føroyum sum í øðrum londum, so sum ríðiskúlar, dansiskúlar, og nógv annað hevði verið gott at havt í Føroyum. Og havt sentur og annað í fleiri bygdum ikki at alt er í Havn. Og fingið eitt ríðihøli við ríðibreyt uttan fyri og havt eitt felagsfjós, so hevði interessan fyri rossunum verðið størri
- Tað skuldi verið meira av ungdómstiltøkum, Teenage-sms skuldi verið tvær ferðir um árið, einaferð í apríl og einferð í oktober, og fingið eina skoytihøll í bygdini
- Eg haldi at øll skulu hava tað gott, og hava okkurt at fara til. Man skal hava ungdómshús í bygdum, og eisini onkur tiltøk til ung...
- At hava okkurt at fara til. Fleiri sendigar til ung. Tiltøk til ungdómin
- Nýggjar skúlar. Kantinu.  Betri ítróttarøki. Fleiri handlar, og fleiri matstovur. Ungdómsdiskotek til tey, sum eru undir 19 og ikki til tey, sum longu hava koyrikort og koyra skít full
- Gera nógv ungdómshús og gera tað, sum ungdómurin vil hava, og koyra koyrikortið til knallert niður á 14 ár
- At tey kunnu fáa góða hjálp og ráðgeving, um tey eru út fyri onkrum ringum ella tey ikki hava tað gott heima. At vit hava okkurt at gera. At vit kunnu ganga til fleiri sløg av tónleiki og list. Eitt "ungdómsvinarligt" umhvørvi. Betri umstøður í skúlanum
- At ung sleppa at brúka teirra talentir og ongin/onki skal forða teimun, At ung sleppa at vera tey tey eru
- Fáa tey at ganga á møti og ikki ganga úti í býnum og drekka ... :)
- Skapa meira samanhald – t.d. hava pyjamasparty í skúlanum fyri at styrkja samanhaldi í flokkinum. Gera tónleikabólkar, sum ung spæla við, íttróttarkappingar, t.d. mikudag, hósdag og fríggjardag til bara at styrkja samanhald í flokkinum, við íttrótarkappingum, tónleiki og øðrum
- At tað er nóg nógv at gera fyri ung bæði á bygd og í bý. Annars haldi eg, at tað er umráðandi fyri ung, at tað er onkrastaðni, har man kann fáa eina útbúgving, men tað skal vera í Føroyum
- At hugsa um, hvat vit mangla. Serliga úti á bygd hava vit lítið og onki at gera um vikuskiftini. Náttarlívið manglar fyri ung undir 18 ár. Vit burdu eisini havt fleiri valmøguleikar, tá tað kemur til útbúgving. Ìttrótturin burdi eisini fingið betri stuðul frá landinum
- Góðar umstøður til ítrótt! Men annar haldi eg, fyr at fáa gott samanhald í einum flokki, at man burdi, havt ein dag í árinum har man gjørdi okkurt stuttligt. T.d. rappelaði - kavaði ella fór út í hagan, Tað burdi eisni veri gjørt meira burturúr fimleiki her vestri!
- At øll hava okkurt at fara til og at øll trívast og eingin følir seg aftanfyri, og eg haldi at allur ungdómur skal hava eitt ungdómshús
- Betri møguleikar í landinum, ikki uttanlands! Fleiri ungdómshús og meira samling í millum ung og vaksin
- Fáa arbeiði
- Hava nógv meir at gera um dagarnar. Tey, ið ikki arbeiða, eru í telduni allan dagin, uttan tá tey trena fótólt. Her er bara fótbóltur og nøkur fá sleppa at spæla tónleik: Floytu, guitar og klaver
- Fótbóltsstadium, fótbóltsvøllar, svimhihøll, fleiri handlar og fleiri kanalir til spanskan fótbólt
- At hava fleiri festivalar og meir ungdómshús
- Eitt ungdómshús, onkrastaðni at fara og hava tað stuttligt… betri skúlar, svimjihøll, meiri ítróttur, tunnil itl sandoyna!!!!

- Broyta at kunna taka koyrikort til skutarar í mai mánað. Og ikki til 2009
- Skúlarnir eru nógv for strangir, blívi púrasta svakur av teimun
- At skúlarnir og lærararnir eru góðir og at øll blíva behandlaði líka
- At sleppa at gera okkurt. At fáa eina góða ítróttarhhøll ella okkurt, sum fær okkum at gera okkurt. T.d. røra okkum, spæla tónleik…
- Eg haldi at meira skuldi verið at gjørt á Sandoynni fyri tey ungu, til dømis ungdómshús o.s.fr.
- Eg haldi, at man burdi gjørt meir til tey ungu í Føroyum, tí at t.d. í Skopun her er einki at gera uttan at spæla Fótbólt, Og her brudi veri eitt ungdómshús og meira ítróttur t.d. fimleik
- At byggja eina innandura skatepark
- Styttri skúlatíð, fáa arbeiði tá ið vit eru 14
- Fáa eitt betri samfalg fyri ung. Møguleikarnir eru góðir í Havn. Men havi einki hoyrt um at teir eru líka góðir aðrastaðni í landinum
- Eitt ungdómshús og at man skal kunna taka skutarakort tá man er 16 ár
- Eg haldi veruliga at vit burdu havt fleiri ungdómshús her í Føroyum, tí annars hava vit ungdómar ongstaðni at fara! Og so mugu vit eisini fáaa betri tilfar til fólkaskúlarnir, so vit duga nakað, tá ið vit fara víðari, so vit ikki vera helt "bumbardera"!
- Fleiri ítróttarstøð kring landið! At tey ungu ikki kunnu drekka og so víðari!
- Eg haldi at fólkaskúlin er vánaligur. Bæði hølir, útgerð (bøkur o.s.fr.) og eisini teir flestur lærararnir, og so kundi lærarin roynt at fingið tímarnar meira áhugaverdar
- At onkur vísir umsorg ! Minni happing! Man skal ikki vera noyddur alla tíðina at ansa eftir, hvat man ger fyri bara at kunna livað frítt, uttan at vera bangin. Ítróttarhús! Musikkskúlar
- Tað einasta, sum gevur sanna lívsgleði er at toknast Gudi. Tað eru nóg nógvar samkomur í Føroyum. stórur tørvur er á einum nýggjum tónleikaskúla, vit spæla í kjallaranum í húsunum uppi yvir tónleikaskúlan
- Betri samanhald millum ungdómin. Hava fleiri "tiltøk" fyri ung. T.d. sum Ung í Føroyum, Tað hevði gott kunnað verið meiri av tílíkum tiltøkum. Vera meira saman við fólki, sum hava somu áhugamál

Hetta, sum her stendur í listanum, gevur eina góða heildarmynd av kanningini í føroyskum fólkaskúlum. Her sæst hvat, ið børnini og tey ungu hugsa mest um og ynskja at fáa broytt. Ynskið hjá ungdóminum at fáa fleiri tilboð, meira at gera og ganga til, gongur sum ein reyður tráur ígjøgnum allan listan. Næstan líkamikið, hvat tey annars meina og sakna, so er hetta felags fyri tey øll. Boðskapur teirra er: tað er ov lítið at gera! Serliga ung í útjaðaranum eru hart rakt. Tey keða seg ofta og føla ikki at nøkur broyting er á veg. Eitt konkret ynski, ið allir flokkar í øllum skúlum taka upp, er ungdómshús. At fáa eitt ungdómshús er tað einasta ynskið hjá nógvum – restina kunnu tey sjálvi skapa og skipa fyri.

## [4] Niðurstøður

Kanningin hjá mær frá 2008 gevur innlit í nógv ymisk viðurskifti í tí føroyska samfelagnum, og tað eru børnini og tey ungu, ið senda boðskapin út til almenningin. Børn og ung siga sína meining um mentan, skúla, trivnað o.s.fr. við støði í sínum egna lívi. Eg skal nú í stuttum royna at taka samanum og framhevja høvuðsniðurstøðurnar úr kanningini.

Børnini í 3. flokki í 7 fólkaskúlum – Eystursk úlin, Argja skúli, Skúlin á Ziskatrøð, Vágs skúli, Tofta skúli, Miðvágs-Sandavágs skúli og Eiðis skúli – kring landið hava skrivað niður sínar tulkingar, meiningar og raðfestingar um sera nógv viðurskifti, ið onkursvegnað ávirkað teirra gerandisdag og framtíðarútlit. Børnunum dámar sum heild væl at ganga í skúla. Ítrótturin umboðar ein týðandi part av frítíðini hjá sera nógvum føroyskum børnum. Tey ganga til ítrótt, stuðla ítróttarligum virksemi og ynskja ein mentanarpolitikk, ið hámetir ítróttin. Tó er hetta eyðsæð ikki galdandi fyri øll. Nógv ganga eisini til (átrúnaðarlig) møti og sang. Hetta er galdandi fyri øll økini í landinum. Modernaðir miðlar (t.d. alnetið) slúka eisini nógva dýrmetta tíð hjá børnunum. Sum heild dámar børnum sera væl at spæla á teldu. Hetta krevur ongan formellan felagsskap og fer í stóran mun fram í privatum heimum. Og hóast nýggju miðlarnir eru í hásæti, so er áhugavert at síggja, hvussu væl børnum dámar at spæla úti í náttúruni. Tá børn hugsa um spæl, so ynskja tey flestu at vera úti saman við vinum. Sostatt hevur nýggja samskiftis- og kunningartøknin ikki avloyst alt uttandura spæl uttan tøknilig "hjálparamboð". Tað, sum plágar sera nógv børn, ikki minst í útjaðaranum, er keðsemi. Hóast børnini sum heild trívast væl í heimbygdini ella heimbýnum, so keða tey seg ofta og sakna fleiri mentanarlig frítíðartilboð. Tá børnini hugleiða um sína framtíð, so ynskja tey flestu at uppliva nógv spennandi og fáa ríkar royndir. Tey eru opin og jalig, tá tey hugsa um framtíðina hjá sær.

Tá børnini hugleiða um fyribrigdið "mentan", so knýta sera nógv børn mentan og skúla saman. Skúlin hevur høga raðfesting, og tey flestu trívast hampuliga væl í skúlanum. Eitt annað, ið børnini taka fram, tá tosað verður um mentan og frítíð, er barnaklubbar. Nógv børn sakna barna (frítíðar) klubbar í heimbygdini hjá sær. Viðvíkjandi skúlanum, so fyllir hann eyðsæð nógv í tonkum og gerandislívi teirra, og børnini hava ymsar meiningar um, hvussu ein góður skúli sær út. Tað mest týðandi fyri børnini er at hava góðar fittar lærarar. Hetta kemur í fyrstu røð. Um samskiftið millum børn og lærarar haltar, so verður skúlaumhvørvið ongantíð gott hjá børnum. Trivnaðurin hjá børnum er tætt knýttur at hesum sosiala sambandi. Annars nevna børnini eisini, at ein góður skúli hevur góðar ítróttarumstøður (ítróttarhøll) og góðar teldur. Hetta er áhugavert, tí tað vísir, at teimum flestu dámar væl kropsligar venjingar og spæl, men eisini tøkniligu amboðini, ið skulu geva vitan, førleikar og skemt. Børn læra eisini nógv um heilsu í skúlanum í dag, og tað sæst aftur í úrslitunum. Sera nógv ynskja víðgongd roykiforboð sett í gildi beinanvegin. Børnini hugleiða um broytingar, ið kundu skapt ein betri trivnað í samfelagnum. Hvat telur mest? Hvat skal raðfestast hægst? Her er áhugavert at síggja at t.d. gott veður er eitt ynski hjá nógvum. Um veðrið er gott, so er lættari at spæla úti.

Tá vit tosa um børn í 9-10 ára aldri, so er spæl ein sera týðandi partur av mentanini og sosialu menningini. Spæl er eitt slag av barnamentan. Børnini í kanningini sakna meira tíð til spæl og skemt. Hjá nógvum børnum eru frítíðarítrivini sera bindandi – serligar venjingartíðir, reglur, krøv, fyrireikingar o.s.fr. Frítíðin verður hjá nógvum børnum nakað álvarsamt, ið krevur nógva orku av børnunum. Tað fría óstýrda spælið er eisini týðandi fyri børn. Í kanningini siga tey flestu børnini eisini, at tey gjarna vilja hava meira spæl úti í náttúruni. Haraftrat siga tey, at tey gjarna vilja spæla utta, at foreldur alla tíðina hava eftirlit yvir teimum.  Annars er familjan eyðsæð ein sera týðandi eind fyri flestu børnini kring landið. Familjan umboðar teirra sterkasta netverk. Tá børnini hugleiða um framtíðina, so knýta tey flestu framtíðina til familjuna. Tann nærmasta familjan er har – nú og í framtíðini. Børnini hava sum heild ein sterkan sosialan og mentanarligan kapital, men seta tó krøv til samfelagið. Tey tosa nógv um trivnað, hóast tey ikki altíð brúka orðið “trivnaður”.

Børnini í 3. flokki skulu ganga 5 ár í skúla, áðrenn tey verða næmingar í 8. flokki í framhaldsdeild fólkaskúlans. Hetta eru 5 lang ár við stórum broytingum í lívinum. Tað er næstan sum at verða “vaksin”, hóast næmingarnir í 8. flokki vanliga einans eru 14-15 ára gamlir. Samleikin er broyttur og tey eru før fyri at kjakast um flestøll evni. Tey klára eisini betri at verja seg og síni sjónarmið. Í skúlahøpi er broytingin eisini sera stór. Hvat sigur ungdómurin í 8. flokki í fólkaskúlum í Havn, á Argjum, í Klaksvík, í Vági, á Toftum, í Vágum og á Sandoynni okkum so? Hvat fyri ynskir og dreymar hava tey? Hvat fyri meiningar og raðfestingar eyðkenna ungdómin?

Tey ungu trívast sum heild á heimstaðnum. Tó eru tey eitt sindur í iva viðvíkjandi framtíðini hjá sær í heimbygdini ella heimbýnum. Tað er ikki víst at tey ynskja at verða verandi har. Tey eru, er vert at nevna, ikki líka glað fyri skúlan sum børnini eru. Nógv ung trívast í skúlanum, men tað eru eisini nógv, ið eru skúlatroytt. Nøkur ung beinleiðis mistrívast í skúlanum. Í frítíðini ganga nógv til ítrótt. Eisini í hesum árgangi eru tað ítrótturin og (átrúnaðarlig) møti/sangur, ið meirlutin tekst við aftaná skúlatíð. Nógv frítíðarítriv hjá ungdóminum eru tey somu sum hjá børnunum. Teimum ungu dámar væl at lurta eftir tónleiki, hyggja í sjónvarp, keypa (”shoppa”) o.s.fr. Tey sakna eisini ymisk tilboð til ung í lokalsamfelagnum. Serliga tær minstu bygdirnar hava ilt við at geva ungdóminum frítíðartilboð, ið nøkta tørvin. Ungdómurin er á einum máli um, at ungdómsklubbar mangla í Føroyum. Ferð eftir ferð nevna ungdómar, úr øllum skúlunum, at hesum viðvíkjandi er støðan alt ov vánalig í Føroyum í dag! Tá tey ungu nevna ungdómsklubbar, so nevna tey ofta eisini ungdóms-diskotek og betri dansiviðurskfiti. Tey 14-15 ára gomlu føla seg eitt sindur gloymd. Tey detta niður ímillum tveir aldursbólkar, ið hava fleiri tilboð og møguleikar viðvíkjandi frítíðarlívi.

Ungdómurin hevur fjøltáttaðar meiningar um ungdómsmentan og -politikk. Er nakar ungdómspolitikkur í Føroyum? Tað ivast tey flestu ungu í. Næstan ongin persónur í kanningini meinar, at nakar ungdómspolitikkur er í kommununum kring landið. Ungdómurin hevur tað rímiliga gott, siga tey ungu sjálvi, men tey eru ósjónlig í samfelagskjakinum. Tey ungu eru forsømd politiskt, sigur ungdómurin í kanningini. Við øðrum orðum siga tey, at tey flestu hava tað gott, men at hetta ikki kemst beinleiðis av nøkrum politiskum raðfestingum. Tá tey ungu tosa um politiskar raðfestingar, so hava tey størstan áhuga í skúla, ítrótti og (náttúru) umhvørvi.  Ein góður skúli hevur, sambært ungdóminum, góðar fittar lærarar, ið skapa eitt gott samskifti millum børn og millum børn og vaksin. Ein góð modernað kantina, sigur ungdómurin, hoyrir eisini til tann góða fólkaskúlan. Haraftrat skal

ein góður skúli hava góða ítróttarhøll, siga nógv ung. Tó fáa "vanlig" bóklig fak eisini høga raðfesting. Nógv ung knýta ein góðan skúla til góða undirvísing í rokning og skriving.

Tá ung spæla politikarar kemur nógv forvitnisligt á borðið. Tey ungu ynskja fleiri nýggj ungdómshús og ungdóms-diskotek, betri umstøður at íðka ítrótt kring alt landið (ikki bara bóltspøl, men eisini heilt aðrar ítróttargreinar), fleiri musikk-skúlar, tivoli o.s.fr. Tey raðfesta mentan, undirhald, ítrótt og sosiala samveru. Alt hetta hevur, sambært ungdóminum, stóran týdning fyri trivnaðin hjá tí einstaka, og harvið eisini fyri skúlagongd og persónliga menning hjá øllum børnum og ungdómum í Føroyum. Hetta eru mentanarligar fortreytir fyri at skapa eitt umhvørvi, ið skapar trivnað. Politisku ynskini kunnu í høvuðsheitum orðast soleiðis: trivnaður, góður skúli, gott umhvørvi. Ungdómurin í Føroyum hugsar ikki bara um seg sjálvan. Hann hugsar ikki bara um ungdóm ella bara um føroyingar. Tað sæst í kanningini, tí sera nógv ung hava neyðhjálp til fátøk lond sum politiskt ynski. Ungdómsmentan er eisini nakað, ið tey ungu meina eigur at fáa nógv hægri politiska raðfesting í Føroyum.

Eitt annað evni, ið ungdómurin tekur í størsta álvara, tá vit viðgera fyribrigdið "trivnaður", er kynsligur ágangur. Tey flestu ungu í 14-15 ára aldri hava eitt ynski um, at børn og ung verða betri vard ímóti kynsligum ágangi. Hetta er tað fremsta ynskið hjá fleiri ungdómum. Tey ungu ynskja eisini at verða betri vard ímóti happing frá vaksnum persónum. Hetta er áhugavert, tí tað verður næstan ongantíð tosað um happing millum ymisku ættarliðini í samfelagnum. Eisini er tað áhugavert, tí hetta er ein ójøvn valdsstøða, har annar parturin hevur nógv meira vald enn mótparturin. Hetta kann tíverri viðhvørt innibera valdsmisnýtslu av grovasta slag. Tey ungu ynskja eisini at fáa betri undirvísing og betri trivnað á skúlunum í landinum. Nógv ung eru ónøgd við sínar lærarar og floksundirvísingina, sum hesir stýra. Her eru ymisk álvarsom viðurskifti nevnd, ið skapa trupulleikar, ið nógv ung stríðast við ígjøgnum ungdómsárini, men eisini seinni í lívinum. Her eru trupulleikar, ið skapa sár í sálini, sum ikki grøða aftur. Talan er í teimum álvarsomu dømunum um "neyðarróp", har einstaklingar føla, at tey ikki sleppa úr óndari ringrás. Ofta er tann heilt stutta forkláringin, at tey ikki hava nakran at tosa við. Tey sakna í veruleikanum stuðul, ráðgeving og hjálp. Hetta eigur eitt framkomið fólkaræði at bjóða sínum børnum og ungdómum.

Viðvíkjandi ungdómsmentanini í Føroyum, so eru tey ungu meira atfinningarsom, enn vaksin fólk mangan eru. Ungdómsmentanin í Føroyum blómar ikki. Hetta sigur ungdómurin sjálvur. Ung hava tað sum heild gott, tey klára seg og hava eina familju og eitt heim, men tey fáa lítið og onki bjóðað, ið kann skapa tíðarhóskandi karmar fyri eini veruliga blómandi ungdómsmentan. Tilboðini til ungdómin eru ikki nøktandi. Kanska tað eru framstig at hóma á summum økjum, t.d. eru fleiri ungdómshús komin síðstu árini, men samstundis kenna tey ungu alt betri støðuna hjá ungdóminum í Íslandi, Danmark, Noregi o.s.fr. Tey síggja sjálvi hvussu nógv tilboð, hini hava, sum tey sjálvi mangla. Kanska krøvini hjá ungdóminum viðhvørt eru ov høg, men kanningin hjá mær hevur víst, at tey ungu sum oftast eru sera eyðmjúk og góðkenna meira enn flest onnur høvdu gjørt. Nógv keða seg og sakna frítíðartilboð, ið umboða annað enn ítrótt, sang og møti. Tey flestu ungu eru samd um, at tey ungu í Føroyum, ið hava øðrvísi áhugamál enn høvuðsbólkurin, eru gloymd. Tað er, sigur ungdómurin, ein høvuðsbólkur, ið stórtrívist og fær sín tørv væl og virðiliga nøktaðan. Við øðrum orðum blómar kanska onkur ungdómsmentan, men hinar hava ringt kor. Tað fjølbroytta ungdómslívið hevur ikki góð livikor í løtuni. Ungdómurin krevur ikki nógv, einans nakrar tíðarhóskandi karmar, og ynskir at gera tað mesta av arbeiðinum utta hjálp frá serfrøðingum.

## Fylgiskjøl

[ 3. flokkur ]

Hey tit !
Hetta er ein spurnakanning,
ið hevur børn og ung úr øllum landinum sum luttakarar.
Sjey skúlar kring Føroyar eru valdir út.
Tykkara skúli er ein teirra!
Eitt spurnablað er gjørt til tey í 8. flokki,
eitt annað til tey í 3. flokki.
Tit skulu nú royna at svara øllum hesum spurningum.
Tit svara hvør sær og skriva ikki navn á pappírið.
Tit brúka umleið ein skúlatíma til arbeiðið.
Um tit ikki skilja spurningin,
kunnu tit sjálvandi spyrja læraran.

Hví gera vit hesa kanningina?
Tað er tí at politikararnir í Føroyum
(serliga MENTAMÁLARÁÐIÐ),
gjarna vilja finna útav,
hvat børn & ung í Føroyum
Halda um mentan og frítíð og skúla.
Uttan tykkara hjálp klára politikararnir
ikki at skapa ein góðan mentanarpolitikk
fyri øll børn & ung í landinum.

Heilsan
F Gaini
Projektleiðari
(í samstarvi við MMR)

SPURNAKANNING TIL BØRN Í
3. FLOKKI Í FÓLKASKÚLANUM

1 Aldur:

2 Býur / bygd:

3A Hvussu leingi hevur tú búð í Føroyum?

| | |
|---|---|
| Undir 1 ár | [ ] |
| 1 – 3 ár | [ ] |
| Meira enn 3 ár | [ ] |
| Eg veit ikki | [ ] |

3B Hvussu leingi hevur tú búð her í bygdini / býnum?

| | |
|---|---|
| Undir 1 ár | [ ] |
| 1 – 3 ár | [ ] |
| Meira enn 3 ár | [ ] |
| Eg veit ikki | [ ] |

4 Dámar tær at búgva her?

| | |
|---|---|
| Sera væl | [ ] |
| Væl | [ ] |
| Ikki so væl | [ ] |
| Illa | [ ] |
| Eg veit ikki | [ ] |

5 Vilt tú gjarna búgva her tá tú verður vaksin?

| | |
|---|---|
| Ja | [ ] |
| Nei | [ ] |
| Eg veit ikki | [ ] |

6 Dámar tær væl at ganga í skúla?

| | |
|---|---|
| Sera væl | [ ] |
| Væl | [ ] |
| Ikki so væl | [ ] |
| Illa | [ ] |
| Eg veit ikki | [ ] |

7 Gongur tú til nakað í frítíðini hjá tær? (fleiri krossar)

| | |
|---|---|
| Ítrótt | [ ] |
| Sang & tónleik | [ ] |
| Møti (kristiligar samkomur) | [ ] |
| Sjónleik | [ ] |
| Dans | [ ] |
| Skóti | [ ] |
| Annað _________ | |
| Onki | [ ] |

8 Hvat manglar í bygdini / býnum hjá tær? (fleiri krossar)

| | |
|---|---|
| Ítrótt | [ ] |
| Sang & tónleik | [ ] |
| Møti (kristiligar samkomur) | [ ] |
| Sjónleik | [ ] |
| Dans | [ ] |
| Skóti | [ ] |
| Annað _________ | |
| Onki | [ ] |
| Eg veit ikki | [ ] |

9 Hvat annað dámar tær at gera í frítíðini hjá tær? (fleiri krossar)

| | |
|---|---|
| Ganga túrar | [ ] |
| Súkkla | [ ] |
| Fiska | [ ] |
| Spæla telduspøl | [ ] |
| Hyggja í sjónvarp | [ ] |
| Lurta eftir tónleiki | [ ] |
| Fara á bókasavn | [ ] |
| Lesa | [ ] |
| Tekna | [ ] |
| Skateboard | [ ] |
| Annað __________ | |
| Onki | [ ] |
| Eg veit ikki | [ ] |

10 Keðir tú teg viðhvørt tá tú kemur heim úr skúla?

| | |
|---|---|
| Ja | [ ] |
| Nei | [ ] |
| Eg veit ikki | [ ] |

11 Heldur tú at børn hava tað gott & trívast í bygdini/býnum hjá tær?
Ja [ ]
Nei [ ]
Eg veit ikki [ ]

12 Hvat passar best til tín av hesum (ein kross):

Mær dámar best at vera heima og spæla einsamallur [ ]
Mær dámar best at vera úti og spæla einsamallur [ ]
Mær dámar best at vera saman við vinum heima [ ]
Mær dámar best at vera saman við vinum úti [ ]
Eg veit ikki [ ]

13 Hvat passar best til tín av hesum (ein kross)

Mær dámar best at gera ítrótt og luttaka í kappingum [ ]
Mær dámar best at tekna og mála [ ]
Mær dámar best at brúka teldu til spøl og annað [ ]
Mær dámar best at onki gera [ ]
Eg veit ikki [ ]

14 Hvat passar best til tín av hesum (ein kross)

Mær dámar best at læra nakað nýtt [ ]
Mær dámar best at gera tað, sum eg eri vanur at gera [ ]
Eg veit ikki [ ]

15 Hvat er "mentan"? (ein kross)

Mentan er bøkur og málningar [ ]
Mentan er at hava barna / ungdómsklubbar at fara til [ ]
Mentan er at hava ein góðan og spennandi skúla [ ]
Mentan er at byggja nýggjar vegir, tunlar og skrivstovur [ ]
Annað __________
Eg veit ikki [ ]

16 Hvat av hesum eigur at verða gjørt fyrst? (ein kross)

Fáa fleiri parkeringspláss [ ]
Fáa fleiri bankar [ ]
Fáa betri skúlar [ ]
Fáa fleiri klubbar til børn [ ]
Eg veit ikki [ ]

17 Um tú vart politikari, hvat hevði tú sagt? (ein kross)

“Børnini hava tað fínt – tað er óneyðugt at hugsa meira um tey” [ ]
“Børnini trívast – men vit mugu gera nakað fyri at fáa øll at trívast enn betri” [ ]
“Børnini hava tað ikki gott – vit mugu hjálpa teimum og lurta eftir teimum!” [ ]
“Tað er líkamikið hvussu børn hava tað – eg hugsi bara um vaksin” [ ]
Eg veit ikki [ ]

18 Um tú vart “borgarstjóri” í bygdini hjá tær, hvat hevði tú so gjørt fyri børnini? (nevn 3-5 ting)

______________________________________
______________________________________
______________________________________
______________________________________

19 Hvønn skúla hevði tú valt av hesum? (ein kross)

Skúlan við nýggjum flottum teldum í øllum skúlastovunum [ ]
Skúlan við fittum og góðum lærarum [ ]
Skúlan við størsta og besta skúlagarðinum [ ]
Skúlan við vakrastu skúlastovunum við góðum borðum og stólum [ ]
Eg veit ikki [ ]

20 Hvønn skúla hevði tú valt av hesum? (ein kross)

Skúlan við besta bókasavninum [ ]
Skúlan við bestu ítróttarhøllini [ ]
Skúlan við bestu kantinuni (matstova) [ ]
Skúlan, ið liggur mitt úti í náttúruni [ ]
Eg veit ikki [ ]

21 Hvønn skúla hevði tú valt? (ein kross)

Skúlan har børn læra mest [ ]
Skúlan, ið er stuttligast at ganga í [ ]
Skúlan har børn ikki fáa skúlating at gera heima [ ]
Skúlan har børn ikki skulu møta fyrr enn klokkan 10 um morgunin [ ]
Eg veit ikki [ ]

22 Hvønn skúla hevði tú valt? (ein kross)

Skúlan, har børn hava mest skriving og rokning [ ]
Skúlan, har børn hava mest tónleik og sjónleik... [ ]
Skúlan, har børn hava mest religión og søgu [ ]
Skúlan, har børn eru mest úti [ ]
Eg veit ikki [ ]

23 Hvørja bygd / bý hevði tú valt? (ein kross)

Har, tað ongantíð er ringt veður [ ]
Har, tað eru færri bilar [ ]
Har, børn hava meira at fara til [ ]
Har, fólk hava fleiri pengar [ ]
Eg veit ikki [ ]

24 Hvørja bygd / bý hevði tú valt? (ein kross)

Har, børn sleppa sjálvi at velja hvat, tey vilja gera [ ]
Har, børn kunnu vera politikarar [ ]
Har, børn hava meira tíð til spæl og skemt [ ]
Har, børn skulu byrja í skúla tá tey eru 5 ár [ ]
Eg veit ikki [ ]

25 Hvønn klubba hevði tú valt? (ein kross)

Klubban har, øll brúka teldur og eru á alnetinum [ ]
Klubban har, vaksin fólk læra børnunum at syngja, tekna og annað [ ]
Klubban har, børn spæla & hugna sær uttan at nakar vaksin er við [ ]
Klubban har, børn og foreldur eru saman [ ]

26 Hvønn klubba hevði tú valt? (ein kross)

Klubban har, børn ferðast uttan at foreldrini eru við [ ]
Klubban har, stór børn (ungdómar) læra yngri børn (7-9 ár) at syngja, dansa o.s.fr. [ ]
Klubban har, bara gentur *ella* bara dreingir sleppa at vera við [ ]
Klubban har, børn eru úti í náttúruni (ganga túrar, sigla í báti...) [ ]

27 Fortel um hvussu tann besti barna-klubbin er:

___________________________________
___________________________________
___________________________________

28 Framtíðin hjá tær – hvat hugsar tú mest um? (ein kross)

Arbeiði [ ]
Familja [ ]
Vinir [ ]
Kærleikslív [ ]
Eg veit ikki [ ]

29 Framtíðin hjá tær – hvat hugsar tú mest um? (ein kross)

Eg vil læra nógv og fáa góða útbúgving [ ]
Eg vil uppliva nógv og hava eitt spennandi lív [ ]
Eg vil skapa nakað – mála, tekna, skriva o.s.fr. [ ]
Eg vil blíva kendur og ríkur [ ]
Eg veit ikki [ ]

30 Hvat heldur tú annars er mest týðandi fyri at fáa børn at trívast, vera glað og sterk í Føroyum:

______________________________________
______________________________________
______________________________________
______________________________________
______________________________________
______________________________________
______________________________________

TAKK fyri at tú svaraði hesum spurningum ! ☺

[ 8. Flokkur ]

Hey tit !
Hetta er ein spurnakanning,
ið hevur børn og ung úr øllum landinum sum luttakarar.
Sjey skúlar kring Føroyar eru valdir út.
Tykkara skúli er ein teirra!
Eitt spurnablað er gjørt til tey í 8. flokki,
eitt annað til tey í 3. flokki.
Tit skulu nú royna at svara øllum hesum spurningum.
Tit svara hvør sær og skriva ikki navn á pappírið.
Tit brúka umleið ein skúlatíma til arbeiðið.
Um tit ikki skilja spurningin,
kunnu tit sjálvandi spyrja læraran.

Hví gera vit hesa kanningina?
Tað er tí at politikararnir í Føroyum
(serliga MENTAMÁLARÁÐIÐ),
gjarna vilja finna útav,
hvat børn & ung í Føroyum
Halda um mentan og frítíð og skúla.
Uttan tykkara hjálp klára politikararnir
ikki at skapa ein góðan mentanarpolitikk
fyri øll børn & ung í landinum.

Heilsan
Firouz Gaini
Projektleiðari
Søgu og Samfelagsdeildin
Fróðskaparsetur Føroya
(í samstarvi við MMR)

SPURNAKANNING TIL BØRN Í 8. FLOKKI Í FÓLKASKÚLANUM
Evni : ung og mentan og mentanarpolitikkur

1 Aldur:

2 Býur / bygd:

3A Hvussu leingi hevur tú búð í Føroyum?

| | |
|---|---|
| Undir 1 á | [ ] |
| 1 – 3 ár | [ ] |
| Meira enn 3 ár | [ ] |
| Eg veit ikki | [ ] |

3B Hvussu leingi hevur tú búð her í bygdini/býnum?

| | |
|---|---|
| Undir 1 ár | [ ] |
| 1 – 3 ár | [ ] |
| Meira enn 3 ár | [ ] |
| Eg veit ikki | [ ] |

4 Dámar tær at búgva her?

| | |
|---|---|
| Sera væl | [ ] |
| Væl | [ ] |
| Ikki so væl | [ ] |
| Illa | [ ] |
| Eg veit ikki | [ ] |

5 Vilt tú gjarna búgva her tá tú verður vaksin?

| | |
|---|---|
| Ja | [ ] |
| Nei | [ ] |
| Eg veit ikki | [ ] |

6 Dámar tær væl at ganga í skúla?

| | |
|---|---|
| Sera væl | [ ] |
| Væl | [ ] |
| Ikki so væl | [ ] |
| Illa | [ ] |
| Eg veit ikki | [ ] |

7 Gongur tú til nakað í frítíðini hjá tær? (fleiri krossar)

Ítrótt [ ]
Sang & tónleik [ ]
Møti (kristiligar samkomur) [ ]
Sjónleik [ ]
Dans [ ]
Skóti [ ]
Annað _________
Onki [ ]
Eg veit ikki [ ]

8 Hvat manglar í bygdini / býnum hjá tær? (fleiri krossar)

Ítrótt [ ]
Svimjing [ ]
Sang & tónleik [ ]
Møti (kristiligar samkomur) [ ]
Sjónleik [ ]
Føroyskan dans [ ]
Annan dans [ ]
Skóti [ ]
Ungdómsklubbi [ ]
Ungdómsdiskotek [ ]
Talv [ ]
Frítíðarskúla [ ]
Annað _________
Onki [ ]
Eg veit ikki [ ]

9 Hvat annað dámar tær at gera í frítíðini hjá tær? (set nr. 1 og 2 og 3)

Ganga túrar [ ]
Súkkla [ ]
Fiska [ ]
Spæla telduspøl [ ]
Kjatta [ ]
Hyggja í sjónvarp [ ]
Lurta eftir tónleiki [ ]
Fara á bókasavn [ ]
Lesa [ ]
Tekna [ ]
Skateboard [ ]
Arbeiða [ ]
Gera mat [ ]
Ríða [ ]

Keypa (*shoppa*) [ ]
Annað __________
Onki [ ]
Eg veit ikki [ ]

10 Hevur kommunan hjá tær nakran barna- & ungdómspolitikk?
Ja [ ]
Nei [ ]
Eg veit ikki [ ]

11 Heldur tú at kommunan hjá tær ger nóg nógv fyri børn & ung?
Ja [ ]
Nei [ ]
Eg veit ikki [ ]

12 Heldur tú at børn & ung hava tað gott í kommununi hjá tær?
Ja [ ]
Nei [ ]
Eg veit ikki [ ]

13 Hvat eigur kommunan at raðfesta hægst? (ein kross)
Skúlar [ ]
Vegir [ ]
Kontór [ ]
Ellisheim [ ]

14 Hvat eigur kommunan at raðfesta hægst? (ein kross)
Ítróttarøki [ ]
Ungdómsklubbi [ ]
Kirkjur og samkomur [ ]
Musikkskúla [ ]

15 Hvat eigur kommunan at raðfesta hægst? (ein kross)
Sterkari vinnulív [ ]
Reinari umhvørvi [ ]
Ungdómsmentan og ungdómspolitikkur [ ]
Fleiri matstovur [ ]

16 Hvønn skúla hevði tú valt av hesum? (ein kross)
Skúlan við nýggjum flottum teldum í øllum skúlastovunum [ ]
Skúlan við fittum og góðum lærarum [ ]
Skúlan við størsta og besta skúlagarðinum [ ]
Skúlan við vakrastu skúlastovunum við góðum borðum og stólum [ ]
Eg veit ikki [ ]

17 Hvønn skúla hevði tú valt av hesum? (ein kross)
Skúlan við besta bókasavninum [ ]
Skúlan við bestu ítróttarhøllini [ ]
Skúlan við bestu kantinuni (matstova) [ ]
Skúlan, ið liggur mitt úti í náttúruni [ ]
Eg veit ikki [ ]

18 Hvønn skúla hevði tú valt? (ein kross)
Skúlan, har børn hava mest skriving og rokning [ ]
Skúlan, har børn hava mest tónleik og sjónleik o.a. [ ]
Skúlan, har børn hava mest religión og søgu [ ]
Skúlan, har børn eru mest úti [ ]
Eg veit ikki [ ]

19 Um tú vart borgarstjóri, hvat hevði tú gjørt fyri ungdómin? (set nr. 1 og 2 og 3)
Nýtt ungdómshús [ ]
Nýtt tónleikahús (konserthús) [ ]
Nýggja kirkju [ ]
Sirkus [ ]
Tivoli [ ]
Ungdómsdiskotek [ ]
Nýggjan skúla [ ]
Nýggja teldu-café [ ]
Nýtt mentanarhús [ ]
Ungdómsting (politiskt) [ ]
Nýtt bókasavn til ung [ ]
Nýtt listasavn til ung [ ]
Nýggj ungdómsbløð [ ]
Nýggjar heimasíður til ung [ ]
Nýtt ítróttarøki til ung [ ]
Annað _________
Onki [ ]

20 Tú fært trý politisk ynski uppfylt – hvørji velur tú? (set nr. 1 og 2 og 3)
Føroyar fáa heimsins største altjóða flogvøll [ ]
Føroyar fáa heimsins størsta handilsdepil við hundraðtals handlum [ ]
Føroyar fáa heimsins longsta tunnil undir havið [ ]
Føroyar fáa heimsins besta fólkaskúla [ ]
Føroyar fáa heimsins besta listaskúla [ ]
Føroyar fáa heimsins besta ítróttarskúla [ ]
Føroyar fáa heimsins besta tónleikaumhvørvi [ ]
Føroyar fáa heimsins størsta biograf [ ]
Føroyar fáa heimsins kendasta náttklubba [ ]
Føroyar verða heimsins ríkasta land [ ]
Føroyar fáa heimsins reinastu náttúru [ ]
Føroyar hevur ungdómin, ið trívist best [ ]

21 Tú fært trý politisk ynski uppfylt – hvørji velur tú? (set nr. 1 og 2 og 3)
10 milliónir til privata vinnulívið [ ]
10 milliónir til oljuleiting [ ]
10 milliónir til tunlar [ ]
10 milliónir til neyðhjálp í triðja heiminum [ ]
10 milliónir til mentan og bøkur [ ]
10 milliónir til sjúkrahúsini [ ]
10 milliónir til barna- og ungdómsmentan [ ]
10 milliónir til skúlan [ ]
10 milliónir til kirkjuna [ ]
10 milliónir til tey gomlu [ ]
10 milliónir til umhvørvið (umhvørvisvernd) [ ]
10 milliónir til vápn [ ]

22 Tú fært trý politisk ynski uppfylt – hvørji velur tú? (set nr. 1 og 2 og 3)
Meira politisk vald til ungdómin [ ]
Fleiri mentanarlig tilboð til ungdómin [ ]
Fleiri útbúgvingartilboð til ungdómin [ ]
Fleiri inntøkumøguleikar til ungdómin [ ]
Fleiri hús og pláss til ungdómin í bygdini / býnum [ ]
Fleiri bústaðir til ungdómin (íbúðir, studentabústaðir o.s.fr.) [ ]
Fleiri sendingar til ung í sjónvarpi & útvarpi [ ]
Lægri prísir til ung (klæðir, mat, ferðir o.s.fr.) [ ]
Betri ráðgeving til ung (um sosial, kynslig, juridisk o.o. mál) [ ]
Rættindini hjá børnum & ungdómi betrast (mannarættindi) [ ]
Bókasøvnini hava longri opningstíðir og hava opið sunnudagar [ ]
Ung sleppa ókeypis inn á listasøvn og onnur søvn. [ ]

23 Tú fært trý politisk ynski uppfylt – hvørji velur tú? (set nr. 1 og 2 og 3)
Ung fáa almennan umboðsmann, ið verjir rættindini hjá ungdóminum [ ]
Ung sleppa at vera við til at orða ein ungdómspolitikk fyri landið [ ]
Ung verða betri vard ímóti happing frá vaksnum [ ]
Ung verða betri vard ímóti kynsligum ágangi [ ]
Ung fáa betri og bíligari mat í øllum skúlunum í landinum [ ]
Ung fáa betri undirvísing um trivnað, heilsu og samskifti í skúlunum [ ]
Ung fáa betri undirvísing um kynslív í skúlunum [ ]
Valrættaraldurin niður til 16 ár [ ]
Valrættaraldurin niður til 14 ár [ ]
Ung sleppa at taka koyrikort til bil longu 16 ára gomul [ ]
Ung sleppa ikki at taka koyrikort til bil fyrr enn 20 ára gomul [ ]
Fleiri bussleiðir og fleiri túrar allar dagar – eisini sunnudag [ ]

Spurningar nr 24-34: Set bara *ein* kross! [ 1=heilt samdur / 2=nokkso samdur / 3=ivasamur / 4=nokkso ósamdur / 5= heilt ósamdur ]

24 "*Í Føroyum hava vit ein sera góðan mentunarpolitikk fyri ung*"
1 [ ]
2 [ ]
3 [ ]
4 [ ]
5 [ ]

Viðmerkingar ____________________________________________

25 "*Í Føroyum er óneyðugt at hava nakran mentanarpolitikk fyri ung*"
1 [ ]
2 [ ]
3 [ ]
4 [ ]
5 [ ]

26 "*Í Føroyum hevur ungdómurin tað nógv betri enn aðrastaðni*"
1 [ ]
2 [ ]
3 [ ]
4 [ ]
5 [ ]

Viðmerkingar ____________________________________________

27 “*Í Føroyum hava tey ungu eina góða familju, ið stuðlar teimum ígjøgnum lívið*”
1 [ ]
2 [ ]
3 [ ]
4 [ ]
5 [ ]

Viðmerkingar _____________________________________________

28 “*Ungdómsmentanin í Føroyum blómar*”
1 [ ]
2 [ ]
3 [ ]
4 [ ]
5 [ ]

Viðmerkingar _____________________________________________

29 “*Alt ov fá mentanarlig tilboð eru til ung kring landið*”
1 [ ]
2 [ ]
3 [ ]
4 [ ]
5 [ ]

Viðmerkingar _____________________________________________

30 “*Tey ungu, ið ikki íðka ítrótt ella ganga á møti,hava onki at fara til*”
1 [ ]
2 [ ]
3 [ ]
4 [ ]
5 [ ]

Viðmerkingar _____________________________________________

31 “*Nógv ung í Føroyum keða seg og kenna seg einsamøll*”

| | |
|---|---|
| 1 | [ ] |
| 2 | [ ] |
| 3 | [ ] |
| 4 | [ ] |
| 5 | [ ] |

Viðmerkingar _______________________________________________

32 “*Politikarar vita ov lítið um ungdómin í Føroyum*”

| | |
|---|---|
| 1 | [ ] |
| 2 | [ ] |
| 3 | [ ] |
| 4 | [ ] |
| 5 | [ ] |

Viðmerkingar _______________________________________________

33 “*Tey ungu verða ikki hoyrd í politikki í Føroyum*”

| | |
|---|---|
| 1 | [ ] |
| 2 | [ ] |
| 3 | [ ] |
| 4 | [ ] |
| 5 | [ ] |

Viðmerkingar _______________________________________________

34 “*Nógv ung (ið ikki hoyra til `vanliga´ ungdómsmentan) eru gloymd í Føroyum...*”

| | |
|---|---|
| 1 | [ ] |
| 2 | [ ] |
| 3 | [ ] |
| 4 | [ ] |
| 5 | [ ] |

Viðmerkingar _______________________________________________

35 Framtíðin hjá tær – hvat hugsar tú mest um? (ein kross)

Eg vil læra nógv og fáa góða útbúgving [ ]
Eg vil uppliva nógv og hava eitt spennandi lív [ ]
Eg vil skapa nakað – mála, tekna, skriva o.s.fr. [ ]
Eg vil blíva kendur og ríkur [ ]
Eg veit ikki [ ]

36 Hvat heldur tú annars er mest týðandi fyri at fáa ung at trívast, vera glað og sterk í Føroyum:

_______________________________________
_______________________________________
_______________________________________

TAKK fyri at tú svaraði hesum spurningum ! ☺



Firouz Gaini
PhD í antropologi
Fróðskaparestur Føroya
firouz@setur.fo